

ÁRSRIT

# 2021

TJÓÐSAVNIÐ

FAROE ISLANDS NATIONAL MUSEUM

NATURE AND CULTURE



*Kalibreringsøkið á Dølum, har eftirlitsteljingar av drunnhvíta verða gjørdar*

**TJÓÐSAVNIÐ** Ársrit 2021
Lagt til rættis: Savna
Snið og uppseting: Pætur Eyðunsson Jensen / Droym.fo
Prent og liðuggerð: Føroyaprent
Forsíða: Bindimynstur

Svanamerktur prentlutur 541 705

# INNIHALDSYVIRLIT

5 Fororð

## FRAMSÝNING OG MIÐLAN

6 Gerandislív á Eiði 1968
7 Fuglatúrar á Eiði
8 Summartúrur í fjøruni á Borðoyarvík
9 Væleydnaður skordýratúrur
10 Vitjan á hvalastøðini við Áir
11 Drotningarvitjan í Kvívík
12 Plantutúrar
13 Túrar niðri á Bakka á Velbastað
13 Túrar í Hoyvíksgarði
14 Savnsfagnaðurin 2021
15 Ferðaleiðaraskeið 2021
16 Fjørutúraskeið fyri náms- frøðingar og lærarar
17 Vistarskeið í føroyskum dansi við Gjógv

## SAVNIÐ OG MENTANARUMHVØRVIÐ

18 Skráseting av ull
19 Virking av føroyskum klæðum
20 Øll skulu fáa gleði av Koltri
28 Seyðahaldið í koltri
31 Bjargaseyðarøkt í koltri
32 Fuglalívið í Koltri
34 Skrápalandið í Koltri
35 Skordýrakanningar í berginum í Koltri
36 Endurbygging av Varðahjallinum í Koltri
37 Føroysku fólkatingslimirnir í Koltri
38 Fornfrøðiligir útgrevstrar í 2021
45 Bakkaverja undir Líkhús í Kirkjubø
46 Verkætlanin at varðveita hvala- støðina við Áir 2021
48 Móttøka var í samband við, at plantufrøðiligi urtagarðurin læt upp fyri almenninginum
50 Norðurtøðklukkan
51 Skordýrasavnið hjá Tjóðsavninum
52 Lívfrøðiliga arbeiðið í Koltri
52 2021
54 Drunnhvíta- og lundateljing á Ramsar-oyggjum
56 Eftirlit við undankomu av kjógva
58 Biofartilfar heimafturkomið
59 Kortlegging og eftirlit við havbotninum
60 Nevhvalur á Leynasandi
61 Sjóeinglar
62 Steinasavnið í Kirkjubø 3D-skannað og lagt út sum virtuelt savn
62 Talgilding av skjalagoymsluni hjá Sverra Dahl
63 Føroyar við í metaldetektor- skrásetingaskipanina DIME
64 Fornminna- og lendis- skrásetingar í Føroyum
66 Ull er Føroya gull – nýggj framsýning á Tjóðsavninum
68 Fjald hurð komin afturíaftur í Handilshúsunum úti í Klaksvík
70 UNESCO-sáttmálin og skráin Livandi mentan
71 Føroyski báturin innskrivaður á UNESCO-listan
72 ICOM og Føroyar
74 Fólkalívsdeildin við á aðalfund hjá Grindamannafelagnum
75 Fornminnisnevndin 2021
76 Jákupbjørg Lambaa í starvsvenjing á Tjóðsavninum
77 80 ára føðingardagsgáva til drotningina

## RÁÐSTEVNUR, SKEIÐ OG VITJANIR

78 Urtagarðurin í Sandagerði
79 Savnsbúðin
80 Norðurlendskur UNESCO- fundur í Ålesund
81 Tjóðsavnið til Íslands á lívfrøðiráðstevnu
82 Tjóðsavnið á árligu ráðstevnuni hjá Vistfræðifelag Íslands
83 Norðurlendsk savnsráðstevna á Stiklastøðum
84 Kunningarfundur hjá Organisationen Danske Museer
86 Tvíveingjaskeið í Noregi
87 SARA ráðgeving úti á bygdarsøvnunum
88 Tjóðsavnið vitjar í Vágum

## TJÓÐSAVNIÐ

90 Miðlan 2021
90 Útgávur
91 Tjóðsavnið í miðlunum 2021
92 Ann Sølvia Selmarsdóttir Purkhús vart ph.d. við Durham University
93 Vitjandi á framsýningunum 2021
94 Árið sum fór hjá savnslærarunum
95 Starvsfólk 2021
95 Starvsfólk, sum eru byrjað ella givin í 2021
96 Minningarorð um Símun V. Arge
97 Ólavur Øster farin frá
98 Summary in English



“Ein stórhending, sum fór fram í november 2021, var at súðubygdi norðurlendski báturin – ella borðbáturin – varð upptikin á heimsarvslistan hjá UNESCO yvir livandi mentan”

*Kaj Hammer bátasmiður. Teinaringur verður smíðaður*
MYND: JENS KRISTIAN VANG





## FORORÐ

**Eins og í 2020 var virksemi savnsins** í 2021 merkt av koronustøðuni, tó ikki á heilt sama hátt. Í 2020 var koronufarsóttin nýggj. Eingin visti, hvussu sóttin fór at hátta sær, og tiltøkini og viðmælini frá landsins myndugleikum vóru sera umfatandi. Hetta gjørdi, at í eitt tíðarskeið var Tjóðsavnið sum arbeiðspláss og framsýningarnar afturlatnar. Hetta var ikki støðan í 2021. Framsýningarnar høvdu opið sum vant, tó við nøkrum avmarkingum, m.a. um tal á vitjandi í senn. Tað, sum var øðrvísi, var, at talið á vitjandi var nógv lægri enn vanligt, og serliga vóru tað tey útlendsku ferðafólkini, sum vantaðu.

**Hóast tað var hampiliga høgligt at ferðast uttanlands** í 2021, so vóru flestu av fundunum og ráðstevnunum, har fólk úr fleiri londum hittast, annaðhvørt útsett ella hildin gjøgnum alnetið. Á annan hátt var virksemið á savninum, sum tað plagar at vera – nógv og spennandi.

**Arbeiðið at gera heildarætlan fyri Koltur helt fram.** Eitt gjøgnumbrot var, at grunnurin Aage V. Jensen við 2 milliónum krónum stuðlaði verkætlan at skráseta alt djóra- og plantulívið í Koltri. Aage V. Jensen grunnurin stuðlaði eisini Tjóðsavninum fíggjarliga við tveimum øðrum verkætlanum. Einari at gera royndir at telja fugl við dronu, og hin var at leggja ein haga í Kalsoynni út sum friðøki.

**2021 var eins og fleiri av undanfarnu árum** eisini merkt av teimum nógvu útbyggingunum kring landið. Fornfrøðingar savnsins hava í hesum sambandi havt sera nógv at gjørt við skráseting av mentanarlandsløgum og fornminnum, áðrenn tey hvørva med alla í sambandi við útbyggingarnar.

**Í Kúrdali eru eisini framd ymisk tiltøk.** Gamli plantufrøðiligi urtagarðurin, sum hevur ligið á Debesartrøð í fleiri áratíggju, varð fluttur niðan í Hoyvík og læt alment upp á mentanarnáttini 10. september. Í Hoyvík kundi savnsvirksemið við urtagarðinum og savnsvirksemið í Hoyvíksgarði stuðla hvørt øðrum. Farið varð eisini undir at umvæla gamla urtagarðin niðri í sjálvum Kúrdali. Her er ikki talan um plantufrøðiligan urtagarð, men heldur um urtagarð av mentanarsøguligum slagi.

**Árið 2021 bjóðaði eisini eina serframsýning** og eina nýggja fasta framsýning. Serframsýningin “Gerandislív á Eiði 1968” var í Hólmahúsinum á Eiði í mai mánaði, og í juli læt upp fasta framsýningin “Ull er Føroya gull” í framsýningarhølum Tjóðsavnsins í Brekkutúni í Hoyvík.

**Føstu tættirnir sum savnsfagnaðurin** í heystfrítíðini og summartúrarnir kring landið vóru eisini væleydnaðir í 2021. Ein stórhending, sum fór fram í november 2021, var, at súðubygdi norðurlendski báturin – ella borðbáturin – varð upptikin á heimsarvslistan hjá UNESCO yvir livandi mentan. Føroyar vóru við í felagsumsókn saman við hinum norðurlondunum um at fáa handverkið at smíða hesar bátar á listan. Vónin er, at viðurkenningin fær land og kommunur veruliga at vísa vilja at varðveita siðaarvin.

**Savnið varð rakt av eini sera syrgiligari hending** í februar 2021. Tað var, tá ið Símun V. Arge so brádliga andaðist. Símun hevði júst lagt frá sær fyri aldur og var í holt við at rudda av á savninum. Hóast hann skuldi gerast pensionistur, vóru ætlanirnar kortini fleiri. Eitt var at geva út bók um Múrin í Kirkjubø og fornminnini har. Hetta arbeiðið gjørdi hann saman við fleiri rithøvundum úr flestu av grannalondum okkara. Hóast Símun var farin, so valdi savnið at halda á við arbeiðinum í 2021, og eftir ætlan kemur bókin út á heysti 2022 – bæði á enskum og føroyskum.

**Vónandi kann hetta rit** geva eitt gott innlit í týdningarmikla, fjølbroytta og spennandi virksemið á Tjóðsavninum.

**Herleif Hammer**
*stjóri*



*Børn spæla á keiini, samstundis sum tey ansa smærri børnum*

# GERANDISLÍV Á EIÐI 1968

## Á hvítusunnu 22. til 24. mai 2021 skipaði Tjóðsavnið í samstarvi við Eiðis Fornminnisfelag fyri myndaframsýning í Hólmahúsinum á Eiði við heitinum Gerandislív á Eiði

**Sýndar vóru fram** fotomyndir hjá enska fríyrkismyndamanninum Adam Woolfit, sum var í Føroyum og tók myndir fyri National Geographic í 1968 og 1969. Í 2019 gav hann Tjóðsavninum uml. 1400 útvaldar myndir í gávu. Í hesum sambandi skipaði Tjóðsavnið fyri stórari myndaframsýning á ólavsøku 2020 í Finsen í Havn.



*Eldri maður leggur børnunum lag á, hvussu roytast skal*



*Seyður og seyðahald var týðandi partur av gerandislívinum í eini bygd sum Eiði. Her skilja og pakka menn ullina*

Leisturin fyri myndaframsýningina á Eiði var tann sami sum í Havn. Munurin var, at her vóru bert lokalar myndir, tær flestu av Eiði, men eisini vóru nakrar frá Gjógv. Evnið var gerandisdagurin, og myndirnar vístu børn, sum spæla, arbeiði við seyði, útróður o.s.fr. Serliga áhugaverdar vóru myndirnar, har arbeitt verður við seyði, tí tær vísa, hvussu trý ættarlið luttaka í arbeiðinum.

Eiðis Fornminnisfelag tók á seg uppgávuna at hava opið hesar dagarnar og fekk samstundis møguleika at varpa ljós á virksemi sítt á Eiði og at tekna nýggjar limir. Framsýningin var ókeypis, og fólk høvdu møguleika at keypa ella bíleggja sær famsýndu myndirnar.

Framsýningin var sera væl umtókt og væl vitjað, tí útvið 300 vitjandi skrivaðu seg í gestabókina.



*Menn og børn á rættini*



*Framsýningin var hongd upp í snotiligu hølunum í Hólmahúsinum hjá Eiðis Kommunu*





*Luttakarar á fuglatúrinum við Jón Aldará njóta góðveðrið Niðri á vatni á Eiði*

# FUGLATÚRAR Á EIÐI

## Tveir fuglatúrar vóru á Eiði summarið 2021 – ein tann 10. juli og ein tann 20. juli

**Túrarnir vórðu gingnir** frá Eiðis kirkju og fyrst oman á keiina at skoða fjørðin. Síðani gekk leiðin norðureftir gjøgnum bygdina og runt um Niðara vatn. At enda varð koyrt niðan til Loranstøðina at síggja serliga heiðafuglalívið har.

Á fyrra túrinum vóru 6 fólk við. Loftið var annars sett til 15 fólk, men hóast eitt sindur tepru uppmøtingina, so vóru fólkini sera ágrýtin. Sama var galdandi fyri seinna túrin, sum hinvegin var fullmannaður, bæði við ungum og gomlum, kvinnum sum monnum. Báðar ferðir var dýrdarveður, og hugnin var so mikið í hásæti, at túrarnir fóru væl upp um teir ætlaðu tveir tímarnar.

Eingi heilt óvanlig fuglasløg vístu seg hesa tíðina, og tað er ikki so løgið, tí í juli mánaði reiðrast fuglar har, sum teir hoyra heima. Men onkur áhugaverd sløg vóru at síggja, m.a. ein ársgomul terna, sum ikki er búgvin at reiðrast enn, og reiðrandi reyðspógvar uppi við Loranstøðina. Umleið 25 ymisk fuglasløg vóru at síggja, bæði av sjófugli, heiðafugli, smáfugli og antarfugli. Hetta stóra spennið av sløgum er tað, sum ger Eiði so spennandi fuglapláss.



*Spógvi*



*Ternur. Ternan aftast á myndini er ein ársgomul terna, sum ikki er búgvin at reiðrast enn*



*Jan Sørensen greiðir frá í góðveðrinum í Borðoyavík*

# Summartúrur í fjøruni á Borðoyarvík

Tjóðsavnið er farið undir nýtt slag av tiltøkum, eitt av hesum er fjørutúrar. 3. august 2021 skipaði sjódýradeildin fyri túri í fjøruni á Borðoyarvík. Veðrið var til vildar, og umframt tvey fólk av Tjóðsavninum vóru átta onnur fjøruáhugað

**Vit avtalaðu at** møtast fyri endan av Oyrargøtu og gingu síðan har um leiðir og hugdu at øllum teimum ymisku náttúrufyribrygdum, sum staðið hevði at bjóða. Sjóvarmálin við taravøkstri, gággum og kúvingum, kletturin við fjøruhyljum og skónarvøkstri, malargrótið, uppskolað burturkast, dálking og óhumska, fjørutrøll og kongadýr, grátt undir fjørusteini og fjørutongdur vøkstur.

Ikki bara lívfrøðin er áhugaverd. Um ein gevur sær far um tað, so sæst í klettinum eitt heldur løgið jarðfrøðiligt fyribrigdi, ein evnafrøðilig tæring av gróti, sum gevur lendinum heilt serstaka útsjónd.

Í bakkanum nærhendis neystunum síggjast leivdirnar av fyrndargomlum rekatrøum. Hetta eru leivdir av viðarbulum, sum eru fluttir av ísi við mórenutilfari. Hetta eru ikki steinrenningar, men samankroyst viðarsprek, sum tó hava høgan aldur. Kanningar hava víst, at viðurin er meiri enn 30.000 ára gamal. Hetta ber eisini til at síggja hjá tí, sum veit, hvar hann skal hyggja.



*Undir bakkanum við Borðoyarvík*

Túrurin vardi góðar tveir tímar.







*Við Stóravatn á Sandoynni*

# VÆLEYDNAÐUR SKORDÝRATÚRUR

**Ein sera væleydnaður túrur við Stóravatn í Sandoynni 7. juli**

**Janus og Agnes** vóru ferðaleiðarar. Túrurin var lýstur sum ein skordýratúrur, men hugt varð eisini at øðrum, til dømis fuglum, um okkurt áhugavert var at síggja.

Hóast veðrið tóktiskt ivasamt, so gjørdist tað heilt gott. Við á túrinum vóru tveir sera ágrýtnar smádreingir, og teir megnaðu at savna heilt nógv av ymsum. Saman við teimum funnu vit yvir 20 ymisk sløg av ryggleysum dýrum á landi og í vatni. Har vóru støkktekur, vatnkálvar, gullsvartaklukka, várflugur, hagagrasmølur, nógvir reyðmaðkar og ikki minst ein hármaðkur og ein norðurtøðklukka.



*Børnini hugnaðu sær ófort*







# VITJAN Á HVALA-STØÐINI VIÐ ÁIR

Tað kemur meira enn so fyri, at biðið verður um at sleppa at síggja hvalastøðina. Í 2021 var Tórshavnar býarsavn á støðini fyri at leita sær íblástur.

**Býráðið í Sunda** kommunu, sum fylgir væl við og hevur áhuga fyri gongdini á støðini, var saman við fyrisitingini, og býráðslimirnir fingu eina rundsýning. Býráðið hevði nógvar spurningar, og serliga um uppskotið og hugsanina um eitt sjóvinnusavn sunnan fyri hvalastøðina.

Grannin hjá hvalastøðini, Dugni, sum hevur skúla við Áir, var aftur á vitjan við nýggjum næmingum. Dugni hevur vitjað í fleiri ár á rað.

Á Miðnámi í Vestmanna er ein ferðaleiðaraútbúgving. Hesi, sum vóru í útbúgving í 2021, løgdu leiðina á hvalastøðina.

Stjórn og nevnd fyri Norðuratlantsbryggjuna í Keypmannahavn vitjaði eisini. Stjórnar- og nevndarlimirnir hava vakið eyga við, hvat ið fyrifest í Útnorðri og hildu støðina vera forkunnuga. Tað var nógv at tosa um, og onnur støð, sum eru ídnaðararvur, námsvinna í Grønlandi, sildaverksmiðjur og fiskiídnaður í Íslandi, vóru samanborin við vinnuliga hvalaveiði.

Undirhúsið í Sørvági møtti fjølment við kvinnum og monnum og javnstøðu. Limirnir í Undirhúsinum vóru høviskir og sýndu eitt parlamentariskt lyndi. Serligan áhuga høvdu sørvingarnir fyri søguni um hvalastøðina í Selvíkum, nærhendis Sørvági, og vistu nógv um vinnulívssøgu í 20. øld.

Á hvørjum ári hevur hvalastøðin við Áir verið á skrá á Mentanardøgunum hjá Sunda kommunu. Tað vóru fleiri vitjandi á hvalastøðini tann 13. oktober 2021.

Eftirskúlin Rásin í Saltangará, hvørs endamál er at menna sínar næmingarnir og persónligu, sosialu og kensluligu førleikar teirra, vitjaði aftur í 2021 saman við donskum næmingum, sum vóru á námsferð í Føroyum. Rásin hevur verið á hvalastøðini í fleiri ár, og næmingum dámar væl væl at hoyra um arbeiðslívið á støðini, sum einaferð var, og um hval og hvalaveiði.







Ann Sølvia greiður Drotning Margrethu frá um toftirnar



Stórur áhugi var fyri at síggja lutirnar frá útgrevstrinum



# DROTNINGAR-VITJAN Í KVÍVÍK

**Í sambandi við drotningarvitjanina summarið 2021 setti Kvívíkar Kommuna seg í samband við Tjóðsavnið og spurdi, um ein fornfrøðingur kundi greiða frá búsetingini og toftaleivdunum frá víkingatíð niðri á Toft í Kvívík**

**Tað var fyrrverandi** landsantikvarur Sverri Dahl, ið stóð fyri útgrevstrinum í árunum 1941-1957. Tað var gaman í, og tann 17. juli var fornfrøðingurin Ann Sølvia Selmarsdóttir Purkhús í Kvívík og greiddi Margrethu drotning frá fornfrøðiliga útgrevstrinum niðri á Toft.

Áðrenn farið varð at hyggja at endurreistu toftunum, greiddi Ann Sølvia Margrethu drotning frá, hvussu landslagið hevði sæð út í víkingatíð, og hvussu lendið sá út undan útgrevstrinum. Í hesum sambandi bleiv ein mynd víst fram, ið varð tikin umleið 1940.

Umframt at greiða frá búsetingini og at vísa endurreistu toftirnar fram hevði Tjóðsavnið gjørt eina minni framsýning. Her var millum annað at síggja ein skógvur úr miðøld, nakrar vakrar perlur, teir vælkendu leikutræhestarnir og baraldarbond úr víkingatíð.



Útgrevsturin niðri á Toft í Kvívík í 1951



Ann Sølvia við montruna

Vitjanin var væleydnað, og drotningin var hugtikin av toftunum og lutunum. Eftir drotningarvitjanina komu fleiri fólk og hugdu at endurreistu toftunum og lutunum.



Munurin á svínasólju og iglasólju. Svínasólja hevur fylta blómukrúnu







Hvat slag av skøru mann hetta vera?



Vit hava umleið sjey sløg av Bjølluvísu í Føroyum

# Plantutúrar

## Aftur í ár vóru tríggir plantutúrar við Annleyg Patursson

**Tann fyrsti var** í fjølbroytta náttúruumhvørvinum í Hoyvík. Ein annan dag gekk leiðin til Norðskála, har hugt varð eftir plantusløgum í bæði haganum, í áunum og niðri við sjóvarmálan. Seinasti plantutúrurin var við Toftavatn, sum er eitt av fjølbroyttastu náttúruøkjum í Føroyum.

Plantutúrarnir vera aftur í 2022, og tá kunnu tey luttakandi gleða seg til at síggja plantusløg á øðrum sermerktum náttúruøkjum í Føroyum.











Niðri á Bakkanum varð greitt frá burturmáan, og hvussu landslagið háttar seg

# TÚRAR NIÐRI Á BAKKA Á VELBASTAÐ

Sum partur av tiltakinum hjá Tjóðsavninum "Summartúrar" stílaði Fornfrøðideildin fyri rundvísingum niðri á Bakka á Velbastað

**Endamálið við túrunum** var at greiða frá fornfrøðiligum kanningum av útgrevstrinum. Harumframt at vísa á arbeiðslag í arbeiðinum hjá fornfrøðingunum. Ein týðandi partur av túrinum var eisini at greiða frá lendisbroytingum, og hvussu fornfrøðingar arbeiða við hesum. Íalt vóru tað tríggir túrar, 7., 14. og 21. juli. Tað var stór undirtøka, og talið á vitjandi var um 50 fólk.



Helgi D. Michelsen greiðir frá útgrevstrinum niðri á Bakka á Velbastað



Gestirnir høvdu eisini møguleika at síggja, hvussu fornfrøðingar arbeiða á einum útgrevstri

# TÚRAR Í HOYVÍKSGARÐI



Summarveður á Hoyvíksgarði

**Tríggir túrar vórðu** gjørdir í Hoyvíksgarði summarið 2021. Túrarnir byrjaðu uppi við kjøthjallin. Har varð nortið við geilina og bøgarðarnar og eisini við Mataránna við Løriftsfossi og Bleikjustykkinum yvirav. Við gróthúsið var aftur steðgað á, og høvi var at fara inn at hyggja. Inni í gróthúsinum eru nøkur amboð, sum hava verið brúkt til at skera torv við, og har er eisini eitt sindur av torvi.

Uttan fyri eplahúsið varð greitt eitt sindur frá, tá ið eplini komu til Føroyar, og at føroyingum dámdi tey lítið í fyrstuni.

Í túninum framman fyri sethúsini fingu gestirnir eitt sindur um søguna hjá Hoyvíksgarði frá miðøld og frameftir. Tað, at garðurin fór í tvíningar av klandri um viðarvøkstur í Hoydølum, hildu tey flestu vera rættiliga stuttligt.

Farið varð eisini inn í úthúsini rundan um túnið. Fjósið, hoyggjhúsið, tarvafjósið og svalahúsið.

Aftaná gekk leiðin inn í sethúsini og steðgað varð eina løtu í roykstovuni. Har varð greitt frá húsunum, nær tey vóru bygd, útbygd, umvæld og so framvegis. So varð farið ígjøgnum húsini, so at hyggjast kundi inn í øll tey ymsu rúmini.



Tey hyggja at skordýrum undir sjóneykuni. Ein afturvendandi og vælumtóktur táttur á savnsfagnaðinum



So er at klára breytina, uttan at nøkur klokka ringir

# SAVNSFAGNAÐURIN 2021

Nýggjasta fasta framsýningin á Tjóðsavninum, ið læt upp í summar, eitur *Ull er Føroya gull*. Í tí sambandi varð gjørt av, at ársins savnsfagnaður eisini skuldi snúgva seg um ull og seyð

Tórarinn á Rípuni, savnslærari

**Eins og í** fjør gjørdi koronustøðan í landinum, at avmarkingar máttu vera. Men í mun til tey 200, sum í fjør kundu vera um dagin, so var í ár mett, at 400 kundu vera hvønn dag. 200 frá klokkan 11 til 13 og onnur 200 frá klokkan 14 til 16. Tilmelding var eisini aftur í ár. Sum heild riggaði tað sera væl, og tilsamans vóru 1455 vitjandi.

Í fjør vóru tað umleið 200 hvønn dag, men í ár líktust tølini undanfarnum árum. Tey vuksu hvønn dag. Mánadagurin er vanliga lakasti dagurin, og fríggjadagurin tann besti. Soleiðis var eisini í ár. 175 vitjandi vóru fyrsta dagin og 415 síðsta dagin.

Annars var skráin ikki ólík undanfarnum árum. Fyrraparturin var meiri ætlaður yngru børnunum og seinnaparturin teimum eldru. Tey yngru børnini fingu eina søgu frá Heiðu. Í ár hevði Heiða verið



Ein av kreativu verkstovunum. Her gera tey pompon

á fjalli, og har hitti hon ein hulduseyð. Hon hitti eisini ein fittan seyðamann, ið fortaldi henni mangt og hvat um ullarroyting og annað.

Seinnapartin vóru granskarasøgur á skránni. Noomi í Dali greiddi frá klæðunum í nýggju framsýningini, sum eru gjørd eftir klæðum úr víkingatíðini. Jens Ivan í Gerðinum greiddi frá, hvat ið seyður etur, og hvat hann ikki etur. Ann Sølvia Selmarsdóttir Purkhús greiddi frá, hvussu vit síggja seyðahaldið í fornfrøðini. Í tí sambandi vórðu lutir vístir fram, og varð hetta væl umtókt. Granskarasøgurnar vóru væl vitjaðar, og børnini spurdu ófært.

Beint eftir granskarasøguna var eitt Kahoot-spæl á skránni. Vinnarin hvønn dagin fekk eitt gávukort úr savnsbúðini.

Annars var rokan í fjørðini um alt savnið. Har var nógv ymiskt at royna og loysa. Til bar at smoyggja seg ígjøgnum eina snúðiniborg. Har var noðabovling, noðakast og eitt vendispæl við seyðalitum.

Vildi ein royna seg sum spunafólk, so bar tað eisini til. Ein lítil roykstova var sett upp, og har bar til at royna at karða og spinna á rokki.

Ein verkstova var, har sum lyklaringar, duskar og annað kundi gerast úr tógvi.

Í einum neysti stóð eitt sjónvarp. Har vóru tveir filmar á skránni. Annar var úr Lítlu Dímun í 1988, tá ið hvalbingar fóru eftir seyði. Hin var við miðvingum eftir veðrum.

Øll børnini fingu hvør sítt uppgávuhefti, eitt CapriSonne og eitt Kit Kat.

Nakrar uppgávur kundu bert loysast við at fara runt á savninum at leita eftir ymiskum, sum skuldi brúkast til uppgávurnar. Aðrar uppgávur kundu loysast uttan, tær bar til at loysa heima.

Savnsfagnaðurin var sum heild sera væleydnaður. Afturmeldingarnar hava verið sera góðar.



Ull er Føroya gull



Ann Sølvia S. Purkhús greiðir frá um seyðir í víkingatíð

## FERÐA-LEIÐARA-SKEIÐ 2021

**Í sambandi við** útbúgving í ferðaleiðaraskeiði í ferðavinnuni góvu fólk frá Tjóðsavninum komandi ferðaleiðarum frálæru um fornfrøði, føroysk fornminni, búsetingarsøgu, byggihættir og siðaarv.

Endamálið við undirvísingini er, at ferðaleiðarar hava grundleggjandi ástøðiliga vitan um føroyska fornfrøði og dagførda vitan um fornfrøðina í Føroyum og arbeiðið hjá Tjóðsavninum viðvíkjandi fornfrøði.

Saman við undirvísingini varð skipað fyri rundvísing av framsýningini í Brekkutúni, á Hoyvíksgarði og í Kirkjubømúrinum fyri at miðað ímóti, at tey lesandi fingu holla vitan um fornfrøði í Føroyum.

Ann Sølvia Selmarsdóttir Purkhús, fornfrøðingur, stóð fyri undirvísingini í fornfrøði í Føroyum og vitjanini í Kirkjubø, og Tórarinn N. á Rípuni vísti runt í framsýningini hjá Tjóðsavninum í Brekkutúni og á Hoyvíksgarði.

Tað er Maud Poulsen, ið fyriskipar skeiðið í ferðavinnuni frá Miðnámi í Vestmanna, og hetta skeiðið er eitt sera spennandi og viðkomandi undirvísingartiltak.



Fjørukúvingar í ymiskum litum



Jan Sørensen greiðir frá um fliðu, og hvussu tær liva



Krossfiskur (Asteria rubens), eitt sera litfagurt dýr

# FJØRUTÚRASKEIÐ FYRI NÁMSFRØÐINGAR OG LÆRARAR

23. og 24. august í 2021 varð fyrstu ferð skipað fyri skeiði í fjørulívfrøði fyri námsfrøðingar og lærarar. Tíggju meldaðu til, og skeiðið varð hildið í fjøruni við Kaldbaksfjørð

**Skeiðið var í** mestan mun praktiskt. Gingið varð niðri í fjøruni, har skeiðsluttakararnir sjálvir funnu ymiskt av áhuga, sum skeiðsleiðarin síðan greiddi frá.

Skeiðsleisturin var at gera eina myndafrásøgn av øllum tí, sum varð funnið, og síðan at seta tekstir til. Øll hava snildfon, og tað er lætt at taka myndir av tí, sum er at síggja.

Tiltakið hepnaðist so mikið væl, at avgjørt er longu at skipa fyri einum nýggjum skeiði nakað eftir ólavsøku í 2022.



Roynt verður eftir krabbum. Ein laksur var nýttur sum agn



Taskukrabbi, langskel og krossfiskur





Gunnar Restorff hevur framløgu

# Vistarskeið í føroyskum dansi við Gjógv

## 25.-26. november skipaðu Nám og Sláið Ring fyri einum vistarskeiði fyri lærarar á Gjáargarði við Gjógv. Skeiðið var fingið í lag eftir áheitan frá Sláið Ring og Fólkalívsdeildini sum liður í arbeiðinum við UNESCO-sáttmálanum um verju av siðaarvi

**Eldsálir fyri føroyska** dansin í fólkaskúlum úr øllum Føroyum vóru við á skeiðinum. Skeiðið hevði til endamáls at siga frá góðum royndum viðvíkjandi føroyskum dansi og kvæðum í skúlahøpi og at savna hesar royndir til tilfar, sum Nám fer at laga til skúlabrúks. Vónin er, at tilfarið fer at geva íblástur og kveikja áhugan millum allar lærarar á skúlunum kring landið.

Jónleif Johannesen var skeiðshaldari, og Gunnar Restorff, formaður í Sláið Ring, var eisini til staðar, umframt aðrir fyrilestrarhaldarar. Savnvørður Kristina Djurhuus Christiansen fortaldi stutt um arbeiðið við UNESCO-sáttmálanum og um tann týdningarmikla leiklutin, sum fólkaskúlin og lærararnir hava at fremja og lata føroyska dansin til komandi ættarlið.



Kristina D. Christiansen greiðir frá arbeiðinum við livandi mentan á Tjóðsavninum



# SKRÁSETING AV ULL

Hóast ull ikki longur er Føroya gull, so er ullin enn ein partur av livandi mentanini í Føroyum

**Búnaðarstovan hevur havt** árliga ullarmóttøku síðan 2016, har umleið triðingur av ullini í Føroyum verður savnaður inn. Har eru bólkar og einstaklingar, sum taka ullina upp eftir várgonguna og virka ullina og hittast til "spunaløtur", har tey nappa, karða og spinna ull saman. Á kvøldskúlanum, eitt nú á Eiði, hava skeið verið í virking av ull – at vaska, nappa, karða og spinna ullina. Tað er 92 ára gamla Annebin Ellingsgaard, sum hevur undirvíst í ullarvirking saman við ommudóttrini. Harumframt bera sniðgevar og listafólk føroyska ull- og bindingarsiðin víðari.

Gjøgnum 2021 hevur fólkalívsdeildin arbeitt við at kortleggja ullvirking og "tær góðu søgurnar" um ull. Hetta arbeiðið er enn í gongd.







# VIRKING AV FØROYSKUM KLÆÐUM

Seinnu árini er áhugin fyri føroyskum klæðum vaksin, og fólkalívsdeildin hevur arbeitt við at skráseta vaksandi áhugan, sum sæst aftur í teimum mongu skeiðunum, sum verða útboðin á kvøldskúlunum kring landið og Húsarhaldsskúla Føroya

**Bæði ung og** gomul melda seg til, og bíðilistarnir at sleppa framat eru langir. Skeið verða útboðin í millum annað silvursmíð, brodering og veving, har fólk seta sín persónliga dám á klæðini, sum tey virka. Hetta er við til at gera føroysku klæðini livandi og at halda lív í handverkinum at virka ymsu partarnar av føroysku klæðunum.











*Heimi í Húsi*

# ØLL SKULU FÁA GLEÐI AV KOLTRI

Óluva Zachariasen

Tjóðsavnið hevur stórar ætlanir fyri Koltur. Oyggin skal vera savn og granskingarmiðstøð, sum bæði føroyingar og ferðafólk skulu fáa gleði av. Ætlanirnar hava vakt ans úti í heimi, og fleiri grunnar vilja sleppa at stuðla


*Lonin endurbygd í nýtulkaðum sniði*


*Eiðisdammur í 1950'árunum. Í og við dammin vóru skip, kaiir, vitar, hús o.a.*

**Tað eru slóðbrótandi** visjónir, sum Tjóðsavnið hevur fyri Koltur. Visjónir, sum bæði seta oynna á heimskortið innan gransking og ferðavinnu og á tímatalvuna hjá øllum skúlanæmingum í Føroyum.

Tjóðsavnið hevur nevniliga gjørt eina heildarætlan fyri Koltur, sum fer at geva føroyingum og útlendingum atgongd til serstakan mentanararv og eina náttúru, sum hon sá út, áðrenn menniskju ávirkaðu hana. Ætlanin er, at umleið 10.000 fólk árliga skulu hava møguleika at vitja Koltur og uppliva náttúruna og framsýningarnar, ið oyggin fer at bjóða.

## BÝTT UPP Í TVEY

**Sambært heildarætlanini hjá** Tjóðsavninum verður oyggin býtt upp í tvey – ein mentanarsøguligan part og ein náttúrufrøðiligan part. Harumframt verður ein vitjanardepil bygdur, sum skal hýsa eitt nú undirvísing, kanningarstovum og skúlaflokkum, sigur Herleif Hammer, stjóri á Tjóðsavninum.

Mentanarsøguligi parturin verður í syðra partinum av oynni. Her kunnu fólk uppliva teir báðar býlingarnar, Heima í Húsi og Norðri í Gerði, og eitt livandi savn við m.a. kornvelting, hoygging upp á gamlan máta, seyði og øðrum húsdjórum. Eisini verður bátaverkstaður og framsýning, tí tað var jú her, at Niclas í Koltri byrjaði sína yrkisleið sum bátasmiður.

Í norðaru helvt verður náttúrufrøðiligi parturin. Ætlanin er her at fáa náttúruna í sama stand, sum áðrenn menniskju fluttu í Koltur, men áðrenn størri broytingar verða gjørdar, verður náttúran lýst. Í fjør byrjaði ein stór verkætlan at skráseta alt plantu- og djóralív í oynni. Talan er um eina trý ára verkætlan, sum Aage V. Jensens-grunnar hava stuðlað. Longu nú eru fleiri áhugaverd úrslit komin, m.a. er ein ørgrynna av sløgum skrásett fyri Koltur fyri fyrstu ferð, og okkurt enntá fyrstu ferð fyri Føroyar.

## FÁA UPPRUNAVØKSTURIN FRAM

**Tá ið skrásetingin** er liðug, er ætlanin at taka seyðin av í norðara parti av oynni. Seyðurin kom nevniliga við menniskjunum til Føroya – eisini út í Koltur. Og seyðurin hevur ávirkað náttúruna nógv allastaðni, hann er sloppin framat. Nógvar plantur eru minkaðar ella heilt horvnar, og í staðin hava vit fingið stór øki við grasi og mosa. Nú skal upprunavøksturin endurskapast í Koltri.

– Vit vita, hvørjar plantur hava verið aðrastaðni í Føroyum, áðrenn seyðurin kom. Kanningar av forntíðargróðri vísa eitt sera fjølbroytt landslag við m.a. lyngheiðum, baraldi, píli og hjálpirótum, sigur Kolbrún í Haraldsstovu, savnsvørður á Plantudeildini hjá Tjóðsavninum.

Tá ið seyðurin er burtur, kemur annar gróður spakuliga fram, og upprunaligi vøksturin tekur yvir. Avbjóðingin er, at broytingin tekur fleiri ættarlið. Fyri at nútíðarmenniskju skulu fáa eina hóming av, hvussu eitt slíkt landslag sær út, er ætlanin at planta upprunavøkstur summastaðni fyri at seta ferð á. Í øðrum økjum verður onki plantað, tí har skal náttúran ráða sær sjálvari.

Enn er ikki endaliga avrátt, um allur seyðurin norðanfyri verður tikin av, ella um seyður verður í onkrum parti, sigur Janus Hansen, savnsvørður á Landdjóradeildini hjá Tjóðsavninum, sum er verkætlanarleiðari fyri náttúrupartin í Koltri.

– Vit umrøða fleiri møguleikar og hava ikki tikið endaliga støðu enn. Til dømis ber til at hava seyð í einum øki, ongan seyð í einum øðrum og so eitt lítið sindur av seyði í onkrum øki, sigur Janus Hansen.

Hann leggur dent á, at tað er ikki eitt endamál í sær sjálvum at taka seyðin av. Men skulu vit hava møguleika at síggja, hvussu upprunanáttúran sá út, áðrenn seyðurin kom, er neyðugt at hava eitt øki uttan seyð.

## STÓRUR ÁHUGI FRÁ GRANSKARUM

**Nógvir útlendskir granskarar** hava víst áhuga fyri Koltursætlanini, og arbeitt verður við, at Koltur gerst altjóða granskingarstøð í INTERACT-samstarvinum. Hetta gevur góðar møguleikar fyri útlendskar granskarar og eisini at fáa fígging.

Tað serliga við Koltri er, at menniskjaskapta ávirkanin hevur verið so lítil, sigur Janus Hansen.

Her eru ongi gøtuljós, og tað ger, at fuglur sum t.d. drunnhvíti trívist væl millum húsini og enntá undir gólvinum. Í Koltri eru hvørki mús, rotta ella ketta, sum kunnu ávirka fuglalívið. Heldur ikki morsniglar og flatmaðkar, sum annars finnast í flestu øðrum oyggjum. Hetta ger tað lættari at føra oynna aftur í upprunaliga støðu, sigur Janus Hansen.

Áhugavert er eisini, at í Koltri eru lutfalsliga nógvar plantur í mun til støddina á oynni. Samstundis eru færri plantur av fremmandum uppruna sammett við aðrar oyggjar.

Náttúrugranskingin í Koltri fer at geva okkum nógv størri vitan um náttúruna í Føroyum sum heild og fer harumframt at gagna altjóða gransking, tí tað fer at bera til at samanbera kanningar millum lond og eisini gjøgnum long tíðarskeið, heldur Janus Hansen.

## FRÁ LANDBÚNAÐI TIL SAVN

**Koltur er gomul** landbúnaðaroyggj og hevur verið búsett síðan landnámið. Kolevni-14-kanningar av byggkorni í býlinginum Heima í Húsi vísa, at fólk hevur verið í Koltri í øllum førum síðan á leið ár 850-900. Sostatt hava fólk búleikast í Koltri í yvir túsund ár og hava livað av tí, sum jørðin og sjógvurin góvu.

Hildið verður, at mentanarlandslagið við báðum býlingunum, korneigalendi og bøi stavar frá miðskeiðis í 1500-talinum.

Heima í Húsi er tann eldri av býlingunum í oynni. Fyri nøkrum árum síðan varð hann umvældur við stuðli úr A. P. Møller-grunninum og førdur aftur til 1870. Sambært Koltursætlanini skal hesin býlingurin vísa søguna um gamla landbúnaðarsamfelagið frá uml. 1600 og til seint í 1800-talinum.

Teigalendið í Koltri er størsta samanhangandi korneigalendi í Føroyum. Bjørn Patursson, sum var festari frá 1994 og seinni fyristøðumaður í oynni, hevur velt korn fyri at varðveita korneigarnar. Hann hevur brúkt føroysku kornsløgini, Tampar og Sigur, sum eru 6-raðað byggkorn, og kornveltingin verður ein partur av livandi savninum í Koltri í framtíðini.



*Lívfrøðilesandi saman við Bjørn Patursson, oyggjarvørði, tøma smákyktafellur*

## NÝGGJARI NORÐANFYRI

**Norðari býlingurin eitur** Norðri í Gerði. Fyri um hundrað árum síðan fevndi býlingurin um fýra hús og eitt hoyggjhús. Í dag stendur bert eitt av hesum húsunum uppi. Tað eru húsini, sum fyristøðumaðurin í oynni býr í. Upprunaliga vórðu hesi húsini bygd í 1898 Heima í Húsi, men bert tvey ár seinni vórðu tey flutt norður.

Húsini eru áhugaverd, tí tey vóru sera framkomin, tá ið tey vórðu bygd. Tey vóru klødd við rukkublikki, sum var nýtt tá, og í 1920 vórðu tey útbygd, sigur Høgni T. Hansen, arkitektur hjá SNA, sum tekur sær av arkitektauppgávunum í sambandi við Koltursætlanina.

– Húsini og býlingurin eru týðiliga merkt av, at grundarlagið undir føroyska samfelagnum broytist hesa tíðina. At vit fara frá landbúnaðarsamfelagnum og yvir í tað meira industrialiseraða samfelagið, sigur Høgni T. Hansen.

Ætlanin er, at hesi húsini skulu førast aftur til eini fiskimannahús frá uml. 1920-1930'unum.

Býlingurin Norðri í Gerði fer at siga søguna um broytingina frá landbúnaðarsamfelagi til fiskimannasamfelag. Hini húsini í býlinginum itu Innar í Búð, Bergstokk og Uttar í Stovu og vóru samanbygd. Einasta prógvið um, hvussu tey sóu út, er ein tekning, sum Niclas í Koltri gjørdi sum smádrongur í 1920. Tað var her, Niclas í Koltri seinni hevði bátasmiðju.

Hesi trý húsini verða ikki bygd upp aftur, men ein lon verður bygd á grundirnar, sum fer at hava somu stødd og umhvarv sum húsini. Her verður bátaverkstaður, framsýningar og íbúðir, sum skulu brúkast til granskarar, listafólk og onnur vitjandi. Á framsýningini verður m.a. høvi at síggja amboðini hjá Niclasi í Koltri og forvitnisligu ordrabókina, har allir bátarnir eru uppskrivaðir.

Ein gøta verður gjørd niðan á Eiðið, har fólk kunnu síggja dammin, sum gamli Niclas í Koltri gjørdi til abbasynirnar, Niclas og Christian, at hava modellskip í. Sonur gamla Niclas - bátabyggjarin Niclas í Koltri - gjørdi eisini fleiri av modellskipunum, sum vóru gjørd eftir samtíðar skipum og deksbátum. Ætlanin er at endurskapa hylin við kaium, molum, vitum og modellskipum. Eisini verða gøtur út í náttúruna og kring um í býlingunum, soleiðis at fólk sleppa runt at uppliva oynna undir skipaðum viðurskiftum.

## SKÚLANÆMINGAR Á SETURSSKÚLA

**Nakað oman fyri** bygdina, Uppi undir Heygum, verður bygdur ein vitjanardepil. Her verður rannsóknarstova, undirvísingarhølir, køkur og hølir til skúlaflokkar at gista. Depilin liggur soleiðis í lendinum, at hann ikki órógvar heildarmyndina í bygdini.

Júst undirvísing og miðling av mentan og náttúru er av stórum týdningi í Koltursætlanini. Tjóðsavnið ætlar, at allir 7. flokkar skulu sleppa út í Koltur á setursskúla at læra um náttúru og menningina frá gamla landbúnaðarsamfelagnum. Hetta er týdningarmikil lærdómur, heldur Herleif Hammer, stjóri á Tjóðsavninum.



*Hvíti sandurin og býlingurin Norðri í Gerði*




## ÁTØK Í KOLTRI

1 "Lonin", ið var ein rekkja av samanbygdum húsum *Norðri í Gerði*, skal byggjast upp aftur. Bygningurin skal hýsa einari framsýning um bátasmíð, bátaverkstaði, fornfrøðiligari framsýning, sali og einari lítlari granskaraíbúð.

2 Neystið við bátadráttin skal gerast til bíðirúm til ferðandi. Eisini skal neystið hýsa einari fastari framsýning um Koltur.

3 Uttan verður embætismannahúsið ført aftur til uml. 1940. Innandura verða tveir embætisbústaðir innrættaðir.

4 Súrhoyggjabrunnarnir verða gjørdir til ávikavist vesi og bilhús.

5 Bátadrátturin verður afturgjørdur. Á dráttinum verður gjørdur elevator til rørslutarnað. Atkomumøguleikarnir við lendingina verða betraðir.

6 Dammurin *á Eiði* verður afturgjørdur soleiðis, sum hann sá út í 1950-árunum, við kaium, húsum, molum, vitum og modellskipum.

7 Vitjanardepil og granskingarstøð skal byggjast norðan fyri *Norðri í Gerði*. Her skulu verða setursskúlar, skeið, móttøkur, kafé og matstova. Her verða eisini verkstovur, goymsla, verkstaður og lítil bústaður til starvsfólk.

8 Gøtur skulu gerast bæði í mentanarøkinum og í náttúruøkinum, so at vitjandi trygt kunnu uppliva oynna, uttan at náttúra ella mentanarumhvørvi verða skalað.

9 Mentanarlandsløg so sum garðløg, ból, veitir og kornteigar skulu haldast. Kornteigarnir kunnu bara varðveitast í sambandi við siðbundna korndyrking. Bert føroysk kornsløg skulu nýtast. Ætlanin er sostatt eisini ein liður í arbeiðinum at varðveita føroysku kornsløgini.

10 Seyðurin verður tikin av ella partvíst tikin av náttúruøkinum. Norðasti parturin av Koltri fær frið og skal eygleiðast.

11 Størri økir *í Líðini* verða plantað við upprunavøkstri, m.a. ymiskum føroyskum pílasløgum.

12 Ein pallur og gøta verða bygd inn í bergið vestanfyri, so vitjandi trygt kunnu uppliva bjargalendi og koma tætt at fuglinum har.

13 Gomlu úthúsini, laðað úr gróti, skulu varðveitast og nøkur byggjast upp aftur. Í húsunum og húsaveggjunum eigur drunnhvíti í dag. Her er ein serliga góður møguleiki at eygleiða og granska hesar fuglar.

14 *Heimi í Húsi* verður gjørt til útisavn.

15 Dupulthegn skal setast upp, sum skilur náttúrupartin frá mentanarpartinum.

16 Tyrlupallurin skal flytast frá *Heimi í Húsi* niðan á eitt stað oman fyri *Norðri í Gerði*.

17 Afturat eini veðurstøð skal onnur framkomin útgerð setast upp ymsastaðni í oynni. Útgerðin skal eygleiða veðurlagið í oynni.

18 Á føstum støðum ymsastaðni í oynni skulu regluliga savnast inn skordýr, vøksturin skrásetast og fuglarnir teljast.



*Útsýni suðureftir úr vindeyganum í ætlaða vitjanardeplinum*



*Mynd frá seinnu helvt av 1940'árunum. Kornteigarnir í Koltri eru størsta samanhangandi teigalendi í Føroyum*

– Tað er altíð gott fyri eitt fólk at vita, hvaðani tað er, og hvussu tey lívbjargaðu sær fyrr. Hetta er ein partur av okkara samleika og gevur gróðrarfesti, sigur hann.

Tá ið fólkatalið var mest, búðu 43 fólk í Koltri. Hetta var í 1870. Fram móti seinasta aldarskifti minkaði fólkatalið burtur í onki, og 1. januar 1994 gjørdist Bjørn Patursson festari í oynni. Í 2013 bleiv Koltur flutt úr festiskipanini hjá landinum og inn undir Tjóðsavnið við tí endamáli, at ein serlig antikvarisk skipan skuldi gerast fyri oynna. Tá tók Koltur so at siga fyrsta stigið frá at vera ein landbúnaðaroyggj til at vera savnsoyggj.

Bjørn Patursson er spentur um ætlanirnar í Koltri, serliga nú tann meira livandi savnsparturin er komin við, og hann heldur tað vera gott at fáa ferðafólk og skúlanæmingar í oynna.

– Eg taki fult undir við at varðveita mentanararvin frá gamla bóndasamfelagnum. Tað er gott at geva ungdóminum møguleika at royna og síggja hetta – og ikki bara lesa um tað. Í Koltri kunnu tey eisini njóta náttúruna, fjøruna, sandin og fara á seiðaberg, sigur Bjørn Patursson.

Hann viðgongur, at honum dámdi ikki so væl, tá ið tað eitt tíðarskeið varð tosað um at friða oynna heilt fyri fólk og fæ. Hann fegnaðist, tá ið ætlanirnar blivu broyttar til at fevna um mentanarlandslagið og at skapa eitt livandi savn við seyði og øðrum húsdjórum, kornvelting o.ø.

## FÍGGING MÁ KOMA ÚR FØROYUM

**At gera Koltur** til savnsoyggj kostar ikki lítið, tí nógv skal umvælast, byggjast og fyrireikast. Kostnaðarmetingin sigur á leið 65 mió. krónur.

Útlendskir grunnar hava stóran áhuga fyri verkætlanini og hava bjóðað sær at fíggja hana. Tó seta teir sum treyt, at ein partur av fíggingini – 15-20% – kemur frá føroyskum myndugleikum. Hetta er trygd fyri, at myndugleikarnir eru sinnaðir at føra ætlanina víðari, og at hon ikki dettur niðurfyri.

Herleif Hammer vónar, at land og kommunur eru sinnað at átaka sær hendan lítla partin av fíggingini, soleiðis at Koltursætlanin gerst veruleiki. Uttan vælvild frá politikarunum er ógjørligt at fremja ætlanina, hóast grunnarnir sera fegnir vilja stuðla.

Arbeitt verður við at fáa ferðasamband út í oynna, antin við Strandferðsluni ella á privatum grundarlagi. Gjørt verður nógv burturúr at skipa umstøðurnar soleiðis, at oyggin kann taka ímóti gestunum um nøkur fá ár. Inntøkurnar frá teimum vitjandi skulu fíggja ein part av at reka virksemið í oynni. Tað verður ókeypis at fara í land, men skulu fólk vitja framsýningarnar, gjalda tey fyri tað.

Koltur skal vera ein oyggj, har allir føroyingar kenna seg vælkomnar.

– Tað er umráðandi, at vanligi føroyingurin fær gleði av oynni. At hetta verður eitt stað, sum føroyingum dámar væl, og sum teir fara at vitja aftur og aftur. Tjóðsavnið hevur fingið oynna, og vit skylda føroyingum at geva teimum hana aftur, sigur Herleif Hammer, stjóri á Tjóðsavninum.



*Bjørn Paturrson í akrinum*



*Niðri í Húsi ein góðan kavadag*



# SEYÐA-HALDIÐ Í KOLTRI








Veðurlomb um heystið

Í Koltri eru fýra seyðafylgi. Íalt á leið 160 áseyðir. Hagin hevur seinastu mongu árini verið býttur sundur, norðuri í haga og fyri heiman. Fylgini eru Líðarseyðurin, sum er frá Líðini og vestur í Kvøldaskorð. Rókaseyðurin, sum er norðari partur av Líðini og inn í røkurnar fyri norðan. Síðani er ovast oyggjaseyður og norðanseyðurin norðuri í Høvdarhaga

Bjørn Patursson, oyggjarvørður

**Í haganum eru** sjálvandi ymisk fyribrigdi frá hesum aldagamla húsdjórahaldi, sum føroyska seyðahaldið er. Til dømis róku teir gomlu ikki altíð allan seyðin heim, men høvdu tøkur, summarrættir og tippi kring í haganum og oman ímóti strondini. Norðanseyðurin varð eitt nú rikin í summarrættina í Keksagili og ullin síðani borin ella førd heim.

## SEYÐURIN Í KOLTRI ER SJÁLVBJARGIN

**Í Koltri er** einki seyðhús. Ból eru kring um í oynni, eins og tað liggur væl fyri hjá seyði at rása kring alla oynna undan veðri og vindi. Til dømis ber til hjá norðanseyðinum at koma sær Aftur Undir Oyggj, sum er rás fyri vestan úr Høvdarhaga inn í skorina fyri vestan. Eisini ferðast norðanseyðurin heim í røkurnar á norðaru síðuni, eitt nú heim í Leirrók. Bæði fyri norðan og fyri vestan eru stórir loftskútar í røkum og skorum, sum seyðinum dámar væl at kroka og bólast í, alt eftir ættini og veðrinum.


Kjøthjallurin Niðri í Hjalli

## IKKI VANDALEYST

**Men tað kann** vera ein fella, um illa vil til. Tað er komið fyri, at norðanseyður, ið er farin Aftur Undir Oyggj fyri vestan, er komin illa fyri av grovum vátakava og skalvalopi. Vit hava verið vitni til at finna sjey deyðseyðir í skalvalopi í Hælskorum fyri vestan.


Fjallmenn hvíla við norðara Leirrókarmunna


Gamla summarrættin norðuri í Keksagili


Fjallgonga í Koltri

## EINKI SEYÐHÚS

**Seyðurin í Koltri** hevur ongantíð havt seyðhús og hevur ongantíð, sum vit vita um, fingið føður framíhjá. Hann hevur klárað seg sjálvan bæði vetur, í lembing og um summarið. Tó so, síðani vaksinur og fyribyrgjandi heilivágur er komin, hevur seyðurin fingið viðgerð móti smittandi sjúkum og fyribyrgjandi móti sníkum, tá ið tað er neyðugt. Síðani 1997 hevur seyðurin ikki havt førilús ella verið viðgjørdur ímóti førilús. Síðani tá hevur oyggjarvørðurin lovað fjallmanni, sum finnur livandi førilús á seyði í Koltri, eina hálva fløsku av brennivíni.

## VISTFRØÐILIGA GÓÐKENNING

**Í 1998 søkti** Koltur íslendsku góðkenningarstovuna TÚN um vistfrøðiliga góðkenning. TÚN er altjóða góðkendur stovnur, sum bjóðar virkjum og stovnum góðkenning. Endaliga góðkenningin kom í gildi í 2004 og hevur á hvørjum ári síðani tá verið endurnýggjað. Vistfrøðilig góðkenning setur krøv til seyðahaldið eins og umstøðurnar í bø og haga. Men sum seyðahaldið og umstøðurnar í Koltri eru, at øll oyggin er undirløgd góðkenningina, er tað tó ikki so møtimikið at umsita, sum er.


Lomb í áseyðaroyting

| KOLTURS HAGI, HAGTØL 2015-2021 | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Ár: | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | *Miðal* |
| **SKURÐUR** | | | | | | | | |
| Veðurlomb, tikin | 59 | 65 | 60 | 75 | 72 | 56 | 57 | *63* |
| Gimburlomb, tikin | 57 | 57 | 59 | 68 | 42 | 51 | 59 | *56* |
| ***Flett lomb um heystið, íalt*** | ***116*** | ***122*** | ***119*** | ***143*** | ***114*** | ***107*** | ***116*** | *120* |
| ***Flett lomb pr. áseyð*** | ***0,7*** | ***0,8*** | ***0,7*** | ***0,9*** | ***0,7*** | ***0,7*** | ***0,7*** | *0,75* |
| **VIÐSETA** | | | | | | | | |
| Sleppingarlomb | 24 | 28 | 21 | 24 | 28 | 27 | 23 | *25* |
| Brundlomb | 8 | 6 | 7 | 6 | 7 | 6 | 7 | *7* |
| **Livandi lomb út** | **32** | **34** | **28** | **30** | **35** | **33** | **30** | *32* |
| | | | | | | | | |
| **Lomb íalt** | **148** | **156** | **147** | **173** | **149** | **140** | **146** | ***151*** |
| Áseyður í mesta lagi | 160 | 160 | 160 | 160 | 160 | 160 | 160 | *160* |
| **Lomb um heystið pr. áseyð** | **0,9** | **1,0** | **0,9** | **1,1** | **0,9** | **0,9** | **0,9** | ***0,9*** |
| | | | | | | | | |
| Veðurlomb, kg. íalt | 1.045 | 1.161 | 1.203 | 1.350 | 1.374 | 982 | 1.070 | *1169* |
| Gimburlomb, kg. íalt | 874 | 954 | 980 | 1.118 | 677 | 878 | 1.077 | *937* |
| **Lambskrov, kg íalt** | **1.919** | **2.115** | **2.183** | **2.468** | **2.051** | **1.860** | **2.146** | ***2106*** |
| Flett lambskjøt miðalvekt kg. | 17 | 17 | 18 | 17 | 18 | 17 | **19** | *18* |
| Flett lambskjøt kg/pr. áseyð | 12 | 13 | 14 | **15** | 13 | 12 | 13 | *13* |

*Koltursshagi hagtøl 2015 til og við 2021*

## VÁRFJALL, ÁSEYÐA-ROYTING OG SKURÐ/KLIPPING

**Seyðurin verður rikin** tríggjar ferðir um árið, um várið til eftirlit og viðgerð, um summarið í áseyðaroyting og um heystið, í oktober, skurð og klipping í einum.

## RIDLUSKRIÐI IKKI STAÐFESTUR

**Seyðurin í Koltri** er undir eftirliti av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni í sambandi við ridluskriða. Síðani kanningarnar byrjaðu í 2018, hevur úrslitið verið, at ridluskriði kann ikki ávísast í seyðinum í Koltri. Flett verður í oynni, og alt er selt til fastan kundaskara. Hendinga ferð verður brundseyður seldur sum aliseyður.



*Fjallmenn hvíla við norðara Leirrókarmunna*

Tveir veðragjólingar verða á hvørjum ári sleptir niður í Ærskorð, sum er lítil skor á vestursíðuni á oynni.

## HAGTØL FRÁ SEYÐAHALDINUM

**Myndirnar niðanfyri vísa** á úrslit frá seyðahaldinum í Koltri, frá tí at Koltur í 2015 varð umløgd frá festi til savnsoyggj undir Tjóðsavninum, sum byrjaði 1. januar 2015.



*Brundseyðir klárir til brundtíðina*



*At taka uttanrætta um heystið*




*Koltursshagi, grafisk mynd av hagtølum frá 2015 til og við 2021*





*Í seinasta loftinum niður í sjálva Ærskor er stigi settur. Tað lættir munandi um*





*Útsýni úr Ærskor í ein sunnan. Hest og Sandoy í baksýni*



*Stigin niður í Ærskorð*



*Skoraveðrakjøt er tiltikið gott til ræst og turt. Veturgamal veðrur*

# BJARGASEYÐA-RØKT Í KOLTRI

## BJARGASEYÐARØKT Í ÆRSKOR

**Aftrat vanliga áseyðahaldinum** er gamalt í Koltri at hava bjargaseyð í skorum. Hesar skorar eru bæði fyri norðan og fyri vestan á oynni. Men ikki altíð hildnast so væl, tí summar skorar kasta illa av sær. Til dømis tann norðara skorin, og hon hevur tí ikki verið brúkt so regluliga sum tann vestara Ærskor.

Stórur áhugi er serliga millum tað unga fjallfólkaliðið at røkja Ærskor. Tveir brundseyðir verða vanliga sleptir niður í Ærskor fyrst í mai og tiknir aftur í september. Skoraveðrakjøt av veturgomlum veðri er tiltikið gott kjøt bæði sum ræst og turt. Nógv verður gjørt burturúr á heystardegi, tá ið farið verður í Ærskor at taka bjargaseyð og fletta.



*Á veg inn eftir Longurók vestantil á oynni. Í baksýni hómast Sandoy og Trøllhøvdi*



*Báðir veðrarnir niðri í Ærskor*




*Tjaldursreiðrið við tyrlupallin, har tveir ungar klaktust dag um dag*

# FUGLALÍVIÐ Í KOLTRI

Ein týdningarmikil partur av lívfrøðiliga kanningararbeiðinum úti í Koltri er at fáa staðfest, hvussu fuglalívið í oynni sær út. Til hetta vórðu ymiskar mannagongdir tiknar í nýtslu, umframt at ein yvirskipað rannsókn av oynni varð gjørd. Allir atkomiligir partar av oynni vórðu vitjaðir við tí fyri eyga at skráseta reiðrandi fugl

Jón Aldará, lívfrøðingur

**Okkurt um 25** fuglasløg reiðrast í Koltri, og sigast kann, at fuglalívið í oynni er sera fjølbroytt. Nógvur lundi, havhestur og skrápur heldur til í bjørgunum, og hesi bølini hava verið ein góður matkovi hjá oyggjarfólkinum fyrr í tíðini. Koltur eigur eisini eitt ternubøli, sum einaferð hevur talt fleiri hundrað pør, men sum nú er minkað nógv; helst orsakað av ringu árunum í seinastuni, har ongin pisa er komin undan. Aðrastaðni í oynni tykist tó at ganga betur. Tjøldur og mýrisnípur fjølgast í graslendinum innangarðs, gróthúsbýlingarnir liva við drunnhvíta, og í fjøruni er æða og teisti í stórum tali umframt nøkur svartbakspør. Smáfuglar, so sum summartítlingur, grátítlingur og steinstólpa, síggjast í haganum, har eisini fiskimási og skúgvur reiðrast í lítlum tali.

## FUGLATELJINGAR

**Ein standardiserað árlig** heiðafuglateljing varð sett upp í Koltri í 2021 fyri at fáa eina heildarmeting av fuglastovnunum inni á oynni og fyri at fylgja við í gongd teirra. Mannagongdin er í stuttum tann, at nøkur føst teljingarstøð verða ásett eftir einum knattstøðuneti, og á hesum somu støðum verða fuglar taldir á hvørjum ári. Við einum kikara við frástøðumátara verða allir fuglar taldir innan fyri ein 250 metra radius, og skrásett verður eftir atburði og umhvørvinum hjá hvørjum fugli, hvussu sannlíkt tað er, at hann er reiðrandi fuglur.



*Mynd 1: Kort yvir sýnistøkustøðirnar í Koltri*



*Janus setur myndatól og telduskipan upp til at eygleiða drunnhvítareiður í Torvhúsinum*



*Ringmerktur tjaldursungi úr reiðrinum við tyrlupallin*

## EFTIRLIT VIÐ FUGLAREIÐRUM

**Fleiri fuglasløg reiðrast** í nánd av (og í) býlinginum heima í Húsi, har koltursgranskararnir búleikast. Serliga er kent, at drunnhvítar reiðrast í grótveggjunum, undir gólvbrettunum og aftan fyri t.d. timburtilfar í teimum ymisku húsunum. Í Torvhúsinum reiðrast fleiri pør á gólvinum, og tey eru frítt atkomulig. Tí hevur Tjóðsavnið sett myndatól og eina telduskipan upp har inni, soleiðis at upptøkur av reiðrunum verða stroymdar beinleiðis til heimasíðuna. Hetta er ein ómetaliga virðismikil háttur at eygleiða reiðring hjá drunnhvíta.

Umframt hetta vórðu royndir gjørdar við at seta myndatól upp við ymisk onnur reiður. Serliga væl eydnaðist at fanga reiðringina hjá tjaldursparinum við tyrlupallin. Tveir ungar klaktust, men eftir øllum at døma hóraði bert annar undan. Hann bleiv ringmerktur nakað seinni.

Eisini varð myndatól sett upp uttan fyri Torvhúsið, har eitt teistapar reiðraðist millum grótið í vegginum. Hvønn dag sóust foreldrini bera fisk til pisuna og síðani nýta ein bjálka fram við vegginum sum lopfjøl, tá ið tey skuldu flúgva avstað aftur. Yvirvøkan av hesum reiðrinum var væleydnað, tí á einum av teimum síðstu filmsbrotunum bar til at síggja pisuna royna veingirnar uttan fyri holuna.

## RINGMERKING

**Fyri at kanna** m.a., hvat kemur undan, og hvussu fuglur í Koltri ferðast, verða ávís fuglasløg ringmerkt. Her er tað serliga drunnhvítar og ungar hjá tjøldrum, másum og skúgvum, sum dentur verður lagdur á. Enn er talið á ringmerktum fugli í Koltri ikki stórt orsakað av, at slíkt arbeiði skal fara varisliga fram. Tó er hetta eitt granskingarøki, sum við tíðini skal mennast við serligum atliti at teimum sløgum, sum eru fjølment í oynni.

7 ymisk sløg vórðu ringmerkt í Koltri í 2021, og millum annað varð ein drunnhvítapisa merkt so seint sum hin 10. desember. Hetta er ein av teimum heilt seinu drunnhvítapisunum, og tað verður áhugavert at síggja, um hon verður fangað aftur sum vaksin seinni. Eisini kann nevnast, at ein av teimum trimum svartbakspisunum, sum vórðu ringmerktar í oynni, varð skotin í Nólsoy um veturin, og um drunnhvíti ikki verður taldur við, so er hetta fyrsta avlesing av einum ringmerktum fugli úr Koltri í nýggjari tíð.

| Slag | Enskt navn | Føroyskt navn | Aldur | Merkt | Avlisið |
|---|---|---|---|---|---|
| Larus marinus | Great black-backed gull | Svartbakur | Ungi | 3 | 1 |
| Larus argentatus | Herring gull | Fiskimási | Ungi | 2 | 0 |
| Stercorarius skua | Great skua | Skúgvur | Ungi | 0 | 0 |
| Haematopus ostralegus | Eurasian oystercatcher | Tjaldur | Ungi | 4 | 0 |
| Anthus pratensis | Meadow pipit | Summartítlingur | Ungi | 4 | 0 |
| Gallinago gallinago | Common snipe | Mýrisnípa | Ungi | 1 | 0 |
| Hydrobates pelagicus | European storm-petrel | Drunnhvíti | Ungi | 1 | 0 |
| | | | Vaksin | 58 | 3 |
| **Tilsaman** | | | | **73** | **4** |

*Tabell: Ringmerktir fuglar í Koltri 2021*





*Ringmerktar svartbakspisur og drunnhvítapisa*



# SKRÁPALANDIÐ Í KOLTRI

Seinast í august varð kannað, hvussu stóð til við skrápi og líra. Talan var als ikki um nakra vísindaliga kanning, men heldur forvitni um, hvussu stendur til við skrápi, og hvussu lírin hevur tað niðri í Knøunum og uppi við Eggjarnar

Vitjan í skrápalandinum og kanning av líra

Bjørn Patursson, oyggjarvørður

**Tá ið ungin** (lírin) er komin út, fer skrápurin til havs at veiða til pisuna um dagin. Skrápur kann flúgva langt og etur veiðuna. Um kvøldið, tá ið myrkur kemur á, kemur hann aftur í holuna at geva líranum. Skrápur er kendur fyri at duga væl at finna leið, og hetta, at hann kemur aftur at holuni á náttartíð, er fyri at sleppa undan rovfugli og ófriði.

Tá ið lírin veksur til, kemur hann vanliga út úr holuni at sita og bíða eftir foreldrunum, sum koma aftur av veiðiferð úti á havinum. Tá ber til hjá veiðimanninum at taka dimmilíra við lykt.

Niðurstøðan var, at tann lírin sum havdur varð á hondum, sýntist at hava tað gott og vera væl fyri. Tó var ikki so nógv lív í júst hesa náttina, sum vónað var. Talan var einans um hesa einstøku vitjan og kanska í so tíðliga í líratíðini. Kannaðar vóru 10 holur og uml. 15 lírar.

## EIN SØGA UM EIN SKRÁP Í KOLTRI, SUM FÓR SÆR EIN TÚR TIL ONGLANDS

**Í 1934 búði** kendi bátasmiðurin Niclas í Koltri her. Hann var bóndi og bátasmiður.

Ein dag komu tveir onglendingar við fuglaáhuga at vitja Niclas her í Koltri. Annar spurdi Niclas, um hann kundi fara niður í skrápabølið og taka ein skráp, og hesin sami R. M. Locley úr Pembroke í Wales tók so skrápin við sær í einum búri til Onglands. Tá ið hann var komin heim til Pembroke, ringmerkti hann skrápin og slepti honum leysum.

Niclas og Locley høvdu avtalað, at Niclas skuldi merkja sær holuna, og eftir at fýra samdøgur ella so vóru gingin, frá tí teir fóru úr Føroyum við skrápinum, skuldi Niclas ganga ein túr niðan í holuna at vita, um ringmerkti

skrápurin var heimafturkomin. Niclas so gjørdi og gekk hvørt kvøld niðan í líraholuna. Ungi lírin sýntist at hava tað gott, og viðhvørt var ein skrápur inni hjá líranum, sum ongan ring hevði.

Ikki fyrrenn nítjanda samdøgrið eftir, at skrápurin var sleptur úr búrinum í Pembroke, var hann aftur í holu síni hjá pisuni í Koltri.

Sigast má, at fuglur hevur sjáldsom evnir, tá ið hann kann finna so langa leið úr Wales aftur í holuna í Koltri.





Bjørn Patursson, oyggjarvørður lesar seg upp









Abbadøturnar hjá Bjørn Patursson, Lükka Maria og Helena Suniva, fylgja við lívfrøðiliga arbeiðinum á starvsstovuni. T.v. Eva Kjæld Hansen, lívfrøðilesandi

# SKORDÝRAKANNINGAR Í BERGINUM Í KOLTRI

Serfrøðingar hjá Tjóðsavninum fingu fíggjarligan stuðul til verkætlan at skráseta plantur, skordýr og lendisumstøðurnar, sum tær eru í dag

**Síðani er ætlanin** at taka seyðin av størsta partinum av oynni fyri við tíðini at kunna staðfesta, hvussu upprunavøksturin og lendisstøðurnar vóru áðrenn landnám.

Ein pinkalítil liður í hesi verkætlan er at seta skordýrafellur upp kring oynna fyri at fanga skordýr og onnur livandi kykt, sum liva í grasinum og lendinum kring oynna. Eisini í berginum, har bjargafuglur heldur til. Hesa uppgávu hevur oyggjarvørðurin partvíst tikið sær av og sett fallfellur upp í bjargalendinum.



Svartaklukka



Skordýrafella





Í síða grasinum í vallaða berginum finnast mong skordýr



Bjørn Patursson. Arbeitt verður í tí smáa við Líkhúsinum



Hóast tað sirmaði eitt sindur, var veðrið tó gott til eina rundvísing í býlingunum í Koltri, sum Bjørn Patursson oyggjarvørður stóð fyri. Her eru tey vitjandi á gøtuni millum býlingarnar oman fyri vakra hvíta sandin í Koltri

# ENDURBYGGING AV VARÐAHJALLINUM Í KOLTRI

Varðahjallurin niðri á bakkanum Norðuri í Gerði, eisini nevndur Líkhúsið, fór um koll í einum útnyrðingsstormi í februar í fjør

**Avgjørt varð at** endurbyggja hjallin og føra hann aftur til tað, sum hann upprunaliga var, tá ið hann eisini varð brúktur sum líkhús.

Tilfarið, sum eftir var, var fyri tað mesta fúna og ónýtiligt. Nakað av rekaviði er á goymslu, og leitað hevur verið eftir hóskandi tilfari til yvirsyllar og stólpar, sum nú liggja klárir at seta upp vónandi í summar.

Fyrst í apríl kundi veruliga arbeiðið byrja. Men tá ið alt arbeiðið skal gerast eftir gomlum byggisiði og háttum, tekur tað tíð og krevur serstakt og gott tilfar eins og grundleggjandi kunning og hegni til slíkan byggistíl. Arbeitt verður í løtum við tí, sum ber til, og tá ið manning er til staðar.





Varðahjallurin Líkhúsið áðrenn hann fór um koll í storminum



Læsingar og skoytir skulu gerast eftir gomlum leisti

# FØROYSKU FÓLKATINGSLIMIRNIR Í KOLTRI

## 19. juli fekk Tjóðsavnið í Koltri vitjan av føroysku fólkatingslimunum Edmundi Joensen og Sjúrði Skaale



Millum hús og toftir á Gróthústanga

**Saman við teimum** vóru starvsfólkini á skrivstovum teirra í Fólkatinginum umframt nakrir praktikantar – í alt 12 fólk.

Fólkatingsumboðini komu at kunna seg um ætlanir savnsins í Koltri, samstundis sum hetta var ein starvsfólkaútferð hjá starvsfólkum teirra. Janus Hansen savnsvørður greiddi teimum vitjandi frá náttúrupartinum av ætlanunum, og Herleif Hammer stjóri greiddi frá mentanarliga partinum og ætlanini sum heild.




# FORNFRØÐILIGIR ÚTGREVSTRAR Í 2021

Tjóðsavnið framdi tríggjar fornfrøðiligar útgrevstrar í 2021. Ein sonevndan neyðgrevstur í Sandskoti í Havn og tvær granskingarrannsóknir. Onnur var framhald av útgrevstrinum niðri á Bakka á Velbastað og hin í økinum beint eystan fyri Múrin í Kirkjubø

Helgi D. Michelsen, savnsvørður

## FORNFRØÐILIGUR ÚTGREVSTUR Í SANDSKOTI Í HAVN

**Í Sandskoti, millum** Fútastovu og gamla Vertshúsið/Hotel Djurhuus í Havn, har matstovan Áarstova nú heldur til, gjørdi Tjóðsavnið rannsókn. Gravast skuldi fyri einum nýggjum feittbrunni og tilhoyrandi rørføring. Gøtan ella skotið, nevnt Sandskot, er ein síðugøta frá gomlu høvuðsgøtuni Gongini og gongur eystur móti húsunum, har Essabar heldur til. Áðrenn 1957, tá ið Havnará enn var opin, var ein brúgv frá Sandskoti og yvir um Havnará. Áin rann út í Eystaruvág, og áarósin var breiður við strond av eyrsandi. Fútastova, ið stendur øðrumegin Sandskot, lá niðast við ósan. Tað sæst skilliga á Fútastovuhúsunum, at tey einaferð eru víðkað við einum útbygningi út í áarósan. Vertshúsið/Hotel Djurhuus, ið stendur hinumegin Sandskot, er eisini víðkað út móti ánni. Nú eystara helvt av Sandskoti skuldi gravast út í sambandi við nýggjan feittbrunn, var tí upplagt, at Tjóðsavnið í sama viðfeingi gjørdi fornfrøðiliga rannsókn á staðnum. Hetta fyri millum annað at kanna, nær víðkaða byggingin út ímóti ánni og út í áarósan fór fram.





*Eldri grótveggur í Sandskotið grivin fram*

Úrslitið av rannsóknini vísti, at laðaði grótveggurin fram við vestara áarbakka, ið sæst á myndum frá uml. 1900, einaferð var 9-10 m longur vesturi frá ánni. Hesin eldri grótveggurin varð grivin fram áraka skiljilinjuna, har Vertshúsið og Fútastova einaferð eru bygd út ímóti ánni.



*Brúgvin frá Sandskoti yvir um Havnará og grótveggurin fram við vestara áarbakka*

Fram við grótvegginum vórðu fláir við ymiskum burturkasti, ið er endað fram við ánni. Forngripirnir úr niðastu fláunum fram við grótvegginum, eitt nú ílatabrot frá Westerwald í Týsklandi og brot av tubbakspípum úr ljósum leiri (kritpípum), kundu tíðarfestast til uml. 1700 og frameftir. Sostatt vísti fornfrøðiliga rannsóknin, at tað helst var eftir uml. ár 1700, at hús vórðu bygd út móti Havnará og áarósanum á hesum staði.

Fornfrøðiliga grevstrararbeiðið fór fram í góðum samstarvi við eigararnar av Áarstovu og arbeiðsfólkini hjá Sp/F Plan v/J. Hellisdal, ið stóð fyri verklagsarbeiðnum.

## FORNFRØÐILIGA GRANSKINGARRANNSÓKNIN NIÐRI Á BAKKA Á VELBASTAÐ

**Fyrsta royndarveitin varð** grivin niðri á Bakka á Velbastað í 2014. Síðan 2016 hava fornfrøðiligir útgrevstrar verið á Velbastað hvørt summar. Í 2021 vardi grevsturin frá 14. juni til 23. juli.

Útgrevsturin á Velbastað er liður í tøkniligu menningini á fornfrøðideildini á Tjóðsavninum. Útrevsturin er skipaður í eini granskingarverkætlan um víkingaaldar garðskirkjur, miðaldar bønhús og kirkjugarðar í Føroyum. Í verkætlanini verða kirkjuligu toftirnar og mentanarlandsløgini kring toftirnar skrásett í 3D

*Feltið á Velbastað sæð eystan. Fremst er kirkju- ella bønhústoftin vestast í feltinum sæst kirkjugarðbygnaðurin, holurnar til høgru eru gravir*







*Grevstrarøkið niðri á Bakka, Velbastað, sæð suðureftir*

við dronu, og lendið verður skannað við georadara ella GPR (Ground Penetrating Radara). Úrslitini av skrásetingunum við georadara verða síðan eftirkannað við fornfrøðiligum rannsóknarveitum á útvaldum støðum. Niðri á Bakka á Velbastað hevur verið tann mest umfatandi útgrevsturin av hesum slagi.

Brimið og máandi bakkin hótta fornminnini niðri á Bakka. Tí raðfesti Tjóðsavnið at gera fornfrøðiligan útgrevstur her og ikki aðrastaðni, har fornminnini liggja trygt varðveitt í moldini.

Tá ið fólk settu búgv niðri á Bakka, var tað vítt vallað lendið, tí sjóvarmálin var væl longri úti enn í dag. Brimið máaði tó so nógv av upprunalendinum, at tað gjørdist neyðugt at flyta búsetingina niðan, har bygdin nú er. Í bakkanum við sjóvarmálan síggjast tó leivdir eftir elstu búsetingina. Einar 10-15 metrar inn frá bakkanum er ringleitt vallað garðlag við lítlari kirkju- ella bønhústoft í miðjuni. Tað er her, útgrevsturin fer fram.

Nógvar gravir eru grivnar fram í kirkjugarðinum. Vánaligu varðveitingarumstøðurnar í moldini gera, at bert tennirnar av beinagrindunum í gravunum eru varðveittar. Tenn eru funnar av bæði vaksnum og børnum. Gravirnar venda í somu eystur-vesturvendu ætt sum kirkjutoftin. Tey deyðu hava ikki fingið gravgávur við sær, sum siður var í heidnari tíð. Kristna ikonografiin er eisini eyðsýnd á prýðiliga krossmerkta gylta silvurringinum, ið varð funnin í 2016.

Kirkju- ella bønhústoftin er eisini grivin fram. Veggirnir eru tvílaðaðir við kjarna av mold og smærri gróti. Ein innara stavkonstruktión úr viði kann hava hvílt niður á smølu grótsyllina, ið er fram við innsíðuni á veggjunum. Dyrnar hava verið á vestursíðuni. Fundurin av nógvum naglum fram við vestursíðuni bendir á, at vestursíðan hevur verið klødd við viði. Tvey vakurt steinsett gólv hvørt oman á øðrum eru staðfest inni í kirkjurúminum. Í 2021 varð staðfest, at eldra steinsetta gólvið gongur inn undir innara grótvegg á vestursíðuni. Harvið hevur eldra kirkjurúmið verið størri vestureftir enn tað yngra.

Sjálvur kirkjugarðurin varð bygdur av gróti og flagi. Inngongd var í vesturendanaum. Ein steinsett gøta gekk oman til dyrnar á kirkju- ella bønhúsinum. Ein onnur steinsett gøta gekk tætt norður við bygninginum. Undir hesi gøtu var ein eldri steinseting.



*Grevstrarfólk í góðveðrinum niðri á Bakka á Velbastað, summarið 2021*

Í 2021 komu úrslitini av kolevnis-14 kanningum, ið kunnu tíðarfesta, nær kirkjugarðurin var í nýtslu. Átta tíðarfestingar vórðu á hesum sinni gjørdar. Aldurin er óvæntaður á einum kristnum staði í Føroyum. Fimm tíðarfestingar liggja millum ár 824 og 832 e.Kr. Tær eru tiknar niðarlaga, vestur móti kirkjugarðinum og undir gøtuni oman til dyrnar. Hinar tríggjar liggja millum 906 og 985 e.Kr. Tær eru tiknar í fláum undir yngstu steinsetingini.

Hetta er fyrstu ferð, at við vissu er komið niður í 800-árini við tíðarfestingunum á Velbastað. Hesar tíðarfestingar saman við silvurmyntinum frá millum 910 og 915 e. Kr., ið varð funnin við eina grøv í kirkjugarðinum, benda á kristnan sið á staðnum longu í 800-900 árunum. Ein óvissa er, at moldtilfar í einum kirkjugarði er órógvað av gravunum, ið eru grivnar, men tíðarfestingarnar staðfesta hóast alt, at fólk hava velt og brent korn nærhendis kirkjugarðinum longu í 800-árunum. Hetta eru áhugaverdir spurningar, ið vit vónandi vita meira um eftir grevsturin í 2022.

Umframt starvsfólkini á Fornfrøðideildini á Tjóðsavninum luttóku í 2021 Inga Vestergaard Svabo, ið lesur fornfrøði í Aarhus, Rannvá Næs Hoydal, BA í fornfrøði frá Durham, Andras á Lofti, BA í fornfrøði frá Aarhus, og Petur Hansen, MA í fornfrøði frá Leicester. Tíðarfestingar vórðu gjørdar í samstarvi millum Tjóðsavnið, Moesgaard Museum í Aarhus og A. Mickiewicz University í Poznan í Póllandi.



*Granskingarveitir verða grivnar í eystan fyri Múrin í Kirkjubø 2021*



*Danin Hans Frederiksen (til høgru) stóð fyri varðveitingararbeiðinum á toftini Líkhús í Kirkjubø*



*Hákun Andreasen situr eystast í kirkjurúminum har altari helst hevur staðið og Ann Sølvia grevur í kirkjugarðinum norðan fyri*

## FORNFRØÐILIGUR GRANSKINGARGREVSTUR EYSTAN FYRI MÚRIN Í KIRKJUBØ

**Eins og á** Velbastað hava dronu 3D-lendisskrásetingar og georadarkanningar verið gjørdar í økinum sunnan og eystan fyri Múrin í Kirkjubø. Í 2020 vórðu fyrstu georadarkanningarnar gjørdar. Tá ið georadardáturnar vórðu eftirviðgjørdar, sóust skilligar mannaskaptar konstruktiónir í lendinum eystan fyri Múrin. Tær vístu seg sum javnfjarar linjur, ið sneiddu vinkulrætt, eins og húsaveggir gera, tá ið hugt verður niður á teir. Fornfrøðiliga varð hetta tulkað at vera minst tvey avlong hús og møguliga aðrar konstruktiónir eisini. Kundu hetta verið hús, ið hava staðið í økinum áðrenn omanlopið, ið var í 1772, ella møguliga bygningsleivdir úr miðøld? Hetta var sera áhugavert, og avgerð varð tikin um at grava tvær fornfrøðiligar royndarveitir (veit A og B) tvørtur um eina av konstruktiónunum.

Veit A varð løgd við sunnara endavegg, og veit B varð løgd tvørtur um miðjuna á konstruktiónini. Fornfrøðiligu royndarveitirnar vórðu grivnar í august 2021. Áðrenn tað varð avgjørt at gera eina georadarkanning afturat við eini neyvari antennu enn áður. Fyrst varð økið sligið og síðan gingið ígjøgnum við georadara. Tá ið dáturnar frá seinnu georadarkanningunum vórðu eftirhugdar, tóktust grótveggirnir nakað tunnir í mun til fyrru kanningina. Jóannes bóndi í Kirkjubø vísti okkum á, at nógvar steinsettar rennur vórðu gjørdar fyri at drena lendið í sambandi við velting. Onkur renna sást koma undan í veitini fram við vegnum niðan fyri lendið eystanfyri Múrin. Vónirnar vórðu nú ikki tær somu til royndarveitirnar. Mett varð tó, at tað hevur týdning at vita, hvussu tílíkar steinsettar rennur síggja út í veruleikanum, í sambandi við at læra at lesa tær av á georadaranum í framtíðini. Sum georadarin vísti, komu steinsettu rennurnar undan millum 40 og 60 cm undir svørðinum. Rennurnar vórðu tíðarfestar til umleið 1930, m.a. við hjálp frá einum eittoyra frá 1928. Eisini varð tosað við staðkend fólk, ið vistu, at økið helst var nývelt tá.

Við í útgrevstrinum eystan fyri Múrin í Kirkjubø í 2021 vóru, umframt starvsfólkini á Fornfrøðideildini á Tjóðsavninum, Inga Vestergaard Svabo, ið lesur fornfrøði í Aarhus, Rannvá Næs Hoydal, BA í fornfrøði frá Durham, og Andras á Lofti, BA í fornfrøði frá Aarhus.

Nógv ferðafólk leita sær til Kirkjubøar, og nógv vitjaðu útgrevsturin og vístu áhuga fyri at síggja og hoyra um fornfrøðiliga arbeiðið.



*Húsavørðurin á Tjóðsavninum Kim Clementsen royndarkoyrir frálíku sáldina, hann sjálvur hevur sniðgivið og smíða*



*Granskingarveitirnar eystan fyri Múrin í Kirkjubø 2021*



*Inga og Petur sálda moldsýnini úr útgrevstrinum á Velbastað*




*Báðar granskingaveitirnar*



*Granskingarveitirnar í mun til GPR við 450 MHz antennu*



*Granskingarveitirnar í mun til GPR við 750 MHz antennu*



# BAKKAVERJA UNDIR LÍKHÚS Í KIRKJUBØ

Tørvur er á at verja tey fornminni kring landið, ið eru hótt av brimi, og seinastu árini hava Tjóðsavnið og Landsverk samstarvað um at gera bakkaverjur, har tørvur er á tí

**Landsverk umsitur í** tí sambandi eina løgujáttan á løgtingsfíggjarlógini til at varðveita mentanararvin. Játtanin skal nýtast til at gera bakkaverju í Kirkjubø, á Sandi og aðrastaðni fyri at tryggja fornminnini. Í august 2021 varð verjan undir Líkhúsi betrað, og í desember varð eisini arbeiðið undir sóknarkirkjuni byrjað.

Hetta arbeiðið heldur fram í 2022. Játtanin er eisini ætlað til eina verkætlan, ið hevur til endamáls at skráseta fornminni fram við strendurnar og gera raðfestingar av bakkaverjum, har tørvurin er størstur.

Ein týðandi liður í arbeiðinum við bakkaverjum er, at staðkend fólk kring landið halda eyga við og boða frá møguligum broytingum í bakkanum og skaðum á bakkaverjur framman fyri fornminni.

# VERKÆTLANIN AT VARÐVEITA HVALASTØÐINA VIÐ ÁIR 2021



Tað stóra takið á hvalastøðini í fjør var el-arbeiði og ávaringarskipanin. Hetta varð raðfest, og samstundis fóru smærri og størri stoypi- og timburarbeiði eisini fram í 2021. Tá ið komið var á mál at tryggja hús og bygningar, vórðu ábøtur gjørdar innan- og uttandura

Erland V. Joensen, savnsvørður

**Tørkan, t.e. turkihúsið,** har tað og mjøl varð framleitt, skuldi taka seg betur út aftur. Tørkan hevur sæð so nakin út. Tí var tíðin komin at fáa ventilatiónskassan upp aftur á mønuna. Soleiðis er Tørkan komin til sín rætt aftur uttan. Tørkan var annars tað fyrsta húsið, sum varð umvælt. Nú stendur hon aftur, sum hon gjørdi í 1958, árið, ið varðveitingarverkætlanin hevur lagt seg eftir. Annars er at siga, at árið eftir, at hvalastøðin við Áir varð sett upp, í 1905, fekk fyrsti eigarin, norsk-skotska fyritøkan Chr. Salvesen & Co. í Leith í Skotlandi, ta fyrstu guano-verksmiðjuna, sum hevði staðið á einari hvalastøð í Íslandi, og setti hana upp við Áir. Verksmiðjan, sum stendur inni í Tørkuni í dag, er tó yngri.



Hósvíkingarnir André Jacobsen og Høgni Djurhuus á takinum á Tørkuni. 25. mars 2021



25. nov. 2021. Túnið við Tørkuna og Kvernuna er stoypt. Tað er gongt aftur

Hvør er ætlanin við einari restaureringsverkætlan? Tað eru tríggjar tíðir, sum møtast – fortíðin, samtíðin og framtíðin. At siga, at tað skal gerast sum minst, at broyta sum minst, samstundis sum karmarnir flytast, krevur at seming skal finnast. Tá ið eitt ídnaðarminni sum hvalastøðin við Áir fær eitt søguligt skifti og ikki longur er ídnaðarvirki, men nú er ídnaðararvur, mugu tillagingar gerast. Tað skal bera til at síggja nakað forkunnugt, at fara inn í eina farna tíð, uttan at tað upprunaliga missir sín veruliga dám. Tað er at halda fast um tað ektaða.

Tey vitjandi eru tey nýggju fólkini á støðini. Aðrastaðni úti í heimi verða ídnaðarvirki til skrivstovur, íbúðir og til listalig arbeiði og umhvørvi. Soleiðis er tað ikki millum áirnar við Áir, men er tað ídnaðarvirki, hvalastøðin var.

Timburmenninir hava umvælt tekjur, rútar, hurðar og hongsl, pussað og spartlað. Tað var illgongt eftir túninum við Tørkuna og Kvernuna, og tí varð tað stoypt. Somuleiðis var gjørt klárt at stoypa vegastrekkið frá Kvernuni og til Ebenezer, og har var neyðugt at breiðka svingið.



Tað er klárt at stoypa frá Tørkuni til Kvernuna. 16. november 2021



Arbeiðspallurin uppi á mønuni á Tørkuni 19. mars 2021



Byggifundur 3. mai 2021. Arne Debess frá fyritøkuni El.fo



Ingi Zachariasen hevur hampað gøtuna 2021. 12. mai 2021



Ingi Zachariasen í Streymnesi breiðkar ovara veg. 19. november 2021



Nýggjan brigdan til hvørvisteinin loysir ta gomlu av

Tað eru onnur krøv til hvalastøðina í dag, men har eru eisini møguleikar. Tá ið hvalastøðin skal gerast savnsøki, verður eisini neyðugt at hava umstøður hjá savnsfólki at vera í. Perlan er tað lítla húsið, sum evnaverkfrøðingurin Jákup Veyhe helt til í árini 1945-51, tá ið hann starvaðist hjá Pf. Spermi, sum átti hvalastøðina. Perlan, onkuntíð eisini nevnd Lítla Kemis, varð fyri nøkrum árum síðan sett í stand uttan. Nú er alt tikið innanúr. Perlan skal verða tilhald hjá savnsfólkum og granskarum. Perlan fær nýggjan køk, stovu, baðirúm og ból at gista í.

Men hvussu er so at fáa atgongd til fortíðina, og er fortíðin fyri øll? Síggja vit alla hvalastøðina sum eina eind, har øll hús, øll útgerð og allar maskinur eru tey altumráðandi gøgn, ið tilsamans mynda somu eind og heild, sum aftur vísa til framleiðslu og arbeiðslív, hevur verkætlanin at varðveita hvalastøðina ilt við at koma á mál, fyrr enn tað slepst at øllum húsum og bygningum á støðini. Sagt øðrvísi er tað truplt at leggja til rættis sjálva restaureringsætlanina og at miðla og sýna fram støðina, tá ið ikki øll hús og allir bygningar, sum upprunaliga vóru partur av støðini, eru partur av restaureringsætlanini.

Loksins fekst fatur á smiði í 2021. Sigurd Jan Tavsen í Sørvági hevði leingi drigist við skaða og hevði lovað seg at fáast við jarnsmíð á støðini. Tað eru staklutir sum at evna til nýggja brigdu til ein hvørvistein, sum leingi hevur ligið á liðini. Tað var eisini eitt illa farið rør, ein roykhanus, sum stóð, og sum aftur skal standa á Pressuloftinum. Sigurd Jan Tavsen var eisini inni í gomlu smiðjuni og bøtti um essuna, eins og rørini millum húsini skulu styrkjast.

Verkætlanin at varðveita hvalastøðina fylgir 'Ávegis álit um varðveiting av hvalastøðini sum sjóvinnusavn' (Mentamálaráðið 2007) og tí yngra álitinum, 'Hvalastøðin við Áir. Álit um økisskipan' (Mentamálaráðið 2013). Í 2021 vóru 10 byggi- og 5 ráðleggingarfundir.

Fyritøkan El.fo hevur staðið fyri arbeiðinum við el- og ávaringarskipan. Timburmeistararnir Høgni Djurhuus og André Jacobsen, rørsmiðurin Páll Olaf Jacobsen og arbeiðstakarin Ingi Zachariassen vóru á hvalastøðini í 2021. Arkitekturin Mayfinn Norðoy á Kontrast hevur byggileiðsluna av hvalastøðini um hendur. Verkætlanin at varðveita hvalastøðina árini 2011 til ársenda 2021 hevur kostað 18,3 mió. kr.



Pallur varð gjørdur inni Tørkuni. omanfyri hann er ventilatiónkassin



Roykhanus

# MÓTTØKA VAR Í SAMBAND VIÐ, AT PLANTUFRØÐILIGI URTAGARÐURIN LÆT UPP FYRI ALMENNINGINUM

Á mentanarnáttini 10. september læt plantufrøðiligi urtagarðurin niðri í Hoyvík upp fyri almenninginum. Tað var ein hugnaligur dagur við grillaðum pylsum og heimagjørdari rabarbusaft. Havnar Hornorkestur spældi nakrar sangir, og Kolbrún í Haraldsstovu, savnsvørður, helt røðu

Kolbrún í Haraldsstovu, savnsvørður

**Fitt av fólki** var møtt upp niðri í Hoyvík, og fleiri ognaðu sær ein avlegg av plantuni lundaarmingi *Lycimacia memorum*, sum var til keyps til tiltakið.

Síðani urtagarðurin læt upp, hevur hann verið væl vitjaður. Fólki dámar væl at spáka sær oman í Hoyvíkina at uppliva nýggja vakra urtagarðin og náttúruna rundanum.

## UM URTAGARÐIN

**Tá ið Statens** Forsøgsvirksomhed í 1920 byrjaði landbúnaðarroyndarvirksemi í Hoyvík, vórðu tríggir urtagarðar eisini gróðursettir, sum hoyrdu til virksemið hjá royndarstøðini. Ein í Kúrdali, ein kring sethúsini og hesin oman móti Hoyvíkini. Ivasamt er, hvønn leiklut urtagarðarnir høvdu fyri virksemið á royndarstøðini, tí urtagarðarnir vórðu mest nýttir til prýðisplantur. Tá ið royndarvirksemið helt uppat í 80-árunum, fullu urtagarðarnir í órøkt og hava seinastu árini verið fjaldir undir runninum ”spanskt hindber”.

Í ár hevur urtagarðurin fingið nýtt lív. Runnarnir eru burturbeindir og urtagarðurin endurnýttur at sýna fram føroyskar plantur. Annleyg Patursson gartnari hevur plantað, lúkað og hjúklað um hann í fleiri mánaðir, og eisini hevur tað verið eitt rimmar arbeiði at fáa allar runnarnar burtur, at gjørt gøtur og annað fyri at fáa urtagarðin aftur í upprunastand, og tí eigur Ólavur Reinert æruna av.

## HVØRJAR PLANTUR ERU AT SÍGGJA?

**Í urtagarðinum eru** meira enn 190 føroysk plantusløg – alt villplantur. Fleiri av plantunum eru vanligar at síggja í føroysku náttúruni, t.d. berjalyngur, sólja og summardái, men veturgrønir krúpandi pílarunnar og baraldur eru eisini at síggja, eins og serstakliga sjáldsamar plantur.

Eitt yvirlit yvir planturnar er í urtagarðsfaldaranum hjá Tjóðsavninum, sum er ókeypis at fáa á framsýningum Tjóðsavnsins.

## PLANTURNAR OG GRÓÐRARØKIÐ

**Øll uml. 190** plantusløgini hava fingið sítt serstaka pláss í urtagarðinum, og planturnar eru settar, har tær trívast best. Har eru plantur, sum trívast best í vátligum umhvørvi, og plantusløg, sum trívast best í skeljasandi – eisini plantur, sum trívast best ímillum steinar, í skugga, í vatni o.s.fr. Við hesum vil Tjóðsavnið vísa, at tað kanska ikki altíð er neyðugt at broyta umhvørvið so nógv, men heldur at finna plantur, sum trívast í tí umhvørvinum sum er. Fyri at forða fyri, at plantur, ið hava lyndi til at breiða seg, ikki køva aðrar plantur, eru fleiri settar í krukkur. Somuleiðis eru plantur settar í spannir, ið eru fjaldar undir moldini, fyri at forða teimum at breiða seg. Einastaðni í urtagarðinum er sandur blandaður í moldina fyri at fáa gróðrarlíkindini at líkjast fjøruøki.

## FØROYSKAR VILLPLANTUR Í URTAGARÐIN

**Torført kann vera** at fáa plantur at trívast uttan fyri teirra gróðrarøki. Plantur, sum vaksa væl í hæddini ella í vátligum lendi, trívast ofta ikki í urtagørðum. Tí er umráðandi at lata villplantur í náttúruni fáa frið, serliga sjáldsomu planturnar. Sjáldsamar plantur eru lagaðar til heilt serstøk vakstrarøki, og tær eru serliga viðbreknar fyri broytingum. Tískil kunnu plantur lættliga minka ella hvørva úr náttúruni, um tær verða tiknar.

## TÝDNINGURIN AV PLANTUFRØÐILIGUM URTAGARÐI

**Tá ið hugsað** verður um, hvussu fjarskotnar Føroyar eru, er tað heilt sjáldsamt, at so nógv plantusløg eru í Føroyum. Planturnar, sum hava ferðast longu ferðina til oyggjarnar og hava yvirlivað, hava lagað seg til eitt heilt serstakt umhvørvi her. Men stóri innflutningurin og manglandi eftirlit av útlendskum plantum setur náttúruna í vanda. Til ber at síggja, hvussu útlendskar plantur yvirtaka økir og troka føroysku planturnar burtur. Ongar reglugerðir eru, sum forða hesum, og tískil er eingin verja av náttúruni í Føroyum.

Tjóðsavnið vil flyta sjóneykuna á tær føroysku planturnar heldur enn tær innfluttu og kveikja kunning og áhuga fyri føroysku náttúruni sum heild. Í urtagarðinum eru sjáldsamar føroyskar plantur, sum tú kanska ongantíð fert at síggja í náttúruni, men lættliga kanst koma at eygleiða í urtagarðinum. Eisini sært tú livandi dømir um okkara fjølbroyttu náttúru. Í urtagarðin kunnu fólk koma at fáa íblástur til urtagarðar, og við tíðini er ætlanin at byggja upp eina lítla sølubúð við føroyskum plantum, sum Annleyg sjálv hevur alt. Soleiðis kunnu føroyingar lættliga fáa føroyskar villplantur í havarnar, og náttúran fær frið.

## KOLTURSVERKÆTLANIN SUM PARTUR AV URTAGARÐINUM

**Í sambandi við** Koltursverkætlanina verður urtagarðurin víðkaður til at hýsa føroyskum plantum, sum skulu alast til endurplanting í oynni. Har verða eitt nú fýra ymisk pílasløg plantað, sum skulu vera millum tey plantusløg í Koltri, ið verða við til at mynda eina meira upprunaliga náttúru uttan menniskjaligt virksemi. Tær fyrstu planturnar, ið verða aldar til Koltursverkætlanina, eru 50 avleggir av arktiska pílinum salix arctica, sum landsstýrið og Føroya løgting góvu Margretu Drotning í heiðursgávu, nú hon hevur verið drotning í 50 ár.

## URTAGARÐURIN Í KÚRDALI

**Ein urtagarður er** afturat, sum hevur fingið nýggjan ham. Tað er urtagarðurin í Kúrdali, sum eins og hinir urtagarðarnir í Hoyvík  hevur ligið í órøkt í nógv ár. Nú eru sponsku hindberini burturtikin og plantur gróðursettar. Hóast hesin urtagarður ikki er ein plantufrøðiligur urtagarður burturav, er hann sera hugnaligur at vitja við sínum stóru royni- og ahorntrøum. Gomlu grótlaðingarnar eru vorðnar sjónligar aftur, og grivið er oman av hellunum. Stóra bókartræið er serstakliga vakurt at líta á, og fólk eru vælkomin at spáka sær oman hagar eisini.

## URTAGARÐURIN Á DEBESARTRØ

**Tá ið urtagarðurin** niðri í Hoyvíkini bleiv gróðursettur, bleiv gamli urtagarðurin á Debesartrøð fluttur niðan hagar.

Urtagarðurin á Debesartrøð bleiv gróðursettur stutt eftir, at Náttúrugripasavnið varð stovnað í 1955. Tá varð urtagarðurin nýttur til undirvísingarbrúk, og næmingar røktu garðin fyrstu árini. Í 1985 vórðu Mads og Kristianna Jensen, sum sjálv høvdu urtagarð við føroyskum plantum í Kvívík, biðin um at røkja og víðka um urtagarðin á Debesartrøð. Í 1996 yvirtók Annleyg Patursson røktina av urtagarðinum og hevur síðani røkt garðin, til hann bleiv burturtikin í heyst.

Vánaliga jørðildið undir urtagarðinum á Debesartrøð gjørdi tað tó torført at víðlíkahalda. Hvønn vetur í nógva regninum hevði moldin hug at ryðja undan. Hetta kravdi ov nógva røkt hvørt ár, sum gjørdi, at urtagarðurin ikki var ein góð langtíðarloysn. Umhvørvið rundan um urtagarðin er eisini broytt nógv, síðani trøini fullu í ódnini í 1988. Burturtiknu trøini hava gjørt, at lívdin er horvin, og plantuumstøðurnar eru ikki eins góðar, og tær hava verið. Harumframt heldur meginparturin av virksemi Tjóðsavnsins til niðri í Hoyvík, og savnsvirksemið á Debesartrøð verður helst eisini flutt niðan um ikki alt ov langa tíð. Tí varð avgjørt at flyta planturnar í nýggja urtagarðin í Hoyvík ístaðin, soleiðis at alt savnsvirksemi er savnað á einum stað.

Tjóðsavnið vónar, at fólk fáa líka stóra gleði av nýggja plantufrøðiliga urtagarðinum í Hoyvík, sum tey fingu av urtagarðinum á Debesartrøð.



Fitt av fólki var møtt upp



*Stjórin á Tjóðsavninum grillaði pylsur til tey vitjandi*



*Annleyg Patursson hevur staðið fyri arbeiðinum at gera urtagarðin av nýggjum*



*Bjørn Kalsø og Jákup Símun Simonsen fáa sær eina pylsu* MYND: MARJUN ARGE SIMONSEN



*Koltøðklukka (Aphodius ater) í sínum natúrliga búøki, feskum seyðatøðum*

# NORÐURTØÐKLUKKAN

Fyri fyrstu ferð í 105 ár hava granskarar á Tjóðsavninum staðfest eitt nýtt slag av tøðklukku. Seinast tað hendi, var í Trongisvági í 1916

**Agnes Kreiling, lívfrøðingur ph.d.**

**Í juni 2019** vóru fimtan tøðklukkur savnaðar úr seyðatøðum í Koltri. Nú hevur Agnes Kreiling kannað tær, og hon kom eftir, at hetta ikki var eitt av teimum trimum sløgunum, sum áður eru skrásett í Føroyum. Hetta vísti seg at vera *Aphodius borealis*.

Hervið eru fýra sløg av tøðklukkum (Aphodiinae) skrásett í Føroyum. *Aphodius borealis* hevur fingið føroyska navnið norðurtøðklukka. Hini sløgini eru roðatøðklukka (*Aphodius lapponum*), koltøðklukka (*Aphodius ater*) og svávultøðklukka (*Aphodius foetidus*). Øll fýra sløgini víggja og vaksa í seyða- og neytatøðum.



*Nýliga skrásetta slagið norðurtøðklukka (Aphodius borealis)*

Ein grein varð skrivað um hetta í Frøði (2021-1), og síðan ta greinina hevur Agnes funnið norðurtøðklukku eisini í Sandoyni. Tað kann nevnast, at hetta er ikki einasta nýggja slagið av klukku staðfest í Føroyum í 2021. Tí nøkur nýggj sløg av klukkum vórðu staðfest í skordýrasavninum, sum ikki vóru eyðmerkt áður, til dømis hýggjklukkan *Cartodere nodifer*.







*Firvaldar í søguliga Leif Dahl savninum*

# SKORDÝRASAVNIÐ HJÁ TJÓÐSAVNINUM

**Náttúrusøgulig søvn eru av stórum týdningi fyri lívfrøðiliga gransking, ikki minst tá ið hugsað verður um lívmargfeldiskreppuna, sum heimurin er í. Søvnini geva innlit í týdningarmikla vitan um eitt nú søguliga útbreiðsla hjá sløgum, nær ávís sløg komu fyrstu ferð til landið, ella um tey eru horvin aftur, hvussu innræsin sløg og skaðadjór hava breitt seg og eisini broytingar í útsjónd og skapi hjá sløgum**

**Agnes Kreiling, lívfrøðingur ph.d.**

**Ein týdningarmikil leiklutur** hjá náttúrusøguligum søvnum er sum tilvísing, tá ið sløg skulu eyðmerkjast: onkur sløg av skordýrum kunnu líkjast tætt skyldum sløgum so mikið nógv, at tey einans kunnu slaggreinast av serfrøðingum og við neyvari samanbering við eintøk í søvnum.

Í januar 2021 fór Tjóðsavnið at endurskipa skordýrasavnið. Ítøkiliga varð farið undir eina skipaða gjøgnumgongd av øllum eintøkum av skordýrum á nál, sum eru í varðveitslu í klimarúminum í Kaldbak. Øll eintøk, sum ikki eru eyðmerkt, verða eyðmerkt og skrásett, og øll eintøk verða skipað betur og um neyðugt flutt í nýggjar skuffur.

Nøkur eintøk verða verandi í sínum upprunaligu skuffum og eru partur av søguliga Náttúrusøguliga savninum, eitt nú firvaldarnir, sum Leif Dahl (1910-1982) og Gazet Patursson (1879-1970) savnaðu.

Ein partur av savninum verður skipaður sum eitt sonevnt “synoptiskt savn”. Tað merkir, at her verða savnað nøkur eintøk av øllum sløgum, ið eru skrásett í Føroyum. Hetta er eitt rættiliga stórt mál og krevur fleiri ára miðvísa innsavning av skordýrum. Men við at brúka tey eintøk, sum Tjóðsavnið longu hevur, eru vit komin heilt langt, tó als ikki á mál. Í løtuni eru 2419 eintøk, ið fevna um 225 sløg í synoptiska savninum. 116 sløg av klukkum (Coleoptera) eru í savninum, og hetta er í løtuni størsti hópurin. Síðan eru tað 46 sløg av firvaldum (Lepidoptera), 37 sløg av tvíveingjum (Diptera) og 34 sløg av súgkjaftum (Hemiptera) umframt aðrir hópar.

Tað verður spennandi at síggja, hvussu synoptiska savnið fer at vaksa komandi árini. Vónin er, at Tjóðsavnið fær neyðugu orkuna at tryggja, at skordýrasavnið verður eitt viðurkent savn í vísindaheiminum, og ikki minst at orka verður til at brúka hetta tilfeingið til kunning um føroysku náttúruna sum heild.

# LÍVFRØÐILIGA ARBEIÐIÐ Í KOLTRI 2021



Hugni í Høvdahaga



Agnes og Johan á veg heimaftur úr Høvdahaga



Bjørn og Agnes tøma fallfellur



Úrslitið er greitt – skúgvur verjir ungarnar við at skvetta

2. mai fekk Tjóðsavnið boðini, at Aage V. Jensens Fonde høvdu avgjørt at játtað eini umsókn, ið var send um stuðul til eina støðiskanning av náttúruni í Koltri. Tískil varð beinanvegin farið í holt við at leggja feltarbeiði til rættis, og longu 2. juni varð byrjað. Agnes Kreiling varð sett í hálvtíðarstarv at taka sær av ryggleysum djórum

Janus Hansen, savnsvørður

**Frá 2. juni** til 27. september stóð Agnes fyri at savna skordýr í Koltri. Hetta bleiv gjørt við fallfellum, glúpi, tøðsýnum, Surber sýnum og rekasýnum, hesi síðstu til dýr í feskvatni. Umframt Agnes luttóku Bjørn Patursson og Janus Hansen í hesum innsavningunum. Harumframt vóru skordýr savnað við hond í fjøruni. Hóast tað var ætlanin, so hava vit ikki brúkt Malaisefellu, ljósfellu ella savnað reyðmaðkar í 2021. Útgerðin kom ikki til tíðina, og tað var nakað seint at finna arbeiðsfólk til reyðmaðkarnar. Í 2022 verður hetta eftir ætlan gjørt. Ein talva vísir, hvørji sýnir eru tikin.

Frá august arbeiddi Eva Kjæld Hansen við at flokka fallfellusýnir. Harumframt flokkaðu næmingar á Fróðskaparsetrinum nøkur sýnir sum liður í eini verkætlan hjá teimum. Agnes Kreiling flokkaði og eyðmerkti glúpasýnir, tøðsýnir, rekasýnir og ymiskt savnað við hond. Hon er farin at eyðmerkja klukkur og tvíveingjur úr fallfellusýnum.



Hetta er eitt lorta arbeiði – Agnes kannar tøðsýnir

Samstarv varð tikið upp við serfrøðingar í ávísum dýrabólkum: Karl A. Thomsen (Syðrugøtu) í firvaldum, Birna V. T. Fjallstein (BioFar) í bjarnadýrum og Vladimir Gusarov (Oslo Universitet) í Aleocharinae.

## FUGLAR

**Fuglar vórðu taldir,** ringmerktir og miðlaðir í 2021. Umframt tað arbeiði, sum bleiv gjørt sum partur av støðiskanningini, setti Tjóðsavnið Johann Castenschiold í starv at arbeiða við eini verkætlan, ið skuldi meta um brúkið av dronum í sambandi við fuglateljingar, í stóran mun í Koltri.

Ætlanin var at telja ternur við dronu, men einki kom undan hjá teimum. Tí varð í staðin roynt at telja heiðafugl við hitamyndatólinum hjá dronuni um náttina. Hetta vísti seg at virka serstakliga væl, og ikki minst mýrisnípurnar, sum eru sera truplar at telja, kundu teljast á henda hátt. Tættleikin var stórur, og innangarðs vórðu 39 reiður funnin.

Eins og undanfarin ár stóð Janus Hansen fyri at stroyma drunnhvítar beinleiðis. Video varð víst á heimasíðuni hjá Tjóðsavninum. Filmarnir vórðu goymdir á Vimeo, og ein mynd frá hvørjum av teimum trimum myndatólunum varð goymd fimta hvønn minutt. Samlað vóru tað yvir 700 tímar av video og 62.000 myndir.

Jón Aldará hevur lagt ringmerkingina í Koltri til rættis so, at ungar hjá sjó- og vaðfuglum verða merktir. Seint í juni og tíðliga í juli vórðu svartbakar, fiskimásar, skúgvur og tjøldur merkt. Hesi øll liva longi, eru sjónlig, og ringarnir verða lutfalsliga ofta sæddir aftur. Tað er tó ein avbjóðing, at ungarnir hjá hesum fuglum fara úr reiðrinum og duga væl at fjala seg.

Í 2021 gjørdi Janus Hansen eina mannagongd til at telja fugl við, ið kallast R250. Mannagongdin varð eisini roynd í Koltri. Heilt stutt verða allir fuglar, sum møguliga reiðrast innan fyri 250 metrar frá einum punkti, skrásettir. Jón Aldará gjørdi hetta á seks støðum tríggjar ferðir í bútíðini.

## PLANTUR

**Frá 30. mai** til 29. juni arbeiddu Kolbrún í Haraldsstovu og Olivia Danielsen við plantulívinum í Koltri. Tær skrásettu plantur og byrjaðu at kortleggja lendissløg í oynni.

Samstarv varð fingið í lag við Oliver Bechberger á Náttúrugripasavninum í Karlsruhe.

## RANNSÓKNARSTØÐIN KOLTUR

**Møguleikarnir at búleikast** í Koltri vórðu bøttir í 2021. Heimi í Húsi varð brúsurúm gjørt til, frystiboks (til sýnir og mat) og nýggjar dýnur og koddar fingin til sengurnar.

## MIÐLAN

**Á heimasíðuni hjá** Tjóðsavninum vórðu bæði føroyskar og enskar síður gjørdar um náttúruna í Koltri og støðiskanningina.

https://www.tjodsavnid.fo/nature-of-koltur
https://www.tjodsavnid.fo/natturan-i-koltri



Ríkur plantuvøkstur í Koltri

*Talva 1. Sýnir av ryggleysum djórum savnað summarið 2021, og hvussu tað gongur við viðgerðini*

| Slag | Støðir | Endurtøkur | Sýnir | Flokkað | Eyðmerkt | Viðmerking |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fallfella | 11 | 5 | 55 | 22 | - | |
| Glúpur | 8 | 1 | 8 | | 8 | |
| Tøð | 8 | 1 | 8 | | 8 | |
| Surber | 9 | 1 | 9 | - | - | |
| Reka | 9 | 1 | 9 | | 9 | |
| Mold | 11 | 1 | 11 | - | - | Fryst |
| Við hond | 11 | 1 | 11 | | 4 | |

# DRUNNHVÍTA- OG LUNDATELJING Á RAMSAR-OYGGJUM

Í Føroyum eru tríggjar oyggjar, ið eru fevndar av Ramsar-sáttmálanum um vátlendi við serligum týdningi fyri fugl. Tær eru Nólsoy, Mykines og Skúvoy, ið hýsa týdningarmiklum stovnum av ávikavist drunnhvíta (Hydrobates pelagicus), lunda (Fratercula arctica) og lomviga (Uria aalge)

Jón Aldará, lívfrøðingur

**Á hvørjum ári** samstarva Tjóðsavnið og Havstovan um at hava eftirlit við fugli á hesum oyggjum, og Tjóðsavnið hevur ábyrgd av at telja drunnhvíta í Nólsoy og lunda í Mykinesi.

## DRUNNHVÍTI Í NÓLSOY

**Orsakað av, at** drunnhvítateljingin í Nólsoy áður hevur fevnt um tey flestu størru økini, har drunnhvítar verða hildnir at reiðrast, varð í 2021 avgjørt bert at telja á kalibreringsøkinum fyri at halda fram við eftirliti við reiðrandi drunnhvítum á Dølum (Mynd 1). Teljingin fer soleiðis fram, at fýra álir verða lagdar ígjøgnum økið eftir sama leisti hvørt ár, og teljararnir ganga síðani eftir hesum álum. Fyri annan hvønn metur verður spælt drunnhvítaljóð av einum hátalara, og lurtað verður eftir svari innan fyri 2 metrar høgrumegin álina. Ikki allir drunnhvítarnir svara aftur í hvørjari teljing, og tí má teljingin endurtakast fleiri ferðir. Allar holur, har drunnhvítasvar hoyrist, verða merktar við einum tali, og tá ið ikki fleiri holur leggjast afturat, verður mett, at allar aktivu drunnhvítaholurnar eru taldar í økinum.

Í 2021 varð talt fimm ferðir frá 25. august til 3. september. Hetta er nakað seint, um hugsað verður um, at best er at telja um miðjan juli. Tó eru dátur frá einum seinni tíðarskeiði virðismiklar, tí tær siga okkum, hvussu nógv pør enn eru aktiv í økinum, tá ið reiðringin er farin at halla, og færri pør eru inni í holuni.

| | Lamba | | | Dalurin | | | Hólmur | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Óbr. | Brúkt. | Pisa | Óbr. | Brúkt. | Pisa | Óbr. | Brúkt | Pisa |
| **2011** | 93 | 56 | 0 | 97 | 44 | 0 | | | |
| **2012** | 43 | 99 | 0 | 42 | 74 | 0 | 14 | 18 | 0 |
| **2013** | 41 | 91 | 0 | 47 | 82 | 0 | | | |
| **2014** | 60 | 105 | 4 | 40 | 108 | 4 | | | |
| **2015** | 34 | 104 | 9 | 39 | 102 | 5 | | | |
| **2016** | *109* | *196* | *<85* | *187* | *207* | *<44* | | | |
| **2017** | 35 | 164 | 87 | 81 | 153 | 69 | | | |
| **2018** | 61 | 187 | 72 | 116 | 145 | 41 | | | |
| **2019** | | *123* | *<50* | | *176* | *<170* | | | |
| **2020** | *48* | *159* | *22* | *94* | *186* | *36* | | | |
| **2021** | *33* | *185* | *34* | *153* | *241* | *52* | | | |

*Undir teljingini vóru nakrar livandi pisur at síggja í holum, men eisini lá fitt av deyðum pisum uttan fyri holurnar og inni í holumunnum (Mynd 4). Hesar pisurnar vóru á ymsum vakstrarstigum, og summar vóru komnar hampiliga væl á veg. Trupult er at gera nakra endaliga meting um, hvørt talið á deyðum eigur at elva til ørkymlan, men tað er neyvan eitt gott tekin. Aftur at teljingini varð eisini gjørt nakað burturúr at taka myndir av sildbera*

## LUNDI Í MYKINESI

**Eisini í 2021** tóktist lundin í Mykinesi at drýggja reiðurstíðina, og tí varð lundateljingin aftur gjørd seint, frá 9. til 13. august. Talt varð í øllum atkomuligu puntunum í kortlagda knattstøðunetinum, sum varð tikið í nýtslu í 2011. Funnið verður til knattstøðuna mitt í puntinum, har ein pinnur verður settur. Síðani verða lundaholur taldar innan fyri ein sirkul við 1,78 metra radius – mett við einum bandi við somu longd. Sirkulin er sostatt 10m² víður. Allar holur verða skrásettar, og samstundis verður skrásett, um holurnar bera brá av nýtslu (t.d. við slitnum/niðurtraðkaðum grasi og/ella leysari mold við munnan). Eisini verður skrásett, um skvøttur er at síggja í holuni, tí hetta er tekin um livandi pisu.

Lundapisur byrja rættiliga skjótt at skvetta burtur frá, har tær liggja. Tá ganga tær vanliga móti munnanum og skvetta, tá ið dagsljósið kemur á tær. Skvøttirnir blandast skjótt upp í moldina í holuni, so ein feskur skvøttur er gott tekin um livandi pisu. Í 2020 varð kanning gjørd úti í Mykinesi, har teljarar fóru til holur, har teir sóu sildbera fara inn, og skrásettu, um skvøttur var at síggja í holuni. Fyribils niðurstøðan tá var, at 91% av holunum við ungum høvdu sjónligan skvøtt inni. Hetta talið hevur verið nýtt til at rætta samlaða talið av pisum í 2021.



*Elisabeth Knudsen, lívfrøðingur, telur lundaholur í Dalinum*



*Nakað var at síggja av deyðum lundapisum í og kring holurnar*



*Lundalondini í Lamba (vestanfyri) og í Dalinum (eystanfyri). Talt varð í teimum reyðu puntunum*





Kjógvi



Floygd kjógvapisa

# EFTIRLIT VIÐ UNDANKOMU AV KJÓGVA

Tjóðsavnið ger nógv arbeiði við kjógvum kring landið. Høvuðsdentur verður lagdur á eftirlit við undankomu, sum varð sett í verk 2017. Hetta eftirlitið verður gjørt á hvørjum ári í Fugloy, Svínoy, Saksun og Akrabergi, har bæði stór og smá kjógvabølir eru

Jón Aldará, lívfrøðingur

**Á hesum støðum** verða fyrst tald eyðsýniliga upptikin reiðursøkir, har tekin eru um, at eitt par heldur til. Hetta verður gjørt í fyrru helvt av juni, tá ið kjógvarnir vanliga hava vorpið. Síðani kemur teljarin aftur á somu økir í seinnu helvt av juli og telur pisur, sum antin eru floygdar ella eru um at vera floygdar . Á tann hátt ber til at rokna, hvussu nógvar pisur koma á flog fyri hvørt búøki.

Talið á floygdum kjógvapisum síðani 2018 hevur sum heild verið nakað minkandi, men talið á eyðsýniliga upptiknum reiðursøkjum er sera støðugt (Mynd 3). Serliga í 2020 komu fáar pisur á veingirnar. Hetta lága talið kann fyri ein part vera ávirkað av, at tað ikki bar til at telja í Saksun fyri veður, men fáar floygdar pisur vóru at síggja á øllum støðum. Enn ber tó ikki til at síggja nakað ítøkiligt um gongdina, tí nøkur ár skulu til aftrat, áðrenn ein heildarmynd kann síggjast.



Kjógvapisur merktar við litringi. Pisan vinstrumegin 10-14 dagar gomul, og tann høgrumegin er okkurt um 4 vikur og næstan floygd



Kjógvapisan 'FCI', sum varð merkt í Mykinesi í 2017, er afturkomin til sítt heimbøli sum vaksin

## KJÓGVAMERKING

**Hvørt ár verða** kjógvapisur merktar við litringi. Hetta er fyri at kanna, hvussu nógvar koma undan og koma aftur til Føroyar at reiðrast, tá ið tær eru búnar til tess. Kjógvapisur verða merktar allastaðni kring Føroyar, og samstundis sum merkingin fer fram, verður leitað og hugt eftir frammanundan ringmerktum kjógvum í økinum. Higartil eru 2 pisur skrásettar at vera komnar aftur til búplássið sum vaksnar, síðan litringmerkingin byrjaði í 2017. Onnur – 'FCI' – hevur hildið til í Mykinesi í 2020 og 2021 og varð ringmerkt í 2017 (Mynd 5). Hin – 'BH' - varð skotin við flogvøllin í Vágum í juni 2021 og varð ringmerkt við Fjallavatn í 2018.

Í 2017 og 2018 varð arbeitt við at seta sporingstól – sokallaðar ljósloggarar – á vaksnar kjógvar úti í Fugloy. Flestu teirra vórðu fangaðir aftur og fingu ljósloggararnar av sær aftur, men enn er ein úti í Fugloy, sum hevur ein slíkan sitandi á beininum. Hann er styggur, og litringurin er brotin, sum hann fekk á seg á sinni, so hann er ikki til at kenna aftur við vissu. Tvær royndir vórðu gjørdar at fanga hendan kjógvan í 2021. Fyrru ferð varð roynt við reiðursfellu, meðan hann bøldi eggum í juni, men tá var hann ikki at síggja á økinum. Helst hevur hann verið burturi á sjónum og roynt eftir føði, tí í juli varð hann sæddur aftur á sínum reiðursøki. Tá varð roynt við neti og einum útstappaðum skúgvi sum lokka. Tíverri kavaði hann ikki nóg lágt eftir skúgvinum til, at hann kom í netið. Roynt verður aftur um summarið 2022, um hann er tá er til enn.

## STOVNSMETING

**Eingin ítøkilig teljing** er gjørd av føroyska kjógvastovninum í minsta lagi í 20 ár. Tó hava metingar og teljingar verið gjørdar síðan 2018 á ymsu bølunum í sambandi við ringmerking og eftirlitskanningar.




Teljingar og metingar (~) av kjógvabølum kring landið

Kortið vísir tey støð í Føroyum, har teljingar ella metingar hava verið gjørdar. Spurnartekn standa við tey støð, sum søguliga hava verið stór kjógvabølir, men har ongin vitan er tøk í løtuni.



Kjógvi í Fugloy við ljósloggara um beinið




Samlað tal av eyðsýniliga upptiknum reiðursøkjum (grátt) og floygdum pisum (svart) á øllum økjum 2018–2021. Nevnast skal, at í 2018 bar ikki til at telja á einum av støðunum í Fugloy, og er hetta helst orsøkin til, at reiðursøkini eru eitt vet færri. Í 2020 bar ikki til at telja í Saksun, og tað kann ávirka heildartalið á floygdum pisum



*69 tunnur við lívfrøðiliga tilfarinum vórðu sendar til Føroyar*

# Biofartilfar heimafturkomið

Í tíðarskeiðinum 1988-91 varð skipað fyri stórari innsavning av ryggleysum dýrum í føroyskum sjóøki. Verkætlanin fekk navnið BioFar og var ein felags norðurlendsk verkætlan við tí endamáli at leggja aftur at tí vitan, sum frammanundan var um djóralívið á havbotninum

**Á Havlívfrøðiligu royndarstøðini** í Kaldbak varð materiella tilfarið sorterað í djórabólkar og seinni sent til teir mongu útlendsku serfrøðingarnar, sum høvdu átikið sær at útgreina tilfarið til sløg. Fleiri av hesum serfrøðingum vóru á Zoologisk Museum í Keypmannahavn, og tað, sum nú er sent aftur, er partur av hesum tilfarinum.

Tilfarið er rúgvismikið og fyllir 69 smáar tunnur. Í hvørjari tunnu eru smærri og størri gløs, sum eru pakkað í innsiglað plastik. Tey skulu øll viðgerast av nýggjum, skrásetast og flytast á vátsavnið, har tey verða partur av føroyska savninum av ryggleysum djórum í sjónum. Hetta arbeiðið fer at halda fram í 2022.

Í Biofar-verkætlanini var mesti denturin lagdur á at savna tilfar av dýpum millum 100 og 1500 m. Frammanundan varð mett, at vitanin um botndýralívið á tí grunna partinum av landgrunninum var hampiliga gott, og tí var ikki so stórur dentur lagdur á at savna meiri í hesum økinum.

Úrslitini, sum komu burturúr, vórðu prentað í altjóða vísindaritum og fevna um fleiri hundrað greinar og greinastubbar.





# KORTLEGGING OG EFTIRLIT VIÐ HAVBOTNINUM

**Sjódjóradeildin á Tjóðsavninum hevur í mong ár savnað vitan um botndjóralívið í føroyskum havøki og hevur í hesum sambandi luttikið í stórari fleirtjóða verkætlan um at brúka trolhjáveiðu sum fyrisitingarligt amboð til at verja verndarverd øki á havbotninum í norðurpólshøvum (arktis). Verkætlanin hevur heitið "Long Term Benthos Monitoring (LTBM)"**

Jan Sørensen, savnsvørður

**Í hesum tíðum** við øktum áhuga fyri norðurpólsøkjum og størri fólksligari náttúrutilvitan hevur tað eisini politiskan týdning at vita meiri ítøkiliga, hvussu livandi náttúran hevur tað. Soleiðis er eisini við djóralívinum á havbotninum. Norðurpólshøv eru stórt øki, og framhaldandi eftiransing (monitorering) av djóralívinum á havbotninum er sera kostnaðarmikil og kann tí tykjast heldur ógjørlig.

Ein bólkur av granskarum úr londum við norðurpólshøvum (Noregi, Risslandi, USA, Kanada, Grønlandi, Íslandi og Føroyum) setti sær fyri at kanna møguleikarnar fyri at brúka trolhjáveiðu til at siga nakað um botndjóralívið.

Eftiransing av botndjóralívinum verður vanliga gjørd við grabbasýnum, har alt, sum er størri enn 1 mm, verður kannað (macrofauna). At fylgja gongdini nýtast sýni á hvørjum ári, og stór øki mugu kannast. Hetta ger, at sýnismongdin, og harav kostnaðurin, verður so mikið stór, at tað í veruleikanum ikki ber til.

Allar fiskivinnutjóðir gera árligar yvirlitstrolingar. Vanliga hevur tað bert verið fiskurin, sum hevur verið kannaður, og restin (hjáveiðan) er koyrd á sjógv aftur uttan viðgerð. Um trolhjáveiðan, t.e. alt tað, sum ikki er fiskur, eisini verður kannað, so fæst virðismikil vitan um tey stóru botndýrini (megabenthos), uttan at kostnaðurin verður so stórur.




Trolhjáveiðukanningar verða nú royndar í flestu av londunum við norðurpólshøvini. Havstovan hevur í nøkur ár skrásett hjáveiðu í sambandi við árligu yvirlitstrolingarnar. Hesar upplýsingar hava eisini verið brúktar.

Vitanin frá trolhjáveiðu kann brúkast til at siga nakað um, hvussu botndýralívið er samansett, og hvussu vit á bestan hátt kunnu verja náttúruna á havbotninum móti ymiskum sløgum av hóttanum. T.d. brúka fiskiveiðumyndugleikarnir í Noreg trolhjáveiðudátur úr Barentshavinum at skipa, hvussu loyvt er at fiska. Mett verður, at sum frá líður verða trolhjáveiðuskrásetingar fastur partur av yvirlitstrolingum hjá flestu londum.


Nevhvalurin liggur á lónni á Leynasandi


Nevhvalurin verður tikin upp


Herdis sker upp

# NEVHVALUR Á LEYNASANDI

**Hin 27. februar rak ein nevhvalur (Mesoplodon bidens) upp á Leynasand. Hóast hvalurin var nakað viðtikin og sjónliga rotin, so varð ein roynd gjørd at bjarga beinagrindini. Kvívíkar kommuna hjálpti við at fáa hvalin til høldar, og við tógvið stríð varð hann dragsaður av sandinum við gravimaskinu, lyftur í ein lastbil og koyrdur til Kaldbaks, har hann varð skorin upp**

Jón Aldará, lívfrøðingur

**Nevhvalurin hevði verið** leingi deyður, og kroppurin var so mikið upploystur innan og kjafturin so mikið knústur, at tað bar ikki til at fáa nágreiniilig mát av honum. Tað kundi tó staðfestast, at hetta var ein kvennhvalur, og undir uppskering gjørdist eisini greitt, at hon var kviðin. Ein væl vaksin hvølpur lá væl varðveittur í búkrúminum. Hann var umleið 1,8 metrar langur. Nýlagdir hvølpar eru umleið 2,5 metrar langir, so har var rúm tíð eftir til føðingina.

Alt spik og vevnaður varð skilt frá beinagrindini sum best bar til. Flestu ryggjageislar og øll rivjabeinini fingust leys, men høvd, bøksl og sveiv sita í seigum spiki, sum má rotast burturav.


*Herdis tekur hvølpin úr nevhvalinum*

Alt, sum ikki hevði bein í sær, varð koyrt á brennistøðina, og alt við beini varð lagt í ein kassa við vatni at rota. Vónin er, at tá ið alt er rotað burtur, kann beinagrindin reinsast og setast upp til framsýningar.

Hesin hvalurin var tó í vánaligum líki, og t.d. stendur høvdið neyvan til at bjarga.

Nevhvalur er eitt av nøkrum og 20 hvalasløgum í nevhvalaættini (Ziphiidae), sum eisini fevnir um eitt betur kent slag í Føroyum, nevniliga døgling (*Hyperoodon ampullatus*). Mong av


*Liðugt uppskorið, beinagrindin vinstrumegin og restin høgrumegin*


Nevhvalahvølpurin

sløgunum í nevhvalaættini eru heldur gátufør, og tað er sjáldan, at nevhvalur sæst á sjónum. Tó er tað ikki óvanligt, at teir reka deyðir á land – møguliga tí teir eru komnir á skeiva leið ella eru deyðir nær landi – og er hetta størsta orsøk til ta vitan, sum er tøk um hetta hvalaslagið. Tjóðsavnið eigur beinagrind av einum øðrum nevhvali. Hetta er eisini kvennhvalur, ið varð funnin feskur við Signabø. Hann var 4,64 metrar langur, ið er vanlig stødd á búnum kvennhvali. Kallhvalir eru vanliga nakað størri og kunnu gerast upp til 6,5 metrar til longdar.




*Beinagrindin verður løgd í ein kassa og undir í vatni at rota*



## SJÓEINGLAR

**Í september fóru** fólk at vísa myndir av einum heldur løgnum dýri, sum svam í sjónum. Hesi dýrini vóru um ein til tveir sentimetrar, heldur bleik á liti og høvdu eitt eyðkent hoppandi svimjingarlag.

Hetta vísti seg at vera eitt sjósniglaslag, sum tey á enskum kalla Sea angels. Tað er fyrstu ferð, at vit vita um hesi dýr, men tey eru helst ikki heilt óvanlig um okkara leiðir, tí tey eru skrásett nærhendis Føroyum í GBIF-dátagrunninum. Tað eru tó ábendingar um, at vit liggja eitt sindur í útryðjuni av, hvar tey mest halda til.

Tað eru fýra sløg í hesi slekt (Clione), og hetta slagið, sum er í Føroyum, er helst Clione limacina, sum kann gerast um fimm sentimetrar til longdar.

Hesin snigilin er eitt frábrigdi fyri sniglar, tí hann skríður ikki, men svimur uppi í sjónum – ein uppsjóvarsnigil. Enska navnið sipar til, at hann hevur veingjalíknandi útvøkstir, sum hann brúkar at svimja við. Á føroyskum kundu vit kallað hetta slagið fyri sjóeingil.



Petur Hansen nýtir her neyva 3D skannaran Artec Space Spider at skanna ein formstein

# STEINASAVNIÐ Í KIRKJUBØ 3D-SKANNAÐ OG LAGT ÚT SUM VIRTUELT SAVN

Tjóðsavnið ognaði sær við ársbyrjan tveir handhildnar skannarar til at 3D-skanna forngripir við

**Skannararnir eru sera** neyvir og tí vælegnaðir at skanna gripir við. Í tí sambandi varð eisini online-skeið hildið í at læra at brúka skannararnar.

Fyrsta verkætlanin var at skanna steinasavnið í Kirkjubø. Steinasavnið er fyri tað mesta høgdir ella skapaðir prýðissteinar og byggisteinar, ið eru savnaðir inn kring Múrin í Kirkjubø í 1950-unum. Steinarnir eru heimildartilfar til at loysa gátuna um, hvussu miðaldardómkirkjan varð bygd umleið 1300. Hendan verkætlan gevur almenninginum og granskarum atgongd til at taka hvønn einstaka stein niður mátfast í 3D. Atgeingið til steinasavnið er sostatt munandi bøtt.

Tað er Petur Hansen, MA í fornfrøði, ið hevur skannað og lagt steinarnar út á alnótina fyri Tjóðsavnið. Í alt eru 244 3D-modell í steinasavninum úr Kirkjubø á netinum.




*Steinasavnið kann vitjast her:*
*https://sketchfab.com/Savn/collections/kirkjubmururin-steinasavn*

## TALGILDING AV SKJALAGOYMSLUNI HJÁ SVERRA DAHL

**Sverri Dahl fór** í 1940 undir fornfrøðiligan útgrevstur í Føroyum og var landsantikvarur í tíðarskeiðnum 1952-80. Í sambandi við sítt arbeiði og sínar mongu rannsóknir savnaði hann eina ørgrynni av upplýsingum, og á Tjóðsavninum liggur eftir hann eitt umfatandi savn. Upplýsingarnar eru í ymsum formi: frágreiðingar, viðmerkingar, tekningar, brævaskifti, myndir og avísúrklipp. Tilfarið er skipað eftir staði, tað veri seg til dømis bygd, býlingi ella øki, og síðan eftir evni.

Hetta er sum so ikki eitt alment savn, men eitt arbeiðsamboð við keldutilfari til nýtslu hjá starvsfólkunum á Tjóðsavninum, tó so at í serligum førum kann okkurt av hesum tilfari latast øðrum uttan fyri stovnin. Fyri at lætta um atgeingið til alt hetta tilfarið er tað blivið skannað og talgilt. Hetta arbeiðið bleiv endaliga liðugt í august 2021.






*Skíggjaynd av DIME metaldetektor-skrásetingarskipanini*

# FØROYAR VIÐ Í METALDETEKTOR-SKRÁSETINGA-SKIPANINA DIME

Mong hava sum frítíðarítriv at nýta metaldetektor. Ein metaldetektor er eitt tól, ið verður brúkt til at finna lutir úr metali, bæði í jørðini og á havbotninum. Tað er av stórum týdningi, at rætt verður farið fram, tá ið ein nýtir metaldetektor

**Verður ein forngripur** tikin úr jørðini ella upp av havbotninum, verður hann eisini tikin úr søguliga samanhanginum, hann hoyrir til. Verður forngripurin ikki staðsettur við GPS'ara, er tað ein stórur missur fyri føroyska mentanararvin. Tí skal boðast Tjóðsavninum frá, tá ið komið verður fram á forngripir ella krígsminni.

Tjóðsavnið vil hava gott samband við metaldetektorbrúkarar og kann vegleiða um nýtslu av metaldetektori, skráseting av lutum og staðseting við GPS. Eisini hvussu farast skal fram og um handfaring av forngripum.

Í 2021 fekst so metaldetektor-skrásetingarskipanin DIME at virka í Føroyum. Hetta merkir, at metaldetektorbrúkarar nú við DIME-appini kunnu skráseta knattstøðu og mynd av gripum, teir finna. Fornfrøðingar á Tjóðsavninum kunnu so fylgja við tí, sum verður skrásett í Føroyum, og gera metingar um hvønn einstakan grip. Metaldetektorbrúkarin fær eitt brúkaranavn í DIME, har einans brúkarin og Tjóðsavnið síggja knattstøðuna og matrikulin, har ið gripurin er funnin. Allir brúkararnir kunnu tó síggja myndirnar og lesa søguligu upplýsingarnar um gripirnar. Tjóðsavnið og metaldetektorbrúkarar fáa sostatt eina góða skipan og yvirlit yvir gripirnar og eina skipan, har øll kunnu geva sítt íkast til vitan ella søgu um gripin.

Higartil eru 247 gripir, sum eru funnir í Føroyum, skrásettir í skipanini.

Um ein finnur lutir í jørðini eldri enn 100 ár, sum kunnu metast sum forngripir, er hetta ogn landsins, og ein hevur skyldu at lata teir inn til Tjóðsavnið. Í 2009 varð boðað frá, at krígsminni frá seinna heimsbardaga eru friðað eftir somu lóggávu. Ikki er loyvt at nýta metaldetektor á ella nærhendis einum fornminni uttan við serligum loyvi frá Tjóðsavninum.


Eldri gøta í Ánunum


Leivd av neystagrund í Ánunum


Andras á Lofti skrásetur eina rætt á Glyvursnesi


Andras á Lofti skrásetur eitt gróthús á Glyvursnesi

# FORNMINNA- OG LENDIS-SKRÁSETINGAR Í FØROYUM

Ein týðandi partur av arbeiðinum hjá Fornfrøðideildini á Tjóðsavninum er at skráseta fornminni og mentanarminni í lendinum. Tjóðsavnið hevur, umframt at standa fyri fornfrøðiligum útgrevstrum og rannsóknum, lógarbundna uppgávu at hava eftirlit við jarðføstum fornminnum í Føroyum. Harumframt at hava ein dagførdan fornminnalista

Helgi D. Michelsen, savnsvørður

**Fornminnaskrásetingin hevur verið** partur av arbeiðinum hjá Tjóðsavninum, síðani Fornminnalógin varð sett í gildið í 1948 og Føroya Fornminnissavn sett á stovn í 1952. Fornminna- og lendisskrásetingar í Føroyum eru týdningarmiklir tættir í fornfrøðiliga arbeiðinum, og sum partur av hesum arbeiði hevur tað alstóran týdning at fáa eina heildarmynd av fornminnum í landslagnum. Tað er tí umráðandi, at kend fornminni verða eftirhugd og at tosa við fólk á staðnum um fornminni, um lendið og um ymisk mentanarlig viðurskifti. Við hesum kann Tjóðsavnið vísa greitt á, hvar fornminni eru, og hvørji mentanarlandsløg helst skulu varðveitast.

Fornminna- og lendisskrásetingar verða gjørdar við fornfrøðiligum lendisskrásetingum, har fornminni á fornminnalistanum og ikki áður skrásett fornminni verða lýst og staðsett við GPS'ara, lendisskrásett við dronu og í ávísum førum við georadarakanningum við GPR (stytting fyri *ground penetrating radar*). Eitt GPR-tól mátar frávik í moldini. Hesi frávik kunnu síggjast sum strukturar, til dømis grótlaðaðir veggir ella rennur. Við at nýta dronu til at gera lendisskrásetingar kunnu fornfrøðingar 3D-skráseta toftir og mentanarlandsløg. Soleiðis kann skjalprógvast, hvussu toftir


Fornfrøðiligt eftirlit av Rannvátoft í Skúvoy

og mentanarlandsløg síggja út í dag. Umframt at savna saman staðsetingina av fornminnum er týdningarmikið í hesum arbeiði at miðla og at granska. Í tílíkum førum kunnu vit seta lesandi og granskarar seg ofta í samband við Tjóðsavnið og fáa útvegað ráðgeving og tilfar.

Seinasta árið hevur Fornfrøðideildin havt fornminna- og lendisskrásetingar. Hetta bæði í sambandi við verkætlanina hjá Tjóðsavninum um at gera nágreiniligar lendisskrásetingar í Føroyum og í sambandi við samfelagsútbyggingar. Nakrar av hesum verkætlanum verða umrøddar her.

## VERKÆTLAN HJÁ TJÓÐSAVNINUM, FORNMINNA-SKRÁSETING Í SKÚVOY

**Sum liður í** verkætlanini hjá Tjóðsavninum at gera nágreiniligar skrásetingar í Føroyum gjørdu vit fornfrøðiligar lendisskrásetingar í Skúvoy í september 2021. Í Skúvoy skrásetti Tjóðsavnið fornminni bæði innangarðs og uttangarðs við GPS'ara. Hartil vórðu 3D-skrásetingar gjørdar av erginum Argisá og fornfrøðiligt eftirlit við Rannvátoft og við Ólansgarð. Harumframt vórðu lendisskrásetingar gjørdar í Tjørnudali, inni í Dal og fram


Dronuskráseting í Skúvoy


Toftir í Skúvoy innangarðs


Ból í Sandvík verður skrásett


Eftirlit við ergistoft í Skúvoy


Lendisskráseting í Hvalba í sambandi við tunnilsverkætlan

við sjóvarmálanum tætt við Ólansgarð. Av stórum týdningi í hesi fornminnaskráseting er at savna inn vitan frá fólki, ið kennir mentanarlandslagið á staðnum og tær søgur og staðarnøvn, ið eru knýtt at tí. Á túrinum í Skúvoy vísti Harry Jensen, bóndi, starvsfólki frá Tjóðsavninum runt í bygdini og greiddi frá ymiskum áhugaverdum støðum og hendingum.

## SAMFELAGS-ÚTBYGGINGAR

**Í sambandi við** nýggjar útbyggingar í samfelagnum ger Fornfrøðideildin á Tjóðsavninum fornfrøðiligar lendisskrásetingar. Tað snýr seg millum annað um kanningararbeiði sum partur av nývelting, vegagerð, nýggjar útstykkingar, rør- og kaðalveitir, tunnilsarbeiði og útfylling.

Í sambandi við, at Klaksvíkar kommuna hevur ítøkiligar ætlanir um at útfylla økið fram við sjóvarmálanum í Ánunum við gróti, boðaðu tey Tjóðsavninum frá. Ætlaða útfyllingin er í sambandi við, at kommunan ger útbyggingar av havnarøkinum. Vegna hesa nýggju ætlaðu útfylling var fornfrøðingur á staðnum og gjørdi lendisskrásetingar fram við sjóvarmálanum í Ánunum í mars 2021, har fornminni vórðu skrásett, har ímillum eldri neyst, garðløg, gomul gøta og ból.

Umframt útfylling fram við sjóvarmálanum eru tunnilsverkætlanir stórar samfelagsútbyggingar. Hesar ætlanir hava havt við sær fornfrøðiligar lendisskrásetingar í 2021. Fornfrøðingar hava verið og gjørt forkanningar í Sandoynni, Suðuroy og Skúvoy fyri at gera eina meting av fornminnum í lendinum og mentanarlandslagnum. Her vórðu skrásettar toftir av ymiskum slag, til dømis kráir, bygningar og garðløg.

## GLYVURSNES OG GOLFVØLLURIN

**Í tíðarskeiðinum 6.** september til 27. september 2021 gjørdu fornfrøðingar lendisskrásetingar á Glyvursnesi í sambandi við at víðka og betra um golfvøllin


Hákun Andreasen og Andras á Lofti gera georadarakanningar norði í Forna í Syðrugøtu

á Glyvursnesi. Lendisskrásetingarnar á Glyvursnesi vórðu umbidnar av Tórshavnar kommunu vegna Tórshavnar Golffelag. Endamálið var at skráseta øll mentanarminni, bæði í økinum har golfvøllurin liggur í dag, og í økjunum har ætlanir eru um at víðka hann. Við hesum kanningum fáa Tjóðsavnið og Tórshavnar Golffelag eina neyva skráseting av mentanarminnunum í landslagnum og søgu teirra. Ætlanin er at varðveita nøkur fornminni og lata tey gerast part av endaliga golfvøllinum. Fornfrøðiliga arbeiðið fellur undir ábyrgdarøkið hjá Tjóðsavninum, og skrásetingarnar verða við til at varðveita mentanarsøguna í økinum fyri framtíðina.

## VERKÆTLAN Í SYÐRUGØTU Á TOFTAMØRK, NORÐURI Í FORNA OG Á SANDINUM

**Í samstarvi við** ein áhugabólk í Syðrugøtu hevur Tjóðsavnið gjørt eina verkætlan at kanna ávís lendi, til dømis á Toftamørk, norðuri í Forna, í Lækjutoft og á Sandinum. Ætlanin er at lýsa søguna í bygdini saman við fornfrøðiligum lendisskrásetingum. Tað vórðu gjørdar lendisskrásetingar bæði við dronu og GPR í mai mánað 2021. Mowi Føroyar stuðlar verkætlanini.



# ULL ER FØROYA GULL – NÝGGJ FRAMSÝNING Á TJÓÐSAVNINUM

Á sumri 2021 læt nýggj varandi framsýning upp á Tjóðsavninum. Framsýningin fekk heitið "Ull er Føroya gull" við tí endamáli at lýsa søgur um føroyskan seyð og serstøku ullina úr ymiskum tvørfakligum sjónarhornum sum fornfrøði, fólkalívsfrøði og náttúrusøgu

Rannvá Winkler, savnsvørður

**Samstundis er framsýningin** "Ull er Føroya gull" ein framsýning, har livandi siðaarvurin at virka ull og binda verður fylgdur úr fortíð til nútíð.

## EIN NÝGGJ FRAMSÝNING VERÐUR TIL ...

**Fyrsta uppgávan var** at savna eitt innanhýsis tvørfakligt toymi, sum í samstarvi við stjóran ásetti evnið, uppbygging av framsýningini, uppgávubýti o.s.fr. Henda tilgongdin er mangan drúgv, men hevur alstóran týdning, um ein framsýning skal eydnast væl.

Møguliga eru fleiri, ið meina, at evnið um ull og binding er vatnað út eftirhondini. Hví taka eitt so siðbundið evni upp á eini spildurnýggjari framsýning, ið skal lokka vitjandi inn á savnið?

Søgan er kend, men enn eru nógvar ósagdar søgur um ull, ið ikki eru loystar úr lagdi. Føroyska ullin hevur ikki sama áhuga millum fólk longur, men *søgan* er framvegis gull verd. Hon er spennandi at arbeiða við og livandi enn í dag – bindiklubbar, seyðasýningar, bindingarmynstur, móti og list, kjak um seyðahald og náttúru. Alt hevur sín uppruna í søguni. Hvør veit, um svarið eisini finst har?

Vist er bindingin og bindingarmynstur í hásæti í løtuni, bæði í Føroyum og uttanlands. Føroyskir sniðgevar selja bundin pløgg í eystur og vestur. Men hvar fór føroyska ullin?



*Mynsturgeiri verður settur upp*

## ØÐRVÍSI FRAMSÝNINGARHÁTTUR

**Ætlanin var at** skapa eina framsýning, ið var atkomulig fyri allar samfelagsbólkar. Ein framsýning, ið kundi elva til undran og kjak, nýtast til upplivan og undirvísing.

Krøvini frá vitjandi til savnsvitjanir, framsýningar og tiltøk eru vaksandi, okkara gestir eru tilvitaðir um tað, tey vilja nýta fríløturnar til. Altjóða kanningar gjørdar á søvnum vísa á, at yvir 80% av øllum vitjanum á søvnum eru felagsvitjanir/ sosialar vitjanir. Savnsgestirnir ynskja sær eina uppliving, ið bindur tey saman sum bólk, og setur hugflog og kjak í gongd. Søgurnar skulu vera upplýsandi og viðkomandi.

So einki var at ivast í, her skuldu fleiri broytingar til.

Nýggja framsýningin er grundað á servitan hjá starvsfólkunum á Tjóðsavninum – tó við hjálp frá serfrøðingum uttan fyri stovnin, tá ið tørvur var á tí.

## SAVNSMIÐLAN – EITT HENT AMBOÐ Í FRAMSÝNINGARMENNING

**Fakið savnsmiðlan hevur** seinastu árini tikið dik á seg uttanlands, bæði innan fyri gransking og sum amboð til savnsarbeiði.

Savnsmiðlan er ein tvørfaklig grein av museologi, ið er grundað í fleiri fakum, millum annað námsfrøði, samskifti og miðlan, sálarfrøði, samfelagsvísindum, mentanararvi og søgu.

Henda vitanin um atferð hjá vitjandi á søvnum er ein hollur stuðul, tá ið avgerðir skulu takast um menning av framtíðar framsýningum. Niðurstøðan er, at um eitt savn ikki skilir sínar gestir, verður ilt at koma á mál við viðkomandi og upplýsandi framsýningum.



*Fornfrøðilig seyðabein*



*Eftirgjørd stova frá 90´unum er pallur undir søguni um bindiklubbar*



*Fornfrøðiligi parturin fær skap*

Vit valdu ein nýggjan leist til framsýningina, har hugsað varð um tann vitjandi í valdu framsýningarhættunum. Framsýningunum nýtist ikki at vera einvegis samskifti. Tekstir við opnum spurningum, har møguleiki er til tess, so tann vitjandi kann taka støðu og undrast.

## ER FRAMSÝNINGIN TAÐ BERA GYKLAVERK?

**Stóru montrurnar og** framsýningarskápini eru burtur. Í teirra stað eru eftirgjørd rúm og stovur vorðin karmar um gripir og søgurnar, ið sagdar verða.

At skapa ein samanhang millum lutir og søgu teirra er grundleggjandi, um tann vitjandi skal hava møguleika at "merkja" framsýningina. Tey vitjandi kunnu trína aftur í tíð og síggja autentiskar lutir, meðan tey "uppliva" tað farna. At velja øðrvísi hættir at sýna fram skapar eina framsýning, ið er atkomulig fyri fleiri.



*Eitt væl og virðiliga brúkt eintak av Bindibókini*



*Hondseymaði klæðini at royna eru úr ull og hør. Sniðini eru úr víkingatíð*

Útstappaðan føroyskan seyð og konserverað seyðasparl finnur tú einans á Tjóðsavninum. At síggja djórið, ið ber føroysku ullina, er sjálvsagt. Tað at skilja og síggja hongur hvørt uppi í øðrum.

Einasti trupulleikin var, at Tjóðsavnið ikki átti nútímans seyð at vísa fram ella sparl. Seyðirnir vóru útstappaðir í Danmark, og seyðasparlini hevði starvsfólk á Tjóðsavninum konserverað í Føroyum.

Uttan ull var ongin víkingur. Seglini og klæðini vóru vovin úr tógvi úr seyðaull og vóru grundarlag fyri víkingaferðum. Í víkingatíð átti seyðurin og ullin lívið í fyrstu føroyingunum. Klæðini í framsýningini eru eftirgjørd, so til ber at royna seg sum víking.

## TALGILDIR PALLAR

**Talgilt tilfar hevur** pláss í nýggju framsýningini, men er ikki alráðandi. Tað er við í tann mun, at skermarnir stuðla upp undir framsýningina, antin við filmum ella myndum.

Stóra myndasavnið hjá Tjóðsavninum vísur á broytingar í mótanum í sniðgeving og mynsturbinding. Hetta valdu vit at vísa við at býta øldirnar sundur og fáa hetta talgilt, so tann vitjandi kann blaða ígjøgnum myndirnar.

Tjóðsavnið takkar øllum, ið hava stuðlað framsýningini "Ull er Føroya gull" við vitan, lutum og hjálp.



*Markaði oyru - eftirgjørd á Tjóðsavninum*




*Handilshúsini úti í Klaksvík*



*Innan fyri henda vegg í handlinum fjaldi seg eitt loyndarmál. Aftan fyri 3. reolfakið frá vinstru hómaðist okkurt, sum líktist einum blendaðum duraopi*



*Og soleiðis sá út hinumegin veggin*

# FJALD HURÐ KOMIN AFTURÍAFTUR Í HANDILSHÚSUNUM ÚTI Í KLAKSVÍK

## Í sambandi við málsviðgerð av friðaðum bygningum verður av og á komið fram á okkurt heilt óvæntað

**Tórálvur Weihe, savnsarkitektur**

**2. september 2021 hevði** Tórálvur Weihe frá Bygningadeildini hjá Tjóðsavninum fund við Andras Sólstein frá Norðoya Fornminnasavni í gomlu Handilshúsunum úti í Klaksvík. Her greiddi Andras frá, at ætlanin var at fáa samband millum Gamla Handilin og Gamla Apotekið uppiá. Hetta fer at gera tað einfaldari at hava opið, so ikki verður neyðugt við so nógvum starvsfólkum. Nú Leikalund, sum hevur hildið til í handlinum, er latin aftur, hevur Norðoya Fornminnasavn yvirtikið hølini aftur og ætlar at hava framsýning her.

Vit avtalaðu, at Andras tekur frá í trappurúminum, sum førir upp til apotekið. Og at vit síðani hyggja at, hvørjir møguleikar eru.

14. september boðaði Andras frá, at nú var tikið frá, og at tað vísti seg at vera ein skjótihurð, har blendað var fyri. Hann metti, at henda skjótihurð var nøktandi til at fáa samband millum handilin og trappuna. Hann greiddi frá, at trappan varð gjørd í 1919, og at tað var Magnus á Kamarinum, sum smíðaði hana. Tá hevði toyhandil verið, og trappan hevði samband við, at seymistova var har, sum gamla apotekið nú er. Apotekið er ikki komið fyrr enn um 1930, og reolirnar eru helst væl yngri. Tað er helst, tá ið apotekið er komið, at lokað hevur verið fyri millum handilin og trappurúmið.

Avtalað varð síðani, at roynt skuldi verða at nýta hetta duragap, sum tað var, og ikki gera annað op. Og at skjótihurðin skuldi fáast aftur at virka.

Tá ið vitjað varð aftur 8. november, bar til at síggja framda arbeiðið.

Í gomlum húsum kann vera ringt at rekonstruera allar bygningsbroytingar, sum eru farnar fram gjøgnum tíðina, og tað er væl møguligt, at sambandið millum handilin og seymistovuna uppiá hevur verið skipað øðrvísi enn við hesum duraopi. Hinvegin hevur tað eina søgu í sær sjálvum. Samstundis er sum minst broytt bæði í trappurúmi og handli, og tað mesta av reolini móti vegginum er varðveitt.



*Nærmynd av skjótihurðini*



*Tá ið tikið varð frá, kom henda skjótihurðin undan. Grøni liturin kann vera frá, tá ið seymistova var, og so er restin av trappuni málað útyvir í apotekstíðini ella seinni*



*Og nú er samband aftur millum handilin og apotekið á ovaru hæddini. V.m. Jóannes Stephansson, h.m. Andras Sólstein*



*Bátasmíð er á føroysku skránni Livandi Mentan. Á myndini sæst kendi bátasmiðurin Niclas í Koltri smíða bát í 1968 á verkstaðnum á Heygnum Mikla í Havn*

ADAM WOOLFIT HEVUR TIKIÐ MYNDINA

# UNESCO-SÁTTMÁLIN OG SKRÁIN LIVANDI MENTAN

At menna skránna *Livandi mentan* er ein týdningarmikil liður í arbeiðinum við UNESCO-sáttmálanum

Kristina Djurhuus Christiansen, fólkalívsfrøðingur

**Endamálið er at** lata upp fyri, at føroyingar kunnu seta orð á sín egna siðaarv og á tann hátt tryggja, at siðaarvurin ikki verður gloymdur, men kann halda á í komandi ættarliðum. Harumframt er endamálið at fagna fjølbroytta siðaarvinum í Føroyum og at økja medvitið um týdningin av siðaarvinum fyri samleika, trivnað og vælveru.

Eyðmerking og skráseting av virking av ull, virking av føroyskum klæðum, reinavelting í Koltri, føroysku rossunum og grindadrápi eru viðgjørd gjøgnum árið og eru næstu evnini á skránni í 2022.

## UNESCO-FRÁGREIÐING

**Longu á vári** 2021 vórðu fyrireikingar gjørdar til at skriva eina frágreiðing til UNESCO. Tað er sætta hvørt ár, at limalondini skulu skriva eina frágreiðing, sum kannar eftir, hvussu langt tey eru komin við at seta sáttmálan í verk. Tí varð arbeiðið við skránna *Livandi mentan* seinkað.

Frá mars-apríl skipaði UNESCO fyri einum netbornum skeiði, har øll umboðini fyri limalondini í Evropa luttóku. Her fingu luttakararnar handað tilfar, ráðgeving og venjing í arbeiðsháttum í at savna dátur og í at skriva frágreiðing.

Umboðini fyri Føroyar, Danmark og Grønland hava samskipað arbeiðið við frágreiðingini á netbornum fundum og hvør í sær lagt dent á øki, sum eru viðkomandi fyri einstøku londini. Føroyar eru komnar stutt við at seta sáttmálan í verk, og tí hevur ikki verið møguligt at skrivað eina fullfíggjaða frágreiðing. Hóast tað hevur hetta verið eitt gott høvi til at eftirmeta, hvussu siðaarvurin er samantvinnaður í føroyskum viðurskiftum, og tað er gagnligt í arbeiðinum við sáttmálanum frameftir.

Ríkisfelagsskapurin læt felags frágreiðing inn í desember 2021, sum nú er undir viðgerð í altjóða UNESCO-nevndini.







*Teinaringurin flotaður* MYND: JENS KRISTIAN VANG

# FØROYSKI BÁTURIN INNSKRIVAÐUR Á UNESCO-LISTAN

Tann 14. desember 2021 bleiv føroyski báturin, saman við súðubygdi bátunum í hinum norðanlondunum, innskrivaður á UNESCO-listan fyri umboðandi siðaarv hjá mannaættini

**Tilnevning, sum Føroyar** saman við hinum Norðurlondunum lótu inn í mars 2020, bleiv viðgjørd í altjóða UNESCO-nevndini á árliga fundinum í París.

Innskrivingin á altjóða UNESCO-listan er ein viðurkenning av, at súðubygdi báturin er ein vitnisburður um menniskjalig skapanarevni, og at hetta er siðaarvur, sum eigur at varðveitast. Henda altjóða viðurkenningin fer at økja um tilvitskuna av siðsøguliga virðinum í føroyska róðrarbátinum og setur krøv til okkum sum samfelag um at tryggja føroyska róðrarbátinum framhaldandi lívføri.

Siðvenjur innan bátabrúk liva enn eitt virkið lív í okkara samfelagi gjøgnum kappróður, bátastevnur, kappsigling og ferðavinnuna. Bátafeløg, kappróðrarfeløg, søvn og privatpersónar í øllum Føroyum bera vitanina um bátin víðari. Tó er minkandi talið á bátasmiðum ein trupulleiki fyri framtíðar lívføri hjá føroyska róðrarbátinum. Ein partur av UNESCO-sáttmálanum snýr seg um at verja siðbundið handverk. Lond, sum hava tikið við sáttmálanum, hava bundið seg til at tryggja, at handverkið framhaldandi er til, og at vitanin um handverkið verður borin komandi ættarliðum.

Í sambandi við innskrivingina á UNESCO-listan varð ein lítil framsýning sett upp um føroyskar bátasiðvenjur og um UNESCO-sáttmálan. Eitt alment tiltak um at verja bátin, sum skuldi vera, bleiv útsett vegna koronu.

# ICOM OG FØROYAR

Tað var í 2009, at Føroyar fingu atlimaskap í UNESCO og bundu seg tá til at fylgja altjóða samtyktum hjá UNESCO. ICOM, International Council of Museums, er stovnur undir UNESCO, og í 1946 varð felagsskapurin hjá søvnum stovnaður. Eitt limaland í ICOM hevur eina tjóðarnevnd, sum umboðar altjóða felagsskapin í landinum

Erland V. Joensen, savnsvørður

**Tað er ongin** føroysk ICOM-nevnd, og á aðalfundinum hjá ICOM Danmark í 2017 fingu Grønland og Føroyar sæti í donsku tjóðarnevndini. Listasavn Føroya og Tjóðsavnið eru limir í ICOM gjøgnum donsku tjóðarnevndina.

Men hevur ICOM nakran týdning fyri føroysk søvn, er hetta fjart og ullint, er ein spurningur at seta sær. Og er savnsarbeiði og savnsvirksemi í sjálvum sær so mikið sjálvsagt, at ein altjóða felagsskapur fyri søvn hevur týdning fyri føroysk søvn? Svarið er, at við tað at etisku reglurnar hjá ICOM, 'Code of Etics for Museums', eru týddar til føroyskt og útgivnar, 'Etiskar reglur fyri søvn' (2016), hevur ICOM týdning fyri søvn í Føroyum. Tær eru eitt amboð í dagliga arbeiðinum á søvnum og vegleiðandi fyri virksemið hjá søvnum, fyri søvn og starvsfólk um allan heim, soleiðis sum tað stendur í fororðinum.

Síðan 2017 hava Føroyar altso havt sæti í donsku tjóðarnevndini. Endamálið hjá ICOM Danmark er sum aðrastaðni í heiminum at tryggja, at arbeiðið við varðveiting av náttúru- og mentanararvinum kann fara fram við millumtjóða samstarvi, og at virksemið á søvnum stendur altjóða mát. Tað eru framvegis tær fimm súlurnar: innsavning, skráseting, varðveiting, gransking og miðlan, sum eru knýttar saman og mynda virksemið hjá søvnum.

Nevndararbeiðið í 2021 var nógv merkt av koronu, men fleiri netfundir vórðu hildnir. Aðalregluverkið hjá ICOM er nettupp tær etisku reglurnar hjá ICOM. Tær verða brúktar í iva- og stríðsmálum, sum tíðum verða viðgjørd í tjóðarnevndum. Tað kunnu vera vinnulig mál á søvnum, sum eru á markinum fyri, hvat eitt savn kann loyva sær, og sum søvn av óvart ikki hava hugsað um; spurningar um handil av lista-, náttúru- og mentanarsøguligum gripum og tilfari; um hvønn leiklut søvn hava í samfelagnum og ikki minst yrkisliga atburðin hjá starvsfólki á søvnum.




Aftur at tjóðarnevndum eru aðrar nevndir í ICOM. Har samstarva søvn og starvsfólk á søvnum tvørtur um landamørk við sínum ymsu sergreinum og áhugamálum. Í ICOM eru eisini landssambond, sonevndar regional alliances. Í nøkur ár hevur verið arbeitt við norðurlendskum samstarvi, og í 2020 eydnaðist at fáa í lag 'Nordic Regional Alliance' – ICOM Nord, ein samgonga, sum starvsnevndin í ICOM góðkendi. Ætlanin var at hava fund í Føroyum, men korona hevði við sær, at fundurin varð av ongum. ICOM Nord fer at taka lut á komandi ICOM-aðalráðstevnuni í 2022.


Ein frílota frá nevndarfundinum í Ribe í september 2021


Frá aðalfundinum á savninum Køn í Aarhus í november 2021

Eitt tað størsta arbeiðið í 2021 í tjóðarnevndum um allan heim var at orða eina nýggja allýsing fyri søvn – ICOM Museum Definition. Á ICOM-aðalráðstevnuni í 2019 í Kyoto var galdandi 2007-allýsingin á skránni. Her er hon á enskum:

*A museum is a non-profit, permanent institution in the service of society and its development, open to the public, which acquires, conserves, researches, communicates and exhibits the tangible and intangible heritage of humanity and its environment for the purposes of education, study and enjoyment.*

Á aðalráðstevnuni í Kyoto var eitt broytingaruppskot lagt fram. Tað skuldi eftir ætlan samtykkjast. Her er allýsingin eisini á enskum:

*Museums are democratising, inclusive and polyphonic spaces for critical dialogue about the pasts and the futures. Acknowledging and addressing the conflicts and challenges of the present, they hold artefacts and specimens in trust for society, safeguard diverse memories for future generations and guarantee equal rights and equal access to heritage for all people.*

*Museums are not for profit. They are participatory and transparent, and work in active partnership with and for diverse communities to collect, preserve, research, interpret, exhibit, and enhance understandings of the world, aiming to contribute to human dignity and social justice, global equality and planetary wellbeing.*

Broytingaruppskotið var tó ikki samtykt, og hildið varð fram við einari tilgongd undir leiðslu av einum altjóða arbeiðsbólki, ICOM Define, sum hevði eitt stórt úrval av hugtøkum, sum limirnir í m.a. ICOM Danmark og tjóðarnevndin hava viðgjørt og vigað, fyri síðan at senda tey inn aftur til omanfyri nevnda arbeiðsbólk.

Her kann ICOM gera mun fyri føroysk søvn, tí hvat er eitt savn, hvat er at leggja dent á, hvussu síggja vit okkum sum savn, og fyri at velja burturúr rúgvuni, hvat gera vit á einum savni, hvat er veruliga verkið og virkisøkið á einum savni:

*gransking, varðveiting, læring, innsavning, samskifti, tulking, skjalfesting, atgeingi, søgukynstur?*

Hvat myndar eitt savn, er tað:

*tænasta, vitan, framsýning, vísindi, útbúgving og læring, undirhald, upplýsing, samstarv, luttøka, varðveiting av náttúru og mentan?*

Uppskot til endaliga orðing av allýsingini hjá ICOM fyri søvn fer til tjóðarnevndirnar á vári 2022. Eftir ætlan skal arbeiðið leggjast fram á ICOM-aðalráðstevnuni í døgunum 20.–28. august 2022 í Prag.

ICOM Danmark hevði nevndar- og arbeiðsfund í Ribe á Ribe Kunstmuseum í døgunum 30. september - 1. oktober 2021. Aðalfundurin var á savninum KØN – Gender Museum Denmark í Aarhus – tann 29. november 2021. Hann var nógv seinkaður av koronu. Aðalfundur eigur at verða hildin um várið.

Nevndin fyri ICOM Danmark er: Johan Møhlenfeldt Jensen, Museum Vestfyn, formaður, Christine Løventoft-Jessen, Museet for Religiøs Kunst, skrivari, Josephine Nielsen-Bergqvist, Ribe Kunstmuseum, kassameistari. Nevndarlimirnir eru: Tine Bagh, Ny Carlsberg Glyptotek, Søren La Cour Jensen, Industrimuseet Frederiks Værk, Anna Maria Indrio, Akademirådet, Erland Viberg Joensen, Tjóðsavnið, Kirstine Eiby Møller, Nunatta Katersugaasivia Allagaateqarfialu, Lene Skodborg, Kulturmiljøer i Københavns Omegn, og Anne Katrine Gjerløff, Statens Naturhistoriske Museum, er tiltakslimur.

Ein allýsing hjá ICOM fyri søvn kann tykjast langrøkjut og pjakut, men kann kortini brúkast hjá avvarðandi myndugleika, sum varðar av føroyskum søvnum, at seta út í kortið, hvussu søvn í Føroyum kunnu virka frameftir.

Listasavn Føroya og Tjóðsavnið eru limir, men tað eru fáir føroyskir persónligir limir í ICOM.



Erland Viberg Joensen greiðir frá á Planinum við Áir

# FÓLKALÍVSDEILDIN VIÐ Á AÐALFUND HJÁ GRINDAMANNA-FELAGNUM

**Tann 17. apríl** vóru savnsvørðirnir Erland Viberg Joensen og Kristina Djurhuus Christiansen bodnir við til aðalfundin hjá Grindamannafelagnum. Fundurin varð hildin í skúlanum hjá Dugna við Áir.

Erland Viberg Joensen greiddi frá hvalastøðini við Áir. Aftan á frágreiðingina vísti hann fundarluttakunum runt í teimum gomlu bygningunum har.

Á várið 2021 byrjaði gongdin við at skriva eitt uppskot um grindadráp og grind til skránna Livandi mentan. Í tí sambandi greiddi Kristina Djurhuus Christiansen frá UNESCO-sáttmálanum, frá siðaarvi og grindadrápi á skránni Livandi mentan.



*Porkeris Kirkja stendur sera lágt í mun til vegin omanfyri. Har er tí torført hjá rørslutarnaðum at koma í kirkju. Kirkjuráðið ynskir nógvar broytingar, m.a. at lyfta kirkjuna upp og at leingja kirkjuna, so pláss verður til vesi, og rúmligari verður í forkirkjuni*



*Kirkjan í Kaldbak stendur sera vakurt í lendinum. Kirkjuráðið har hevur ynski um at fáa vatn inn í kirkjuna, vesi í forkirkjuna og at byggja kirkjuhús nærhendis kirkjuni*



*Fornminnisnevndin vitjaði í Funningi ein góðan summardag. Kirkjuráðið í Funningi hevur ætlanir um at byggja lítið úthús uttan fyri vestara skjøldurin á kirkjuni. Í úthúsinum skal gerast vesi og rúm til urtagarðsamboð*



*Nevndin og onnur við neystatoftirnar í Fiskimøl sunnan fyri Haraldsund. F.v. Tórálvur Weihe, savnsarkitektur, Poul Jacob Poulsen, borgarstjóri, Andras Sólstein, leiðari á Norðoya Fornminnissavni, Helgi Michelsen, leiðari á fornfrøðideildini á Tjóðsavninum, Julianna Klett, nevndarforkvinna, og Jóhann Laksáfoss, nevndarlimur og arkitektur*

# FORNMINNIS-NEVNDIN 2021

**Fornminnisnevndin hevði aftur** í 2021 eitt virkið ár. Fornminnisnevndin viðger øll mál um friðaðir bygningar og fornminni. Serliga nógv mál eru í sambandi við friðaðu kirkjurnar. Gomlu kirkjurnar skulu haldast við líka, og harafturat eru ofta ynski frá kirkjuráðunum um at fremja ymiskar batar, t.d. gera vesi og konfirmantstovur, men eisini at betra atgongdina fyri rørslutarnað. Í sambandi við mál um friðaðu kirkjurnar var Fornminnisnevndin í Porkeri, Bø, Kaldbak og Funningi.

Fornminnisnevndin hevði fundir við ein festara í Kirkjubø í sambandi við ætlanir á festinum at betra um umstøðurnar hjá ferðafólki og øðrum vitjandi. Nevndin vitjaði eisini nakrar neystagrundir sunnan fyri Haraldssund, sum bygdarfólkið hevur hug at hampa um ella byggja upp aftur. Eisini var fundarvirksemi í sambandi við tilmælið, sum landsstýrismaðurin fekk í 2020 um at friða sanatoriibygningarnar og tað, ið hoyrir uppí, í Hoydølum.

Í Fornminnisnevndini sita Julianna Klett, nevndarforkvinna, Jóhann Laksáfoss og Herleif Hammer.




# JÁKUPBJØRG LAMBAA Í STARVSVENJING Á TJÓÐSAVNINUM






**Í heyst var** Jákupbjørg Lambaa í starvsvenjing á Tjóðsavninum. Jákupbjørg lesur religiónsvísindi á fjórða lestrarári á Syddansk Universitet í Odense. Hon ynskti at koma í starvsvenjing á Tjóðsavninum, tí at hon hevur áhuga fyri søvnum og savnsmiðlan. Endamálið við starvsvenjingini var at menna ein faldara til framsýningina í Brekkutúni. Í tí sambandinum gjørdi hon ein faldara, ið snúði seg um gerandisdag og átrúnað í víkingatíð. Faldarin verður at síggja á framsýningini á Tjóðsavninum.







Leygardagin 17. juni var drotningin og vitjaði á Toftum. Her er hon uttan fyri Fríðrikskirkjuna og hevur føðingardagsgávuna í sjalinum



Upprunaprónurin er úr bronsu. Hann varð framleiddur í Írlandi í 10. øld og er uml. 15 cm langur. Her síggjast báðir prónarnir lið um lið

# 80 ÁRA FØÐINGARDAGSGÁVA TIL DROTNINGINA

Veturin 2019 varð skipað eitt samstarv millum Løgmansskrivstovuna, UMMR og Tjóðsavnið at gera hugskot til eina føðingardagsgávu til hennara hátign Drotning Margrethu

**Eftir at hava** viðgjørt fleiri uppskot varð avgjørt, at drotningin skuldi fáa eitt hondgjørt kopi av serstaka prónínum, sum varð funnin í útgrevstrinum hjá Sverra Dahl í Tjørnuvík í 1950-árunum. Drotningin hevur stóran áhuga fyri fornfrøði og vitjaði grevsturin í 1971, har m.a. Sverri Dahl vísti runt. Tí varð hildið, at hesin ringprónur var ein góð og serstøk gáva til drotningina.

Heitt varð á smúkkusniðgevan Katrina Andreasen um at standa fyri arbeiðinum. Hon hevur drúgvar royndir at stoypa og tilevna smúkkur. Til at leggja prónin í varð gjørd ein serlig eskja. Tilfarið til eskjuna var rekaviður úr grann. Inni í eskjuni var tøvd ull tilevnað, har prónurin skuldi liggja í. Sigmund Sørensen, snikkari, gjørdi eskjuna, og Ása Hátún tilevnaði tøvdu ullina. Ein skreytfaldari varð eisini framleiddur og lagdur í eskjuna. Í faldaranum varð greitt frá grevstrinum í Tjørnuvík og sjálvum ringprónínum. Eisini vóru myndir frá vitjanini hjá Margrethu krúnprinsessu í Tjørnuvík í 1971 og ein stutt frágreiðing um smúkkusniðgevan.

Ætlanin var, at løgmaður og løgtingsformaður skuldu geva hennara hátign gávuna á hátíðarhaldi í sambandi við ætlaða føroyavitjan summarið 2020, men sum kunnugt varð drotningarvitjanin útsett til 2021. Tískil varð gávan ístaðin handað við hátíðarhald í Tinganesi 15. juli 2021.



Súsanna Joensen, konservator, greiðir Hennara Hátign frá gávuni. Aftan fyri hana standa Bárður á Steig Nielsen, løgmaður, og Jógvan á Lakjuni, løgtingsformaður



Urtagarðsfólk hjá Hjálpirót røktu í 2021 urtagarðin fyri Tjóðsavnið

# URTAGARÐURIN Í SANDAGERÐI

**Í 2021 fekk** Tjóðsavnið uppgávuna at halda urtagarðin, ið hoyrir til prestagarðin í Sandagerði. Áðrenn hetta var tað Landsverk, ið hevði uppgávuna. Hetta er ein søguligur urtagarður við meira enn 70 plantusløgum, harav fleiri eru sera sjáldsom. Urtagarðurin er friðaður og er partur av økisfriðingini í Sandagerði. Ætlanin er at føra garðin aftur í upprunastand, tá ið fíggjarligir møguleikar loyva tí. Inntil tá verður urtagarðurin hildin við líka, so hann ikki ferst. Hóast garðurin í dag ikki er eins stórbærur, og hann einaferð var, so er hann kortini eina vitjan verdur.





Helena Lassen, savnsvakt, handan móttøkudiskin í framsýningarhølunum í Brekkutúni 6 í Hoyvík

# SAVNSBÚÐIN

**Seinastu árini hevur savnsbúðin á Tjóðsavninum verið fyri nógvum broytingum. Úrvalið er vorðið væl størri, og nýtt innbúgv er sett upp til at húsa øllum vørunum. Dentur verður lagdur á, at flestu vørurnar, ið verða seldar, hava eitthvørt tilknýti til savnið ella føroyska søgu, mentan og lívfrøði**

Helena Lassen og Solveig Hansen, savnsvaktir

**Talan er um** alt frá bókum, magnetum, seyðaskinnum, smúkkum, prýðislutum og øðrum smátingum, ið fáast til keyps. Merkir, ið verða seld, eru millum onnur Undirgrund, Sólja Glas, Shiisa Brand, Faroe Sheep, Look North, Great Greenland v.m.

Tjóðsavnið framleiðir eisini sínar egnu vørur, ið bert fáast til keyps í savnsbúðini. Eitt nú kunnu nevnast tær prýðiligu jólakúlurnar við føroyskum bindimynstrum, ið hava verið sera væl umtóktar, bæði av føroyingum og útlendingum.

Ein nýggj jólakúla verður framleidd hvørt ár, og tær eru til keyps alt árið. Av øðrum vørum, ið verða framleiddar, kunnu nevnast krúss, magnetir, keypstaska og ryggsekkur úr endurnýttum tilfari, eins og t-shirts o. a. – alt við føroyskum motivum.



Fjølbroytta úrvalið í savnsbúðini endurspeglar breiða virksemið hjá savninum

Kundaskarin í savnsbúðini er stórur og breiður, og her koma bæði børn og vaksin, ung sum gomul, útlendingar og innlendingar. Ørindini eru ymisk, alt eftir hvat høvið er. Væl dámdar vørur hjá børnunum eru putlispøl og havdjóraleikur, meðan tey vaksnu keypa nógv plakatir, bøkur og prýðislutir. Ferðafólkum dáma sera væl lundar, postkort og serviettar við føroyskum motivum.

Savnsbúðin er opin, tá ið framsýningin er opin. Tað kann verða hent hjá teimum, ið standa og mangla eina gávu ein sunnudag, tí her er altíð opið í vikuskiftinum. Tað ber eisini til at ringja á tlf. 318076 og spyrja okkum um eitthvørt viðvíkjandi framsýningini ella sølubúðini.



Umboð fyri føroysku UNESCO-tjóðarnevndina og Uttanríkis- og mentamálaráðið á norðurlendskum UNESCO-fundi í Ålesund. (Eilif Gaard, stjóri í Havstovuni, Margretha Jacobsen, fulltrúi í Uttanríkis- og mentamálaráðnum, Herleif Hammer, stjóri á Tjóðsavninum, Annika Smith, landsbókavørður, Torkil V. Rasmussen, deildarstjóri í Uttanríkis- og mentamálaráðnum, og Armgarð Weihe, fulltrúi í Uttanríkis- og mentamálaráðnum.)



Hóast vit vóru komin út móti endanum á september mánaði og hóast Covid-19 var fitt av ferðafólki í stórfingna Geirangerfjørðinum, millum annað hetta risastóra ferðamannaskipið



Fiskerimuseet í Ålesund. Vøkru bygningarnir, sum hýsa savninum, eru frá seinnu helvt av 19. øld. Teir vórðu fyrr nýttir til fiskiídnaðin í býnum. Bygningarnir vóru nakrir av fáum, sum sluppu undan altoyðandi eldsbrunanum, sum herjaði Ålesund í 1904

# NORÐURLENDSKUR UNESCO-FUNDUR Í ÅLESUND

20.-23. september 2021 hittust norðurlendsku UNESCO-nevndirnar og umboð fyri avvarðandi norðurlendsku ráðini til árligan fund. Stívliga 70 luttakarar vóru úr øllum norðurlondunum, tó ikki úr Grønlandi

**Á fundinum varð** skift ímillum at arbeiða í plenum og at arbeiða í smærri evnisbólkum. Eitt av høvuðsevnunum á fundinum var at fyrireika norðurlendska íkastið til UNESCO-aðalfundin, sum skuldi vera í París seinni á árinum. Annars varð arbeitt við heimsarvssáttmálunum innan fyri náttúru, mentan og livandi siðaarv. Í hesum sambandi varð vitjað á Geirangerfjørðinum, sum er á heimsarvslistanum hjá UNESCO, og har nærum ein millión ferðafólk vitjar um árið.

Umboðini í føroysku sendinevndini luttóku í evnisbólkunum Sciences, útbúgving, mentan, samskifti og kunningartøkni. Fyri føroyska íkastinum í plenum stóð Armgarð Weihe, sum er aðalskrivari hjá føroysku sendinevndini. Hon greiddi fundinum frá, hvussu vit í Føroyum arbeiddu við UNESCO, og hvussu Føroyar høvdu skipað seg undir Covid-19 farsóttini. Vegna Føroyar gav Armgarð norsku vertunum bókina "Havið", sum Listasavnið fyri kortum hevur givið út.




Janus Hansen, deildarleiðari, hevur framløgu um Koltur



Janus Hansen hevur framløgu um drunnhvítan í Koltri



Frá vinstru Eva, lesandi á Setrinum, og fýra lívfrøðingar, Kolbrún, Agnes, Janus og Jón

# TJÓÐSAVNIÐ TIL ÍSLANDS Á LÍVFRØÐIRÁÐSTEVNU

**Fýra lívfrøðingar á** Tjóðsavninum fóru til Íslands á lívfrøðiráðstevnu miðskeiðis í oktobur. Ráðstevnan, sum verður hildin annaðhvørt ár, er karmur um vísindaligar framløgur og veggjaspjøldur, har lívfrøðingar kunnu vísa fram kanningararbeiði sítt.

Eisini føroysku lívfrøðingarnir høvdu framløgu um tað náttúruvísindaliga arbeiðið, sum Tjóðsavnið tekst við. Agnes Kreiling hevði framløgu við heitinum: "Capturing the terrestrial invertebrate fauna on the island of Koltur, Faroe Islands". Agnes var eisinin partur av vísindanevndini fyri ráðstevnuna. Janus Hansen legði fram um drunnhvíta. Framløgan hevði heiti: "European storm-petrels in the Faroes: Livestream and survey".

Til ber at fylgja við drunnhvítabølinum í Koltri á youtube, og meira vitan um Koltursverkætlanina kann finnast á https://www.tjodsavnid.fo/natturan-i-koltri.

Sum heild var ráðstevnan væleydnað og endaði við einum hátíðarhaldi við ábiti, konsert og dansi. Tað er íslendska lívfrøðifelagið, sum skipar fyri ráðstevnuni, og næsta ráðstevna verður í 2023.

Les meira um lívfrøðiráðstevnuna á http://biologia.is/radstefnur/



Agnes Kreiling leggur fram um Koltursverkætlanina



Vistfræðifelag Íslands

# TJÓÐSAVNIÐ Á ÁRLIGU RÁÐSTEVNUNI HJÁ VISTFRÆÐIFELAG ÍSLANDS

## Fýra av lívfrøðingunum á Tjóðsavninum luttóku á árligu ráðstevnuni hjá Vistfræðifelag Íslands 16.–17. apríl 2021. Orsakað av koronu var ráðstevnan netborin, men við 160 luttakarum var hon væl størri enn undanfarin ár

**Á ráðstevnuni vóru** 10 fundir við samanlagt 57 munnligum framløgum og 17 spjaldraframløgum. Evnini vóru alt frá atburði hjá fiski til trýst av djórabiti á subarktiskar vistskipanir. Harumframt var ein serfundur um innslødd plantusløg við einum serfrøðinga pallborðskjaki. Ískoytið hjá Tjóðsavninum var eitt veggjaspjaldur við heitinum "The beetle fauna of the island of Koltur and a new record for the Faroe Islands" (Klukkur í Koltri og eitt nýtt slag fyri Føroyar).

Ráðstevnan var gevandi og var eitt frálíkt høvi til at koma á tal við yrkisfelagar í Íslandi og øðrum Norðurlondum.

Vistfræðifelag Íslands, VistÍs, er partur av Nordic Society Oikos, sum er felagsskapur fyri vistfrøðingar í Svøríki, Noregi, Danmark, Finnlandi og Føroyum. Felagsskapurin eigur og útgevur fleiri vísindalig tíðarrit, og heimasíðan er www.nordicsocietyoikos.org.






Orsaka av koronustøðuni var møtt til ráðstevnuna online heima í stovuni, heldur enn í Íslandi





Olavsstøtta" frá 1807. Minnismerkið yvir deyða Ólavs Halga 29. juli 1030 er elsta minnismerki í Norra. Undir seinna heimsbardaga tóku nasistarnir minnismerkið niður og settu í staðin upp 9 metra høgan obelisk við kringliggjandi múri og stórari trappu. Eftir kríggið varð minnismerkið hjá nasistunum tikið niður og upprunaligu stúttan sett upp aftur



Ein partur av ráðstevnuni var í Falstad Center og museum. Undir kríggnum var hetta fangalega hjá nasistunum í Norra. Á myndini sæst minnistalva við nøvnunum á teimum, sum vórðu myrd í leguni

# NORÐURLENDSK SAVNSRÁÐSTEVNA Á STIKLASTØÐUM

## 16.–18. september skipaði *Nordisk Museumsforbund* fyri norðurlendskari savnsráðstevnu. Ráðstevnan varð hildin á Stiklastøðum innast í Tróndheimsfjørðinum. Karmurin um ráðstevnuna var *Stiklestad Nasjonale Kultursenter*, ið er ein stórur ráðstevnudepil við síðuna av *Stiklestad Kulturhistoriske Museum*

**Umleið 100 luttakarar** vóru úr flestøllum Norðurlondunum, tó var Grønland ikki umboðað hesa ferð orsakað av koronustøðuni í Grønlandi. Heitið á ráðstevnuni var: *Kultur og krise – museum og samfunn i møte med ekstreme situasjoner*. Undir hesum heiti var ráðstevnan býtt í fimm undirevni: 1. "Kriser og kollektiv erindring", 2. "Krisens samfundsavtrykk", 3. "Museum i krisetid", 4. "Museer som demokratisk arena i ekkokamrenes tid", 5. "Kriser og langsiktige konsekvenser.

Dentur var lagdur á, hvussu søvn gera, tá ið tey uppliva ekstremar støður ella arbeiða við ekstremum evnum. Hetta var eitt sera vítt øki, og fyrilestrarnir vóru sostatt sera ymiskir. Fyrilestrarnir vóru 13 tilsamans. Sera áhugaverdur var fyrilesturin hjá Thomas Block Ravn, stjóra í Den gamle By í Aarhus. Hann tosaði um, hvussu koronastøðan hevði ávirkað savnið. Ágústa Kristófersdóttir, goymsluleiðari á Tjóðminjasafn Íslands, greiddi frá ógvusliga skriðulopinum, sum rakti Seydisfjørð í 2019 og fullkomiliga knústi fleiri av søguligu bygningunum og goymslunum hjá lokala savninum har. Eisini vóru luttakararnir bergtiknir av fyrilestrinum hjá Kathrin Pabst frá Vest-Agder Museet í Kristiansand. Hon greiddi frá einari stórari verkætlan, har kannað var, hvussu stór menniskjalig trauma, so sum Holocaust og kríggið í Bosnia, kunnu arvast niður gjøgnum fleiri ættarlið. Herleif Hammer, stjóri, stóð fyri føroyska ískastinum á ráðstevnuni. Tað snúði seg um, hvussu veðurlagsbroytingarnar og veðrið sum heild er ein hóttan móti forminnunum í Føroyum.



*Vitjað varð eisini á Ringve Museum, sum er eitt savn við tónleikaljóðførum. Bygningarnir eru frá miðskeiðis í 19. øld*



"Stiklestad Nasjonale Kultursenter" í sólsetri. Aftarlaga á myndini sæst Stiklestad Kyrka bygd uml. 1180





Á kunningarfundi



Bevaringscenter Sønderjylland uttan. Mynstur er gjørt í betongið, so tað líkist einum bindingsverkshúsi



Inni á goymsluni í Bevaringscenter Sønderjylland

# KUNNINGARFUNDUR HJÁ ORGANISATIONEN DANSKE MUSEER

Í døgunum 17.-18. november vóru sjey av starvsfólkum savnsins á Kultur-, naturhistorisk og kunstfagligt orienteringsmøde 2021 í Vejle

Guðrið Poulsen, savnsteknikari

**Organisationen Danske Museer** (ODM) hevur í meira enn 50 ár skipað fyri einum árligum kunningarfundi fyri savnsfólk úr øllum ríkinum. Fundurin er eitt gylt høvi hjá fakfólkum á teimum ymsu savnsøkjunum at hittast, men eisini at fáa íblástur gjøgnum fyrilestrarnar, sum verða hildnir. Fakøkini eru býtt í hesar bólkar: Forsøgulig fornfrøði, miðaldar og søgulig fornfrøði, mentanarsøga í nýggjari tíð, konserveringsbólkurin, framsýningarbólkurin, náttúrusøguligi bólkurin og listafakligi bólkurin.

480 luttakarar vóru teknaðir til ársins kunningarfund. Orsakað av koronu var eingin kunningarfundur í 2020, tískil kann hugsast, at hetta var orsøkin til stóru luttøkuna á ársins fundi. Korona gjørdi enn um seg, so allir luttakarar skuldu vísa galdandi koronupass.

Vanliga verður skipað fyri einari fakliga viðkomandi útferð. Hon plagar at vera stílað til ein bólk, men í ár var fyrsta tvørfakliga útferðin. Leiðin gekk suður til Rødekro, har tey, sum høvdu hug, sluppu at vitja nýbygda Bevaringscenter Sønderjylland hjá Museum Sønderjylland. Savnsleiðarin Axel Johnsen greiddi frá bakgrund og hugsjónum fyri



Konserveringin í Bevaringscenter Sønderjylland

nýggja byggjarínum hjá savninum. Eisini varð víst runt í arbeiðshølunum, sum fevndu um móttøku, karantenu (gripirnir verða viðgjørdir fyri sopp og skaðadjór), skráseting, konservering og goymslu.

### KVEIKINGARFERÐ Í ODENSE OG KEYPMANNAHAVN

**Dagarnir rundan um** kunningarfundin hjá ODM vórðu brúktir at vitja søvn í Odense og Keypmannahavn. Somu sjey starvsfólk, sum vóru á kunningarfundi, vóru á kveikingarferð.

Eftirsum kunningarfundurin hjá Organisationen Danske Museer var mitt í viku, lá væl fyri at skipa fyri eini kveikingarferð í døgunum rundan um fundin. Hugskotið var at fáa íblástur til komandi framsýningar á Tjóðsavninum.

Vit vitjaðu bæði privat og almenn søvn við ymiskum temum. Vit høvdu gjørt av frammanundan, hvørji søvn skuldu vitjast. Hóast vit kundu fingið rundvísingar og prát við samstarvsfelagar, valdu vit at uppliva søvnini sum vanlig vitjandi. Vit vildu sjálv uppliva framsýningarnar fyri óávirkað at uppliva og meta um, hvat riggaði og ikki.

Á fyrra degnum av kveikingarferðini, 16. november, vitjaðu vit søvn í Odense. Dagurin var væl lagdur til rættis, fyri at vit kundu náa at vitja søvnini Tidens Samling, Møntergården, H. C. Andersens Hus og Danmarks Jernbanemuseum. Vegna koronu var avmarkað atgongd á summum av søvnunum í Odense, og allastaðni skuldu vit vísa koronupass. Á teimum søvnunum, ið høvdu avmarkaða atgongd, máttu vit bíleggja pláss frammanundan fyri at sleppa at vitja.

H. C. Andersens Hus var stutt síðan latið upp í nýggjum hami. Japanski arkitekturin Kengo Kuma hevur teknað tað, og japanski stílurin eyðkennir húsið. Framsýningin var tó ikki heilt liðug, so vit fingu tíverri ikki ta fullfíggjaðu upplivingina. Stórur partur av upplivingini var tongd at ljóði, men tey høvdu ikki fingið oyralurtini, tá ið vit vóru og vitjaðu.

Vit endaðu vikuna við einum kveikingardegi í Keypmannahavn tann 19. november. Henda dagin var skráin eisini pakkað. Vit vitjaðu Københavns Museum, Nationalmuseet, Magasin du Nord Museum og Davids Samling. Serliga stórur áhugi var fyri at síggja framsýningina Togtet, ið er nýggjasta framsýningin hjá Nationalmuseet. Hon fekk nógva umrøðu til ODM. Tað er ein stór framsýning um víkingaherferðir. Søgan verður fortald á siðbundnan hátt, men eisini við hjálp frá nýmótans tøkni.

Samanumtikið ein hendingarík og lærurík vika í Danmark.



Ferðalagið uttan fyri Nationalmuseet. Frá vinstru Ann Sølvia, Hákun, Tórarinn, Rannvá, Kristina, Súsanna og Guðrið



Prinsessan á ertini



H. C. Andersens Hus






Tað sæst aftur í býarmyndini, at á leið 70% av teimum vitjandi á H. C. Andersens Hus koma úr Kina



Møntergården. Køliskáp gjøgnum tíðirnar



Tidens Samling: Á hesum savninum er loyvt at nerta við allar gripirnar. Tað kann vera trupult at fara tvørtur um tað markið hjá tí, ið ikki er vanur at gera tað á eini framsýning. Børnini, ið vitjaðu savnið samstundis sum vit, elskaðu savnið, spældu og livdu seg inn í tað. Hetta er annars 50'ara stovan

Tidens Samling sýnir lutir frá 1900 til 2000. Hetta er 70'ara stovan



Agnes Kreiling skrivar spjøldur til sýnini




"Tvíveingjur eru framtíðin"



Janus Hansen in action – savnar tvíveingjur við glúpi



Innsavning av tvíveingjum í skógi

# TVÍVEINGJA-SKEIÐ Í NOREGI

Tveir av lívfrøðingunum á Landdjóradeildini, Leivur Janus Hansen og Agnes Kreiling, luttóku á skeiðinum "Biosystematics, ecology and applied science of flies and midges (Insecta: Diptera)", sum ForBio (Forskerskole i Biosystematikk) og Svenska Artprojektet skipaðu fyri

Agnes Kreiling, lívfrøðingur ph.d.

**Skeiðið varð hildið** frá 6. til 13. august 2021 í vakra umhvørvinum við Sletvik rannsóknarstovuna hjá NTNU, umleið tveir tímar uttan fyri Trondheim. Her var ein lítil bólkur av eldhugaðum luttakarum savnaður, og teir fingu nógv burturúr undir umsjón av sera væl skikkaðum vegleiðarum: Elisabeth Stur, Torbjørn Ekrem og Frode Ødegaard (frá NTNU University Museum í Trondheim), Patrycju Dominiak (Tromsø Universitet) og Thomas Pape (Statens Naturhistoriske Museum í Danmark).



Eyðmerking av tvíveingjum

Tímatalvan var tætt pakkað við framløgum, innsavningartúrum og drúgvum kvøldum framman fyri mikroskopið. Evnini fevndu víða, frá ættarmenning og skipanarfrøði hjá tvíveingjaættum til vistfrøði og enntá rættartvíveingjafrøði (t.e. forensic dipterology). Høvuðsmálið var tó, at luttakararnir skuldu kenna teknikkir í sambandi við vísindaliga innsavnan og varðveitslu av flugum og mýggjum og ikki minst venjingar í at flokka tey í ættir.

Tvíveingir er tann djórahópur, sum tað eru flest sløg av á landi í Føroyum. Her eru skrásett 366 sløg í 45 ættum. Væntandi verða fleiri sløg løgd afturat, nú savnið fer at gera meira við henda bólkin av skordýrum. Hetta fer eisini at gera okkum betur før fyri at svara, tá ið flugur og mýggj verða send inn frá almenninginum. Í so máta var skeiðið stak gevandi og ikki einans í sambandi við bøttar førleikar til eyðmerking av tvíveingjum, men eisini tí hetta var eitt gott høvi at hitta møguligar samstarvsfelagar og fólk, ið starvast á øðrum náttúrugripasøvnum.



Sletvik rannsóknarstovan í Norra

## SARA RÁÐGEVING ÚTI Á BYGDARSØVNUNUM

**Síðani SARA skrásetingarskipanin** bleiv tikin í brúk, kemur meira enn so fyri, at bygdarsøvn venda sær til Tjóðsavnið og biðja um leiðbeining. Talan kann vera um at koma í gongd við at skráseta ella aðrar spurningar.

Tjóðsavnið metir, at tað hevur stóran týdning, at savnindini hjá bygdarsøvnunum verða skrásett í einari tryggari skipan. Í hesum sambandi hevur starvsfólk frá Tjóðsavninum í ávísum førum verið á vitjan á bygdarsøvnum fyri at leggja lag á.



Lydia Laksáfoss er ein av stigtakarunum til bókaútgávu um Beintu, sum var gift við fleiri prestum í Vágum. Lydia og Magni Laksáfoss greiddu frá, hvussu bókin var vorðin til, og frá serligum hendingum í lívi Beintu, sum ikki vóru kendar áður, men eru lýstar í bókini



Eftir fyrilesturin við Lydiu og Magna varð vitjað í Kálvalíð og í Jansagerði. Her eru starvsfólk inni í roykstovuni í gomlu og friðaðu húsunum í Kálvalíð, har Beinta búði eitt skifti



Uttan fyri húsini í Kálvalíð



Súsanna Joensen, konservator, greiðir frá mynd, ið hongur á vegginum í forvitnisligu húsunum hjá Miðvágs Bygdasavni. Húsini standa á toftunum eftir gamla prestagarðin í Jansagerði

# TJÓÐSAVNIÐ VITJAR Í VÁGUM

## 4. og 5. november vóru starvsfólk Tjóðsavnsins til starvsfólkadagar. Hesa ferð gekk leiðin til Vágar, sum hevur mangt spennandi at bjóða

**Tjóðsavnið hevur seinastu** árini skipað fyri starvsfólkadøgum. Hetta hevur verið gjørt á tann hátt, at øll starvsfólk savnsins hittast 1–2 dagar í einum øki í Føroyum, har starvsfólkini gera vitjanir, hoyra fyrilestrar, loysa ymiskar arbeiðsuppgávur og annars verða saman í sosialari samveru.

Dagarnar 4. og 5. november var Hotel Vágar karmurin um starvsfólkadagar Tjóðsavnsins. Her varð etið og gist, og her vóru flestu av fyrilestrunum og framløgunum. Vitjað varð eisini í fleiri av bygdunum og í fleiri av søvnunum í oynni.



Kolbrún í Haraldsstovu, savnsvørður, skrivar í gestabókina í Jansagerði



Vitjað varð á Gásadalsgarði og gingið ein túr í bygdini. Lívfrøðingarnir Janus Hansen og Agnes Kreiling eygleiða og frøast um tveir tangspógvar



Á Krígssavninum í gamla SOR-bygninginum tætt við flogvøllin tók Karl Johan Nielsen, formaður, ímóti og vísti savnsfólkunum runt



Jón S. Hansen arbeiðir við spennandi verkætlan at byggja bátasavn í Miðvági, har ætlanin er at siga søguna um grønlandsútróðurin



Hetta nýggja savnið eigur fleiri grønlandsbátar og aðrar lutir frá grønlandsútróðrinum. Teir standa á einum virki á havnarlagnum í Miðvági



Seinna dagin varð vitjað í Sandavágs kirkju, har Heini Frits Petersen greiddi frá



Miðmáli á Fiskastykkinum í Sandavági

# MIÐLAN 2021

5. februar 2021 hevði **Erland Viberg Joensen** framløgu fyri Gjaldstovuni í Studentaskúlanum í Hoydølum: *Sanatoriið í Hoydølum. Hús – bygningar – landslag*

6. februar 2021. Í sambandi við ein "ullardag" á Búnaðarstovuni kunnaði **Kristina Djurhuus Christiansen** um UNESCO-sáttmálan, skránna *Livandi Mentan* og ullarvirking sum siðaarv

12. mars 2021 hevði **Tórálvur Weihe** framløgu um sethúsini í Tinganesi fyri starvsfólkunum á uttanríkispartinum á UMMR, sum halda til har

13. mars 2021 hevði **Erland Viberg Joensen** tvær framløgur á aðalfundinum hjá Sands Fornminnafelag í Sands skúla: *Endurreisingin av hvalastøðini við Áir. Savn og fornminni. Framtíðarætlanir* og *Havsins søgur Savnsvirksemi við Áir*

17. apríl 2021 hevði **Erland Viberg Joensen** framløgu á aðalfundinum hjá Grindamannafelagnum í skúlanum hjá Dugna við Áir: *Endurreisingin av hvalastøðini við Áir. Savn og fornminni. Framtíðarætlanir*

17. apríl 2021 hevði **Kristina Djurhuus Christiansen** framløgu um UNESCO-sáttmálan og grindadráp á skránna *Livandi Mentan*. Aðalfundur hjá Grindamannafelagnum í skúlanum hjá Dugna við Áir

22. juni 2021 høvdu **Erland Viberg Joensen** og **Mayfinn Norðoy** framløgu og rundvísing á hvalastøðini við Áir fyri Sunda býráð og framløgu í skúlanum í Hósvík: *Havsins søgur, Savnsvirksemi við Áir*

9. september 2021 høvdu **Erland Viberg Joensen** og **Mayfinn Norðoy** framløgu á Mentanardøgum 2021 hjá Sunda Kommunu í Skúlanum við Streymin, *Havsins søgur – Savnsvirksemi við Áir*

24. september 2021. **Jón Aldará** hevði fyrilestur á Vísindavøku, "Náttúran í Koltri"

11. og 14. oktober 2021 **Ann Sølvia Selmarsdóttir Purkhús**: "Seyðahald í fornfrøðini". Fyrilestur í Brekkutúni í sambandi við savnsfagnað

15. oktober 2021 hevði **Agnes Kreiling** framløgu á lívfrøðiráðstevnu í Reykjavík í Íslandi við heitinum "Capturing the terrestrial invertabrate fauna on the island of Koltur, Faroe Islands".

15. oktober 2021 hevði **Janus Hansen** framløgu á lívfrøðiráðstevnu í Reykjavík í Íslandi við heitinum "European storm-petrels in the Faroes: Lifestream and survey"

27. oktober 2021 hevði **Erland Viberg Joensen** framløgu fyri Arkitektskolen i København í Müllers pakkhúsi: *Tórshavn by og havn – mellem urbane og maritime miljøer*

27. oktober 2021 **Ann Sølvia Selmarsdóttir Purkhús**: "Fornfrøði í Føroyum". Fyrilestur í Brekkutúni í sambandi við ferðaleiðaraskeið

10. november 2021 hevði **Ann Sølvia Selmarsdóttir Purkhús** framløgu og rundvísing í Kirkjubø í sambandi við ferðaleiðaraskeið

24. november 2021 **Jan Sørensen** fyrilestur um LTM-Benthos(Long Term Monitoring – Bentos) í Arktisk Forum

25. november 2021 í sambandi við vistarskeið við Gjógv fyri lærarar um føroyskan dans í skúlahøpi hevði **Kristina Djurhuus Christiansen** framløgu um UNESCO – sáttmálan og um týdningin av at hava føroyskan dansk í skúlanum

## ÚTGÁVUR

**Agnes Kreiling og Janus Hansen**
"Tøðklukkur í Føroyum – óvæntaður fongur í seyðasparli". Frøði nr. 1 2021

**Jan Sørensen, Jørgensen et al. (2021)**
"International Megabenthic Long-Term Monitoring of a Changing Arctic Ecosystem: baseline results".
Progress in Oceanography 200 (II)



# TJÓÐSAVNIÐ Í MIÐLUNUM 2021

| | |
|---|---|
| 11.01.2021 | **KVF/Við Tórði á túri** við Áir. Endursending frá 2017. |
| 11.03.2021 | **Dimma.fo**. Agnes-Katharina Kreiling og Leivur Janus Hansen. *Tjóðsavnið funnið nýggja tøðklukku í Føroyum.* |
| 12.04.2021 | **KVF/ Við Tórði á túri**. Erland Viberg Joensen um *Sanatoriið í Hoydølum* (1:2). |
| 19.04.2021 | **KVF/ Við Tórði á túri**. Erland Viberg Joensen um *Sanatoriið í Hoydølum* (2:2). |
| 19.04.2021 | **in.fo**. Kristina Djurhuus Christiansen um grindadráp sum livandi mentan. |
| 27.04.2021 | **KVF/Góðan morgun Føroyar**. Kristina Djurhuus Christiansen um skránna Livandi mentan og um grindadráp á skránna. |
| 11.05.2021 | **in.fo**. Um stuðul til náttúruverkætlan í Koltri. |
| 16.05.2021 | **in.fo**. Um 3 ára granskingarætlanina í Koltri. |
| 18.05.2021 | **KVF/Nón**. Leivur Janus Hansen, Kolbrún í Haraldsstovu og Jón Aldará. Samrøða um Koltur sum náttúrufriðøki. |
| 21.05.2021 | **KVF/Nón**. Rannvá Winkler. Samrøða um myndaframsýning á Eiði. |
| 07.06.2021 | **KVF/Nón**. Kolbrún í Haraldsstovu og Annleyg Patursson um plantufrøðiliga urtagarðin. |
| 02.06.2021 | **in.fo**. Um urtagarðin, sum letur upp í Hoyvík. |
| 14.06.2021 | **portal.fo**. Um hvalastøðina við Áir. |
| 23.06.2021 | **portal.fo**. Um summartúrar. |
| 01.07.2021 | **in.fo**. Bjørn Patursson um summarið í Koltri. |
| 17.07.2021 | **TV2 Nyheder**. Ann Sølvia Selmarsdóttir Purkhús. Um drotningavitjanina á Víkingatoftunum í Kvívík. |
| 22.07.2021 | **KVF**. Tórarinn Niclasen á Rípuni var við í útvarpssendingini *Turkaránið í Hvalba í 1629*. |
| 23.07.2021 | **KVF/Nón**. Rannvá Winkler. Samrøða um nýggju framsýningina "Ull er Føroya gull". |
| 26.09.2021 | **DR/Anne og Anders i norden**. Jón Aldará um fuglaveiðu og Bjørn Patursson um Koltur. |
| 06.08.2021 | **Sosialurin**. Jón Aldará. Um støðuna hjá sjófugli. |
| 31.08.2007 | **KVF/Góðan morgun Føroyar**. Herleif Hammer um varðveitingarverdar bygningar. |
| 06.09.2021 | **dimma.fo**. Guðrið Poulsen sett í starv. |
| 14.09.2021 | **in.fo**. Ann Sølvia Selmarsdóttir Purkhús um ph.d - ritgerðina. |
| 28.09.2021 | **KVF/Góðan morgun Føroyar**. Ann Sølvia Selmarsdóttir Purkhús greiðir frá um víkingagravir í Føroyum og sína phd. verkætlan. |
| 05.10.2021 | **KVF/Góðan morgun Føroyar**. Johan Castenschiold og Leivur Janus Hansen. *Granskari telur fugl við dronu*. |
| 11.10.2021 | **KVF/Nón**. Tórarinn Niclasen á Rípuni og Rannvá Winkler. Um savnsfagnaðin. |
| 15.10.2021 | **dimma.fo**. Helgi Michelsen um kanningar í sambandi við kloakkering í Gongini í Havn. |
| 23.10.2021 | **KVF/Brunsj**. Jón Aldará. |
| 12.11.2021 | **KVF/Góðan morgun Føroyar**. Tórarinn Niclasen á Rípuni tosaði við Rúna Jákupsson um kortini hjá Born kapteyni. |
| 16.11.2021 | **KVF/Vísindavøka**. Jón Aldará um náttúruna í Koltri. |
| 13.12.2021 | **KVF/ Nón**. Kristina Djurhuus Christiansen. Føroyski báturin á UNESCO listan yvir siðaarv. |



Ann Sølvia Selmarsdóttir Purkhús

# Ann Sølvia Selmarsdóttir Purkhús vart ph.d. við Durham University

Mánadagin hin 1. mars 2021 vardi Ann Sølvia sína ph.d.-ritgerð við Durham University. Heitið á ritgerðini er *Burials and Landscapes during the Viking Age* og snýr seg um gravir og landsløg í Føroyum í víkingatíð

**Vegna Covid-19 støðuna** var verjan á netinum. Próvdómarar vóru Sarah Semple, Professor and Head of Department við Durham University (innanhýsis), og Neil Price, Professor of Archaeology við Uppsala Universitet (uttanhýsis). Verjan gekk væl og vardi umleið tveir tímar. Skoðsmálini vóru góð, og verjan varð staðin við teirri treyt, at smáar rættingar skuldu gerast. Endaliga útgávan av ritgerðini varð formliga góðkend í august 2021.

Ann Sølvia er tí útnevnd Doctor of Philosophy í fornfrøði og er fyrsti føroyingur við einum doktaraheiti í fornfrøði í Føroyum.

Í síni granskingartíð hevur Ann Sølvia verið innskrivað fyrst við University of Aberdeen og harnæst við Durham University, Department of Archaeology. Fyrsti vegleiðari hjá Ann Sølviu var Dr Karen Milek, Associate Professor við Durham University, og annar vegleiðari var Professor Mike Church, Durham University. Uttanhýsis vegleiðari var Símun V. Arge, sáli, ið arbeiddi sum fornfrøðingur, ráðgevi og granskari á Tjóðsavninum.

Verkætlanin er høvuðsfíggjað av Granskingarráðnum, Fugloyar Kommunu og Hvannasunds Kommunu.

Ann Sølvia er flutt heim til Føroyar og hevur fulltíðarstarv sum fornfrøðingur á Tjóðsavninum. Ætlanin er, at ph.d.-ritgerðin verður útgivin.



# VITJANDI Á FRAMSÝNINGUNUM 2021

Sanna Hansen, fyrisitingarleiðari

## BREKKUTÚN

**Hóast landið eisini** í 2021 var merkt av farsóttini, varð framsýningin í Brekkutúni væl vitjað alt árið. Samanlagt vóru 10.529 vitjandi, sum var 35% fleiri enn í 2020. Býtið av vitjandi millum føroyingar og útlendingar var 60/40, og sama býti var millum vaksin og børn.




## SAVNSFAGNAÐUR

**Evnið á árliga** savnsfagnaðinum var "Ull er Føroya gull". Tað vísti seg, at nýggi leisturin, ið varð nýttur í fjør, har almennu tilmælini høvdu við sær avmarkingar fyri talið á vitjandi, eydnaðist so væl, at valt varð at halda fram við sama leisti. Broytingin hevði við sær, at bert eitt avmarkað tal av fólki slapp at taka lut á savnsfagnaðinum, antin kl. 11-13 ella kl. 14-16, og fólk kundu melda seg til fyri at tryggja sær pláss. Samlaða vitjanartalið var 1.455, sum er stívliga 400 fleiri enn árið frammanundan. Tað vísir seg, at vitjanartølini vaksa gjøgnum vikuna, t.v.s. at fæst vitjandi eru mánadag og tey flestu fríggjadag. Vit vita, at hetta fyri ein part er talan um, at fólk vitja umaftur seinni í vikuni, umframt at tað er eitt tekin um, at savnsfagnaðurin er væl umtóktur og róstur, sum so fær onnur at vitja.

## HOYVÍKSGARÐUR

**Hoyvíksgarður hevur opið** summarhálvuna, og sama atgongumerki er galdandi fyri bæði framsýningina í Hoyvíksgarði og í Brekkutúni. Nógv vitjandi ganga tí hugnaliga túrin eftir gøtuni millum báðar framsýningarnar. Niðri í Hoyvíksgarði er umframt sjálvan Hoyíksgarð eisini gjørligt hjá vitjandi at síggja úthúsini, sum hoyrdu til garðin, umframt mylluna, sum stendur so vakurt goymd oman móti fjøruni. Økið niðan móti Karantenuhúsinum varð í 2021 ruddað fyri sponsk hindber og ein betri gøta gjørd niðan til tað, so húsið og økið nú eisini eru partar av útisavninum hjá Tjóðsavninum. Bonkur er við húsið, har tað ber til at njóta vakra útsýnið yvir dalin og fjørðin. At útisavnið eisini er víðkað við plantufrøðiliga urtagarðinum kann gera vitjanina enn meir áhugaverda hjá fleiri og kann eisini hava ávirkað vitjanartølini, tí 2.626 vitjaðu í Hoyvíksgarði í 2021 samanborið við 1.882 vitjandi í 2020, altso ein hækking upp á knapt 40%.

## HVALASTØÐIN VIÐ ÁIR

**Í 2021 var** hvalastøðin við Áir opin fyri almenninginum hálvan juni og læt aftur hálvan august. Hvalastøðin var ikki eins nógv opin og árið frammanundan, tá ið tað var opið frá hósdegi til sunnudag. Í 2021 varð minkað um upplatingartíðirnar og einans opið um vikuskiftið, altso leygar- og sunnudag kl. 10-17, og hetta vísti seg at roynast væl. Í vanligu upplatingartíðini løgdu 359 fólk sær leiðina fram við hvalastøðini, har tríggjar rundvísingar vóru um dagin, og tær vóru sera væl umtóktar. Fleiri skúlar, arbeiðspláss, pensjónistafeløg og onnur feløg heittu harafturat á Tjóðsavnið um at skipa fyri, at tey kundu vitja hvalastøðina uttan fyri vanligu upplatingartíðirnar – talan var um 165 fólk. Hetta var millum annað í sambandi við starvsfólka- og aðrar útferðir. Í alt vitjaðu sostatt 524 fólk hvalastøðina, harav nógv størsti parturin var føroyingar.

## SERFRAMSÝNINGIN

**Serframsýningin í 2021** var eins og í fjør av myndum, sum Adam Woolfitt tók fyri viðurkenda blaðið National Geographic síðst í sekstiárunum. Hann gav Tjóðsavninum myndasavnið sum gávu, og á hvítusunnu vórðu myndir, sum vóru tiknar norðuri á Eiði, valdar út úr myndasavninum hjá Adam Woolfitt og gjørdar til eina framsýning, ið varð kallað 'Gerandislív á Eiði 1968'. Forvitnisliga framsýningin varð sýnd fram í Hólmahúsinum á Eiði frá 22. mai til 24. mai 2021. Stívliga 250 fólk vitjaðu framsýningina hesar dagarnar, har tað eisini var møguligt at ogna sær myndir.

## UPPLIVINGARTÚRAR

**Upplivingartúrarnir, ið Tjóðsavnið** byrjaði undir farsóttini í 2020, fingu so góða undirtøku, at valt varð at halda fram at geva fólki henda møguleika í ár. Á upplivingartúrunum fingu fólk høvi at fara túrar saman við serfrøðingum á Tjóðsavninum og síggja fuglar og skordýr, at hyggja at blómum, ganga í fjøruni og vitja ein fornfrøðiligan grevstur. Túrarnir vóru ymsastaðir í landinum, og 100 vaksin og børn nýttu henda møguleika. Túrarnir vórðu ikki eins væl lýstir og árið frammanundan, og hetta sást eisini aftur í vitjanartølunum, ið vóru lægri enn árið frammanundan.

## KOLTUR

**Tað vóru 223** vitjandi í savnshúsinum heima í Húsi í 2021, sum er eitt vet minni enn árið frammanundan.


*Lærarar og næmingar úr “Gula Skúla” vitja á Tjóðsavninum*

# ÁRIÐ SUM FÓR HJÁ SAVNSLÆRARUNUM

**Eins og í fjør setir koronustøðan síni spor. Tað hava ikki verið eins nógvar vitjanir, og tað vanliga eru. Tó eru fleiri í ár enn í fjør, tá ið savnið stongdi eitt tíðarskeið**

Tórarinn á Rípuni, savnslærari

**Tær flestu vitjanirnar** eru úr skúlum og av stovnum í Havn. Og tað er einamest kostnaðurin, ið her hevur nakað at siga. Eftirsum tað ikki er gjørligt hjá stovnum og skúlum á bygd at bíleggja sær pláss við bussinum til Havnar, eru túrarnir fækkaðir munandi. Tað kostar ov nógv at leiga bussar til vitjanir kring landið, og tí gera flestu skúlar á bygd bert ta einu ferðina um árið. Vit hava tó havt vitjanir úr øllum landinum. Úr Suðuroy hava t.d. Hvalbiar skúli, Tvøroyrar skúli og Vágs skúli verið á vitjan.

Hjá stovnum og skúlum í Havn er øðrvísi. Bussleiðin er ókeypis, so tað er lætt og ómakaleyst at fara á savnsvitjan.

Skúlin á Fløtum og Skúlin við Løgmannabreyt stóðu fyri teimum flestu fólkaskúlavitjanunum í 2021. Í nærum øllum førum koma skúlaflokkarnir á vitjan við einum endamáli – teir vilja síggja og hoyra um okkurt, sum teir arbeiða við.

Dagstovnavitjanirnar eru oftast eitt sindur meiri spontanar. Tey fáa eina rundvísing, men ganga so eisini sjálvi runt og hyggja; uppgávurnar, Tjóðsavnið hevur liggjandi til børn, koma ofta væl við hjá teimum. Vitjanin endar næstan altíð við, at matpakkin verður etin í Glasstovuni.

Miðnámsskúlavitjanir fylla eisini nógv, og her hevur Glasir nógv tær flestu vitjanirnar. Glasir er samanlagt tann skúlin, ið brúkar savnið mest. Hesar vitjanirnar eru næstan altíð liður í undirvísingini; tey vilja síggja og hoyra um tað, sum tey arbeiða við.

Vitjanirnar úr útlondum vóru ikki so nógvar, men tað var heldur ikki væntandi orsakað av koronustøðuni. Í ár vóru allar tær útlendsku vitjanirnar úr Danmark. Hesar vitjanir eru ofta drúgvar, tí næmingarnir vilja síggja sum mest, og teir spyrja sera nógv. Hjá onkrum donskum skúla er savnsvitjanin afturvendandi, tí tey koma til Føroya á hvørjum ári.



# STARVSFÓLK 2021


Herleif Hammer
Stjóri


Kim J. Clementsen
Húsavørður


Hákun Andreasen
Savnsteknikari


Jóannes Stephansson
Savnsteknikari


Súsanna Joensen
Konservator


Tórarinn N. á Rípuni
Savnslærari


Rannvá D. Djurhuus
Skrivstovufólk


Helgi D Michelsen
Savnsvørður, fornfrøðideild


Leivur Janus Hansen
Savnsv., landdjóradeild


Tórálvur Weihe
Savnsarkitektur, bygningsd.


Jón Aldará
Lívfrøðingur


Sanna Hansen
Fíggjarfulltrúi


Herdis H. Jacobsen
Savnshjálpari


Ólavur H. Øster
Savnsteknikari


Bjørn Patursson
Fyristøðumaður, Koltur


Josefina Dam Haraldsen
Journal


Erland Viberg Joensen,
Savnsvørður, fólkalívsdeild


Palli Askham
Savnslærari/KT-vørður


Rannvá Winkler
Savnsvørður


Elsuba Olsen
Bókhald


Jan Sørensen
Savnsvørður, sjódjóradeild


Ann Sølvia S. Purkhús
Fornfrøðingur


Agnes-Katharina Kreiling
Lívfrøðingur


Sune Strøm
Savnshandverkari


Young-Mee Rim
Konservator


Anna Maria Bengtson,
Reingerð


Kristina D Christiansen
Antropologur


Kolbrún D. í Haraldsstovu
Savnsvørður, plantudeild


Guðrið Reginsdóttir Poulsen
Savnsteknikari

## STARVSFÓLK, SUM ERU BYRJAÐ ELLA GIVIN Í 2021

**Á sumri 2021 fór Ólavur H. Øster** frá fyri aldur. Ólavur byrjaði á savninum sum lærlingur fyri 47 árum síðani og hevur arbeitt sum savnsteknari síðani tá. Ein grein, sum sigur eitt sindur meir um arbeiðið hjá **Ólavi**, saman við myndum frá fráfaringarhaldinum, sum varð hildið, er at síggja aðrastaðni í ársritinum.

Avloysarin fyri Ólav er **Guðrið Reginsdóttir Poulsen**. Guðrið er kandidatur í søgu við sergrein í kunningarfyrisiting frá Aalborg Universiteti og hevur drúgvar royndir frá Tjóðskjalasavninum við m.a. goymslurøkt og skráseting av pappírssavnindum. Guðrið byrjaði í starvinum 1. september 2021.

**Young-Mee Rim**, sum byrjaði sum konservator á Tjóðsavninum í januar 2020, fór úr starvinum við árslok 2021.

**Agnes Kreiling** var 1. juli sett í tíðaravmarkað starv sum lívfrøðingur í sambandi við Koltursætlanina.



# MINNINGARORÐ UM SÍMUN V. ARGE

## Tað vóru sorgarboð, ið bórust okkum leygardagin hin 13. februar í 2021, at Símun so brádliga var farin

Símun Vilhelm Arge varð føddur 5. september í 1948 og vaks upp í Hornabø í Havn. Foreldrini vóru Oscar Frits Arge (1912-1976) tubbakshandlari og Ella Katrina Olivia Arge, fødd Vilhelm (1915-2007). Símun var teirra einasta barn. Hann varð giftur við Sigrid Winther, og tey fingu børnini Elin og Halgir, og ommu- og abbabørnini eru fimm í tali. Hann var sera familjukærur og tosaði mangan um Sigrid, børnini, verbørnini og abbabørnini. Við sínum opna og vinsæla lyndi spurdi hann ofta: "*Hvussu veit við hjá tær og tínari familju?*"

Símun fór at lesa fólkalívsfrøði í Keypmannahavn í 1969. Í januar 1970 byrjaði hann sum lesandi at arbeiða á táverandi Føroya Fornminnissavni, nú Tjóðsavnið. Fyrst hjá Knud J. Krogh, savnsvørður á Nationalmuseet í Danmark, í útgrevstrinum í Sands kirkju. Her birtist áhugin fyri fornfrøðini í Føroyum, serliga á Sandi, ið seinni gjørdist eitt av hjartamálum hansara. Símun las miðaldarfornfrøði á Aarhus Universitet, har hann tók prógv sum cand.mag. í miðaldarfornfrøði í 1986. Fornfrøðin bleiv síðan bæði "*lívsstarv og hobby*", sum hann sjálvur tók til.

Símun var virkin innan fyri føroyska fornfrøði í meira enn 50 ár. Í 1986 varð hann settur í fast starv sum savnsvørður. Hann var eisini settur landsantikvarur í trimum umførum, í alt fýra ár. Sum leiðari á fornfrøðideildini skipaði hann fyri fleiri fornfrøðiligum rannsóknum, altjóðasamstarvi og sat í fleiri nevndum. Hann arbeiddi eisini tætt saman við kommunalum og almennum myndugleikum kring landið. Við hesum umboðaði Símun fornfrøðina í Føroyum virðiliga, hugfarsliga og á fakliga høgum støði bæði her heima og í altjóða netverkum og verkætlanum. Hann dugdi væl at greiða frá fornfrøðiliga virkseminum í Føroyum í miðlunum, soleiðis at tað gjørdist livandi og áhugavert.

Umframt hetta var Símun náttúruvinur. Hann dugdi at síggja spor eftir menniskjum í náttúruni, bæði nýggj og gomul. Hesir eginleikarnir komu væl við hjá honum í fornfrøðiligum lendisskrásetingum. Hann dugdi væl at síggja tað vakra í landslagnum og sá skjótt, hvørjar nýbyggingar møguliga misprýddu, og hvørjar hóskaðu seg væl inn í náttúruna. Eisini tí var hann eitt gott umboð fyri Tjóðsavnið í Yvirfriðingarnevndini.

Seinastu árini arbeiddi Símun serliga við at fáa varðveitingararbeiðini av Múrinum og Líkhúsinum í Kirkjubø liðug. Eisini arbeiddi hann við at fáa gjørt bakkaverjur bæði í Kirkjubø og á Sondum á Sandi fyri at verja fornminnini, ið eru hótt av burturmáan.

Símun var sum fornfrøðingur nærlagdur og kritiskur í sínum fakliga arbeiði. Hann hevði gott minni og rúgvismikla vitan um føroyska fornfrøði og var tí góður at heita á og at spyrja til ráðs. Hann legði dent á tvørfakligt samstarv og var høgt í metum í altjóða fornfrøðiliga umhvørvinum. Umframt hetta gav hann ungum lesandi møguleikan at luttaka í arbeiðinum á savninum. Á hendan hátt menti og lærdi Símun fólk upp í fornfrøði í Føroyum.

1. oktobur í 2020 fór Símun frá fyri aldur, og á Tjóðsavninum var hátíðarhald fyri honum. Hóast farin frá var hann knýttur at Tjóðsavninum sum emeritus og hevði stórar ætlanir um at granska og at skriva um fornfrøði.

Tíanverri varð Símun tikin alt ov brádliga frá okkum, og tessvegna fekk hann ikki fullgjørt allar verkætlanirnar, ið hann arbeiddi við.

Vit minnast Símun sum ein góðan vin og samstarvsfelaga her á Tjóðsavninum. Tað er ein stórur missur fyri okkum ikki at hava hann at heita á og at spyrja til ráðs. Vit sakna hann. Tankar okkara leita til familjuna í sorgini.

*Ærað veri minnið um Símun.*

**Starvsfelagarnir á Tjóðsavninum**





Desember 2021. Guðrið er inni á bókasavninum og skrásetur innkomnar gripir



Frá fráfaringarløtu Ólaus Øster tann 27. apríl 2021.

# ÓLAVUR ØSTER FARIN FRÁ

## Eftir nærum hálva øld sum savnsteknikari ynskti Ólavur Øster at fara frá fyri aldur. Tíðin var komin at gera annað enn at fáast við søguligar gripir, myndir og savnsarbeiði annars

**Ólavur byrjaði á** Føroya Fornminnissavni í 1974 og stóð saman við Jógvani Ravnsfjall í læru sum savnsteknikari á Fornminnissavninum, sum tá helt til í Postmeistarahúsinum á Debesartrøð. Ólavur er sostatt eisini søguligur og hevur verið partur av gongdini fram til í dag.

Starvið sum savnsteknikari er fjølbroytt. Tað mesta og týdningarmesta er skráseting av gripum, fotomyndum og av øðrum søguligum tilfari. Tað er at hava skil á skráseting og varðveiting av gripum og myndum. Men tað er so nógv annað, ið fylgir við hesum starvi. Ólavur hevur fingið fyrispurningar frá einstaklingum, stovnum, fyritøkum, frá granskarum uttan úr heimi, frá rithøvundum, sum hava heitt á hann at fáa hjálp í sambandi við útgávu av bókum. Hetta arbeiði sæst ikki so væl aftur, men Ólavur hevur í stillum og uttan hóvasták svarað og avgreitt hesar uppgávur til fulnar. Somuleiðis hevur hann eisini verið við í at kalla øllum framsýningum, sum hava verið á savninum, stórum og smærri serframsýningum, hevur sett upp, tikið niður, funnið tað rætta, flutt og broytt og sett upp á pláss aftur. Somuleiðis tá ið almennar vitjanir hava verið á savninum, landsstýrisfólk, Arktiska Ráðið, íslendski forsætismálaráðharrin, sendifólk, danska drotningin, løgtingsnevndir, útlendskir grunnar og umboð úr Mentamálaráðnum, fyri at nevna onkra vitjan úr rúgvuni, eru fyrireikingarnar farnar fram í stillum. Ólavur er altíð komin á mál við einum smíli.

Vit takka Ólavi fyri gott vinalag og fyri trúgva tíð í landsins tænastu í 47 ár. Tað er ein dygd, onki minni.

### GUÐRIÐ REGINSDÓTTIR POULSEN HEVUR TIKIÐ VIÐ EFTIR ÓLAV

**Eins og Ólavur** hevur Guðrið eisini havt síni spor í Postmeistarahúsinum á Debesartrøð. Har hevur Landsskjalasavnið, nú Tjóðskjalasavnið, húsast í mong ár, og har var Guðrið í starvi í átta ár. Hon hevur kandidatútbúgving frá Aalborg Universiteti í søgu, við sergrein í informatiónsforvaltning – skjalavørður. Tað, sum sæst hjá Guðrið, er tað nærlagni, sum skal til. Mentanararvurin skal umsitast við varsemi. SARA er tann nýggja skrásetingarskipanin. Hon setur krøv til sjálva skrásetingina av gripum og myndum. Tað er øðrvísi arbeiðslag enn skjalaskráseting, men okkurt sæst tó aftur.

Guðrið fer at arbeiða við innsavning, røkt og arbeiði á gripagoymslum, skráseting og framsýningargerð og hevur longu nógv sambond við fólk, sum hava tørv á hjálp við myndum og upplýsingum annars, sum Tjóðsavnið liggur inni við.

# SUMMARY IN ENGLISH

**Also 2021, like** 2020, saw activities at the Museum affected by the corona situation, albeit in a slightly different manner. In 2020 the corona pandemic was new. Nobody knew, how the pandemic would play out, and the measures taken as well as the recommendations from authorities were very extensive. This entailed periodical closure of the National Museum both as a place of work and its exhibitions. The situation was different in 2021. The exhibitions were kept open as usual, but with a few restrictions e.g. on number of visitors at any one time. What was different was the number of visitors, which was much lower than usual, and it was the foreign visitors in particular that were missing.

**Although travelling abroad** was comparatively easy in 2021, most meetings and conferences with participants from several countries were either postponed or organized on the internet. In other respects the activities in the Museum were as always – many and interesting.

**Work on the** comprehensive plan for Koltur continued. We had a breakthrough when the Aage V. Jensen foundation granted 2 mill. kr. in support of a project to register all flora and fauna in Koltur. The Aage V. Jensen foundation also supported the National Museum in two other projects. One was doing a trial bird count by drone, the other to schedule an outfield in Kalsoy as protected area.

**2021 was also,** like many previous years, characterized by the numerous developments around the country. The Museum archaelogists accordingly have been very busy recording cultural landscapes and antiquities before they disappear for ever in connection with developments.

**In Kúrdalur there** have been some initiatives as well. The old botanical garden which was situated on Debesartrøð for decades was moved to Hoyvík and was officially opened on cultural night September 10. In Hoyvík museal work pertaining to the garden and activities at the Hoyvík farm would support each other. Reparations were begun on the old garden down in Kúrdalur proper as well. In which case we are not speaking of a botanical garden, but rather a garden as an example of culture history.

**The year 2021** also saw a special exhibition and a new permanent exhibition. The special exhibition "Daily life in Eiði 1968" was in the Hólmahouse in Eiði in May, and in July the permanent exhibition "Wool is Faroe Gold" opened in exhibition rooms at The National Museum in Brekkutún in Hoyvík.

**The regular events** like Museum Festival during autumn break and Summer Tours around the country were also successful in 2021.

**A major event** happened in November 2021 when the clench-built Nordic boat – or the plank boat – was accepted on the World Heritage List of UNESCO on living culture.

**The Faroe Islands** participated in a joint application with the rest of the Nordic countries to get the handicraft of making these boats on the list. Hopefully the approval will make national and local politicians really demonstrate their will to preserve the cultural heritage.

**The Museum suffered** an extremely sad blow in Fbruary 2021 when Símun V. Arge died so suddenly. Símun had retired recently due to age and was clearing up at the Museum. Although he was retiring, he had several plans. One of them being a book about the Cathedral in Kirkjubøur and the antiquities there. He conducted this work together with several authors from most of our neighbouring countries. Although Símun was gone, the Museum decided to continue the work in 2021, and the plan is to have the book published in the autumn 2022 – both in English and Faroese.





**tjodsavnid.fo**

**FRAMSÝNING**
Brekkutún 6
Hoyvík

**FYRISITING**
Kúrdalsvegur 15
Hoyvík
+298 340 500
tjodsavnid@savn.fo

Svanamerktur prentlutur 541 705